**(Uppskot til)**

# Løgtingslóg
# um
# djóravælferð
# (Djóravælferðarlógin)

## Kapittul 1
## Almennar ásetingar

**§ 1.** Lógin hevur til endamáls at fremja djóravælferð, djóravernd og virðing fyri tomum sum villum djórum.

**§ 2.** Lógin er galdandi fyri súgdjór (*Mammalia*), fiskar *(Chondrichthyes* og *Osteichthyes),* fuglar (*Aves*), paddur *(Amphibia),* skriðdjór *(Reptilia),* tíggjubeint krabbadjór *(Decapoda),* og høgguslokkar *(Cephalopoda),* eins og lógin er galdandi fyri onnur djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki.
*Stk. 2.* Á sama hátt er lógin galdandi fyri ymisk menningarstig av somu djórum, um sansingargøgnini samsvara við menningarstigið hjá livandi djórum.
*Stk. 3.* Lógin er galdandi á føroyskum landøki og á sjóøkinum innan fyri fiskimarkið, á skipum, ið eru skrásett í Føroyum, og á flogførum hjá feløgum, ið eru skrásett í Føroyum.

**§ 3.** Djór hava eginvirði, sum ikki er treytað av tí nyttuvirði, tey hava fyri fólk. Djór skulu viðfarast væl. Tey skulu ikki verða nervað ella órógvað óneyðugt, og tey skulu verjast fyri óneyðugari strongd og vandanum fyri hesum.

**§ 4.** Ein og hvør, sum kemur fram á djór, sum er eyðsýniliga sjúkt, skatt ella hjálparleyst, skal eftir førimuni hjálpa djórinum. Er talan um djór frá djórahaldi, og ber tað ikki til at veita nóg góða hjálp á staðnum, skal eigarin ella politiið hava boð beinanvegin.
*Stk. 2.* Vegfarandi skulu hava fyrilit og vísa varsemi við djórum, ið eru á ella við veg. Við ákoyring eru ásetingarnar í stk. 1 galdandi.
*Stk. 3.* Er tað eyðsýnt, at djórinum ikki er lív lagað, ella at djórið ikki kann gerast frískt aftur, kann tann, ið kemur fram á djórið, avlíva tað beinanvegin. Djór frá djórahaldi skulu ikki avlívast eftir hesi áseting, um tað ber til at boða eigaranum, djóralækna ella politinum frá innan fyri rímiliga tíð. Kortini kann djór frá djórahaldi verða avlívað beinanvegin, um tað er eyðsýnt, at djórinum ikki er lív lagað.
*Stk. 4.* Landið rindar fyri neyðugar útreiðslur til átøk eftir hesi grein, men útreiðsla, ið stendst av átøkum fyri djór frá djórahaldi, kann krevjast aftur frá eigara ella tí, ið rekur djorahaldið.
*Stk. 5.* Ásetingarnar í stk. 1-3 galda á sama hátt fyri tann, sum tilvitað ella av grovum ósketni elvir djóri skaða, men viðkomandi kann ikki krevja landið eftir endurgjaldi fyri útreiðslur fyri átøk, sum standast av hesum.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um endurgjald fyri útreiðslur eftir hesi grein.

**§ 5.** Ein og hvør, sum hevur orsøk til at halda, at djór eru fyri skammfaring ella fyri álvarsligum svíki viðvíkjandi umhvørvi, eftirliti og røkt, skal skjótast gjørligt boða politinum frá. Fráboðanarskyldan er galdandi við teimum avmarkingum, sum eru ásettar í aðrari lóggávu.
*Stk. 2.* Ein og hvør, sum fær kunnleika um, at fleiri vill djór ella útiløgudjór eru sjúk ella skadd, skal skjótast til ber boða politinum frá.

**§ 6.** Heilivágsviðgerð og skurðviðgerð skal gerast við fyriliti fyri djóravælferðini og umhugsni fyri virkisføri og lívsgóðsku hjá djórinum. Einans djóralæknar kunnu seta djór í viðgerð og skurðviðgera.
*Stk. 2.* Loyvt er ikki at skurðviðgera ella taka burtur kropslutir á djórum uttan so, at hetta er neyðugt fyri at tryggja heilsuna hjá djórinum. Kortini er djóraeigara loyvt at beinskerja fugl, sum í mesta lagi er sjey dagar gamal. Loyvt er djóralækna at avhorna og gelda, um tað er neyðugt í mun til djóravælferð ella av øðrum orsøkum. Djóraeigara er loyvt at merkja djór í djórahaldi, um hetta kann gerast á tryggan hátt.
*Stk. 3.* Neyðug doyving og pínuviðgerð skal brúkast, um talan er um pínufulla skurðviðgerð ella onnur pínufull inntriv.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um heilivágsviðgerð og skurðviðgerð, undir hesum áseta treytir fyri ella banna ávísum viðgerðum og viðgerðarhættum og loyva undantøkum frá stk. 2.

**§ 7.** Hóskandi framferðarháttur skal brúkast, tá ið djór verða merkt og markað. Djórið skal ikki verða darvað í síni atferð av hesi orsøk, og djórið skal ikki nervast óneyðugt.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um at merkja og marka djór, undir hesum eisini áseta og banna ávísum mannagongdum og háttum, tá ið merkt og markað verður.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at merkt og markað djór skulu vera skrásett í eini skrá, og um, hvør hevur atgongd til hesa skrá. Somuleiðis kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta reglur fyri, at djór, sum ikki eru skrásett, kunnu verða avlívað ella latin øðrum uttan endurgjald til eigaran.

**§ 8.** Tá ið djór verða flutt, skal flutningurin nerva djórið sum minst. Djór skulu bara flytast, tá ið tey eru soleiðis fyri, at tað er ráðiligt at flyta tey.
*Stk. 2.* Flutningseindin skal vera egnað til flutningin, og fyrilit skal tá havast fyri trygd og sereyðkenni hjá djórunum. Djór skulu vera undir neyðugum eftirliti og fáa neyðuga røkt, meðan tey verða flutt.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um djóraflutning.

**§ 9.** Avlíving av djórum og handfaring av djórum í sambandi við avlíving skal gerast á djóravælferðarligan fullgóðan hátt. Tann, sum brúkar doyvingar- ella avlívingarútgerð, skal tryggja, at útgerðin verður hildin við líka og er egnað til endamálið.
*Stk. 2.* Djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki, skulu doyvast, áðrenn tey verða avlívað. Doyvingin skal hava við sær, at djórið missir vitið, og djórið skal hava mist vitið, áðrenn farið verður undir at avlíva djórið og til djórið doyr. Kravið um doyving er ikki galdandi, um djórið verður avlívað á ein hátt, sum hevur við sær, at djórið missir vitið í sama viðbragdi, tað

verður avlívað. Tann, ið hevur ábyrgdina av avlívingini, skal vissa sær, at djórið er deytt. Loyvt er ikki at avlíva djór við at drukna tey.
*Stk. 3.* Bráðneyðug avlíving skal so væl sum til ber gerast í samsvari við stk. 1 og 2.
*Stk. 4.* Djór mugu ikki verða avlívað sum sjálvstøðugur partur av undirhaldi ella kapping.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um avlíving av djórum, undir hesum geva undantak frá krøvunum í stk. 2.

**§ 10.** Fyri at kunna ala, hava, selja ella lata, avlíva ella brúka djór til royndir, til undirvísing í øðrum enn vanligari røkt og handfaring, ella til medisinskt virksemi, skulu bæði stovnurin ella fyritøkan og tann, sum hevur ábyrgdina fyri ítøkiliga virkseminum, hava loyvi til hetta virksemi frá landsdjóralæknanum.
*Stk. 2.* Loyvi eftir stk. 1 verður ikki latið, um endamálið kann røkkast uttan at brúka djór, ella um djórini eru í vanda fyri at verða nervað óneyðugt. Bara neyðuga talið av djórum skal brúkast, og djórini skulu verða nervað ella ávirkað minst møguligt.
*Stk. 3.* Í loyvum eftir hesi lóg kann undantak gerast frá ásetingunum í løgtingslóg um djóralæknavirksemi v.m. soleiðis, at onnur enn djóralæknar kunnu geva djórum fulla ella lokala doyving.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um at brúka djór til royndir, undirvísing og medisinskt virksemi, undir hesum áseta forboð fyri ávísum sløgum av royndum og medisinskum virksemi, forboð fyri at brúka ávís djórasløg til royndir og medisinskt virksemi, umframt reglur um loyvi og undantak frá kravinum um loyvi. Landsstýrismaðurin kann somuleiðis í kunngerð geva undantak frá ásetingunum í lógarinnar 1. og 2. kapitli, tá ið talan er um at brúka djór til royndir.

**§ 11.** Tað er bannað
1) at vera harðligur móti ella fara illa við djórum,
2) at koma djórum í eina hjálparleysa ella vandamikla støðu,
3) at hava kynsligt samband við djór ella at fremja kynsligar gerðir við djórum,
4) at brúka livandi djór, fevnd av hesi lóg, til fóður ella agn,
5) at skjóta kóp og onnur størri havdjór við høgli,
6) at skjóta til máls eftir livandi djórum,
7) at brúka krafttól, sum ikki er góðkent til endamálið, og rossadrátt at avloysa djór við burð, og
8) at benda horn á seyði við nakkaspenni ella á annan hátt; tó er loyvt at benda við fjaðrastáli ytst á hornunum.

**§ 12.** Bygningar, girðingar og aðrar smærri innrættingar skulu gerast og haldast við líka soleiðis, at djór ikki eru í vanda fyri at verða strongd ella á annan hátt nervað óneyðugt.
*Stk. 2.* Tann, sum hevur ábyrgdina av bygninginum, girðingini og innrættingini, skal hava neyðugt eftirlit við hesum og skal seta neyðugar fyriskipanir í verk til tess at varnast, byrgja fyri og bøta um vandan fyri, at djór verða nervað óneyðugt.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um bygningar, girðingar o.tíl.

**§ 13.** Veiða og fiskiveiða skal, alt tað ber til, fremjast á djóravælferðarligan fullgóðan hátt.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og landbúnaðarmálum kann í kunngerð áseta nærri reglur um at veiða og fiska vill djór.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um at veiða og fiska djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki.

**§ 14.** Landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og landbúnaðarmálum kann í kunngerð áseta reglur um at taka og handfara vill djór, undir hesum eisini treytir og forboð fyri slíkum virksemi.

**§ 15.** Loyvt er ikki at sleppa djórum út í náttúruna, um tey ikki natúrliga hoyra heima í føroysku náttúruni, ella um orsøk er til at halda, at djórini eru ella kunnu verða natúrliga stovninum, øðrum djórastovnum ella plantulívinum at bága.
*Stk. 2.* Djór frá einum djórahaldi kunnu bara sleppast út í náttúruna við tí endamáli at gerast vill djór, um djórið hevur góðar møguleikar fyri at laga seg eftir umstøðunum og at koma undan í nýggja umhvørvinum.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta treytir ella bann fyri at sleppa djórum út í náttúruna.

## Kapittul 2
## Serligar ásetingar um djórahald

**§ 16.** Loyvt er bara at halda djór, um djórini kunnu haldast á djóravælferðarligan fullgóðan hátt.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur um, hvussu gomul djór í minsta lagi skulu vera, áðrenn tey verða latin fólki.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur, sum avmarka ella banna hald av ávísum djórasløgum *(species)*, undirsløgum *(subspecies)*, ættarsløgum *(race)* ella aligreinum.

**§ 17.** Tann, ið hevur djórahald, skal tryggja, at djórini, inni sum úti, eru í einum umhvørvi, sum fyri trivnað og vælferð er hóskandi til tann tørv, sum bæði djóraslagið og einstaka djórið hevur, undir hesum tryggja, at djórini hava rásarúm og møguleika fyri rørslu, hvíld, skjóli og aðrari natúrligari atferð.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta neyvari krøv til umhvørvi, undir hesum krøv um egnað og trygg tilhaldsrúm og um undantøk frá kravinum um tilhaldsrúm.

**§ 18.** Tann, ið hevur djórahald, skal tryggja, at nøktandi eftirlit og røkt er við djórunum, undir hesum eisini tryggja,
1) at fóður, beiti og vatn hevur høga góðsku, nøktar tørvin hjá djórinum fyri føði og vætu og fremur góða heilsu og vælferð. Djór skulu ikki verða noydd at eta ella at drekka uttan so, at hetta er djóraheilsuliga neyðugt,
2) at djór eru vard móti skaða, sjúku, sníkum, rándjórum og øðrum vandum,
3) at sjúk og skadd djór fáa hóskandi viðgerð og verða avlívað um neyðugt,
4) at smitta verður avmarkað, og
5) at ávís djór, har tað er viðkomandi, eru so mikið spøk, at tey kunnu handfarast og røktast á djóravælferðarligan hóskandi hátt.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um vavið á eftirliti og røkt og um verju og viðgerð av djórum.

**§ 19**. Vinnuligt djórahald rekur tann, sum við sølu ella fíggjarligum vinningi fyri eyga elur, hevur, gagnnýtir og selur djór, djóraúrdráttir ella tænastur beinleiðis ella um heilsølu ella smásølu til brúkaran ella til meirvirking við sølu fyri eyga.
*Stk. 2.* Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlit við, at djór, sum eru partur av einum vinnuligum djórahaldi, verða viðfarin, ansað og røkt í samsvari við ásetingarnar í hesi lóg, ásetingar, givnar við heimild í hesi lóg og aðrari viðkomandi lóggávu. Politiið skal, um neyðugt, vera eftirlitsmyndugleikanum til hjálpar, tá ið eftirlit eftir hesi áseting verður framt.
*Stk. 3.* Heilsufrøðiliga starvsstovan kann geva tí, ið er fevndur av ásetingini í stk. 1, ítøkilig boð til tess at røkka endamálinum í stk. 2. Heilsufrøðiliga starvsstovan kann, verður tað mett neyðugt, seta tiltøk í verk fyri at røkka endamálinum í stk. 2. Slík tiltøk verða rindað av tí, ið rekur vinnuliga djórahaldið.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um vinnuligt djórahald.

**§ 20.** Tann, ið rekur vinnuligt djórahald, skal tryggja, at djórini verða ansað av starvsfólki, sum hevur neyðugar fakligar førleikar. Onnur skulu hava neyðugu førleikarnar til tað virksemið, sum tey útinna.
*Stk. 2.* Tann, ið rekur vinnuligt djórahald, skal ikki lata børn undir 16 ára aldur hava sjálvstøðuga ábyrgd av djórum.
*Stk. 3.* Tann, ið rekur vinnuligt djórahald, skal ikki lata djór upp í hendurnar á fólki, um orsøk er til at halda, at tey ikki kunnu ella vilja fara væl við djórinum.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um upplæring og førleikar, undir hesum eisini reglur um løggilding og góðkenning av starvsfólkum.

**§ 21.** Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta krøv í sambandi við at seta á stovn, staðseta, skipa og reka virksemi, ið er fevnt av hesi lóg, undir hesum krøv um loyvi og afturkalling av loyvum, fráboðan, skráseting og góðkenning og um afturtøku av góðkenning.

**§ 22.** Tann, ið rekur vinnuligt djórahald, skal tryggja, at rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir, sum verða brúkt til djór, eru egnað at røkja fyrilitið fyri vælferðini hjá djórunum.
*Stk. 2.* Tann, sum marknaðarførir og selur nýggjar rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir at brúka til djór ella djórahald, skal tryggja, at hesi eru roynd í verki, og at tey, við støði í fyriliti fyri vælferð djóranna, eru egnað og góðkend til endamálið.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um sølu og brúk av ávísum rakstrarháttum, mannagongdum, útgerð og tøkniligum loysnum, umframt reglur um góðkenning og um skjalprógv fyri, at rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir eru egnað til endamálið.

**§ 23.** Tann, ið rekur vinnuligt djórahald, skal geva eftirlitsmyndugleikanum ótarnaða atgongd til øll støð ella rúm, har djór verða hildin, ella har annað virksemi, ið er fevnt av lógini, verður rikið.
*Stk. 2.* Um eftirlitsmyndugleikin ikki fær ótarnaða atgongd, og um orsøk er til at halda, at djór eru fyri óneyðugari overving, kann eftirlitsmyndugleikin fáa politiið at hjálpa sær.
*Stk. 3.* Tann, ið rekur vinnuligt djórahald, skal uttan kostnað lata eftirlitsmyndugleikanum neyðug høli, innbúgv, arbeiðshjálp og amboð, ið eru neyðug fyri at fremja eftirlitið, og skal annars hjálpa eftirlitsmyndugleikanum við at leggja eftirlitsvitjanina til rættis.

**§ 24**. Tann, ið rekur vinnuligt djórahald, og onnur, sum hava skyldur eftir hesi lóg, skulu eftir umbøn frá eftirlitsmyndugleikanum lata upplýsingar, fráboðanir, frágreiðingar, skjalprógv og innlit í skjøl, sum hava týdning, tá ið eftirlitsmyndugleikin skal kanna, um lógin og reglur, givnar við heimild í lógini, verða hildnar. Onnur, sum hava viðkomandi vitan og kunning, skulu eftir umbøn lata eftirlitsmyndugleikanum neyðugar upplýsingar.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um skylduna at upplýsa og skjalprógva og um skylduna at seta í verk og fremja reglulig eftirlitsátøk.

**§ 25.** Ein og hvør aling skal hava til endamáls at fremja eginleikar, sum geva sterk og treyst djór við góðari heilsu og góðum virkisførleikum.
*Stk. 2.* Aling, undir hesum aling við ílegutøkni, er ikki loyvd, um alingin
1) broytir arvaeginleikar soleiðis, at djórið kropsliga ella sinnisliga verður negativt ávirkað, ella um negativir eginleikar verða bornir víðari,
2) avmarkar djórið í síni natúrligu atferð, ella
3) hevur við sær almennar etiskar reaktiónir.
*Stk. 3.* Loyvt er ikki at ala við djórum, sum hava eginleikarnar, nevndir í stk. 2.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um djóraaling, sum ikki er í samsvari við meginregluna í hesi grein.

**§ 26.** Tann, sum venur djór, og tann, sum brúkar djór til framsýningar, undirhald og kappingar, eins og tann, ið skipar fyri slíkum virksemi, skal tryggja, at djórið
1) er ført fyri at útinna virksemið, uttan at tað verður lúgvað ella skatt,
2) ikki er fyri ella verður ávirkað av evnum ella viðgerð, sum kann hava við sær, at virksemið er skilaleyst í mun til djóravælferð,
3) ikki tilvitað verður rætt, skatt ella nervað óneyðugt, og
4) ikki verður vant til ella brúkt til bardaga móti øðrum djórum ella móti fólki.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um venjing, framsýningar og kappingar o.tíl., undir hesum krøv um serlig loyvi, forboð fyri ymsum virksemi, forboð fyri nýtslu av ávísum djórasløgum og forboð fyri ávísum sløgum av evnum og viðgerðum.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann geva undantøk frá stk. 1.

## Kapittul 3
## Fyrisitingarligar ásetingar, ásetingar um kæru og revsiásetingar

**§ 27.** Avgerðir, tiknar við heimild í hesi lóg ella reglum, givnar við heimild í hesi lóg, kunnu kærast til Vinnukærunevndina.
*Stk. 2.* Avgerðir eftir hesi lóg kunnu skjótast inn fyri Vinnukærunevndina, sum tekur endaliga fyrisitingarliga avgerð í málinum. Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, kærarin fekk kunnleika um avgerðina.

**§ 28.** Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áleggja gjald fyri kostnaðin av eftirliti og serligum tænastum eftir hesi lóg ella eftir kunngerðum, givnar við heimild í hesi lóg.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um, hvussu gjøldini verða roknað, innkravd og inngoldin.
*Stk. 3.* Verða gjøld eftir stk. 1 ikki rindað innkrevjandi myndugleikanum rættstundis, verður gjaldið rentað eftir rentulógini. Landsstýrismaðurin kann áseta gjald fyri áminningarskriv.

*Stk. 4.* Gjøld eftir stk. 1 kunnu verða heintað inn við panting.

**§ 29.** Heilsufrøðiliga starvsstovan kann seta á stovn ella knýta seg at verandi dátuskráum, um tað er neyðugt fyri at lúka endamál lógarinnar, ella um tað er neyðugt fyri at lúka treytir, ásettar í millumtjóðasáttmálum.
*Stk. 2.* Viðkvæmar persónsupplýsingar, sbr. løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, kunnu bara skrásetast við samtykki frá tí, sum upplýsingarnar viðvíkja.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um skyldu at lata upplýsingar til slíkar skráir.

**§ 30.** Tann, sum overvar, vanrøktar ella á annan hátt fer illa við djórum, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp í 1 ár.
*Stk. 2.* Eru viðurskiftini, nevnd í stk. 1, framd av grovum ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp í 2 ár.
*Stk. 3.* Eru viðurskiftini, nevnd í stk. 2, sbr. stk. 1, at meta sum skammfaring, er revsingin fongsul í upp í 2 ár.
*Stk. 4.* Um ikki hægri revsing er uppiborin eftir stk. 1-3 ella sambært lóggávuni annars, verður við sekt ella við fongsli í upp í 4 mánaðir revsaður tann, ið ikki ger eftir boðum, givin við heimild í § 19, stk. 3, ella sum brýtur ásetingarnar í §§ 6-12, § 15, § 16, §§ 17-18, § 20 og §§ 22-26. Medvirkni verður revsað á sama hátt.
*Stk. 5.* Revsingin, ásett í stk. 4, kann herðast til fongsul í upp í 2 ár, um gerðin ella undanlátið er tilætlað ella er gjørt av grovum ósketni, og tað við brotinum er
1) voldur skaði á heilsu hjá djórum, ella um vandi hevur verið fyri tí, ella
2) fingin er ein fíggjarligur vinningur, ella ætlanin hevur verið at fáa fíggjarligan vinning til ein sjálvan ella onnur.
*Stk. 6.* Í reglum, givnar við heimild í lógini, kann verða ásett, at brot á reglurnar ella treytir, givnar eftir reglunum, verður revsað við sekt ella fongsli í upp í 4 mánaðir. Eisini kann verða ásett, at revsingin kann herðast til fongsul í upp í 2 ár, um treytirnar, tilskilaðar í stk. 5, eru loknar.
*Stk. 7.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.
*Stk. 8.* Tá ið sekt verður ásett eftir stk. 4-6, og er talan um vinnuligt djórahald, skal fyrilit havast fyri fíggjarliga vinninginum.

**§ 31**. Tann, sum er dømdur fyri skammfaring av djórum, eins og tann, ið áður hevur brotið ásetingar í hesi lóg, kann við dóminum missa rættin at eiga, brúka, halda ella slakta djór ella sum heild sjálvur at fáast við djór. Forboðið kann vera tíðaravmarkað ella tíðaróavmarkað, og forboðið kann avmarkast til ávís sløg av djórum.
*Stk. 2.* Brot á forboð eftir stk. 1 verður revsað við sekt.
*Stk. 3.* Í sambandi við brot á stk. 1 kann politiið flyta djórið og selja ella avlíva tað, um ikki eigarin, áðrenn eina freist, ið er ásett av politinum, syrgir fyri, at djórið verður sett aðrastaðni. Útreiðslurnar, ið standast av hesum, verða rindaðar av tí, ið hevur brotið forboðið.
*Stk. 4.* Tann, ið veit um slíkt forboð, og sum letur ein persón, hvørs rættur at fáast við djór heilt ella partvíst er frádømdur eftir stk. 1, á ein og hvønn hátt fáast við djór, fevnd av forboðnum, verður revsaður við sekt.

**§ 32.** Mál, sum verða viðgjørd eftir hesum reglum, ella eftir reglum, sum eru ásettar í kunngerð við heimild í hesum reglum, verða viðgjørd sum politimál. Tey í rættargangslógini nevndu tiltøk í kap. 72 um at leggja hald á og kap. 73 um rannsakan kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.
*Stk. 2.* Útreiðslurnar eftir hesi lóg verða, er ikki annað ásett, bornar av tí almenna sum útreiðslur hjá politinum.

*Gildiskomureglur*

**§ 33.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 9 frá 14. mars 1985 um vernd av dýrum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 19. mai 2015.
*Stk. 3.* Kunngerðir, givnar við heimild í løgtingslóg nr. 9 frá 14. mars 1985 um vernd av dýrum, verða verandi í gildi, til tær verða settar úr gildi.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Løgtingslóg um vernd av dýrum, vanliga nevnd djóraverndarlógin, er sett í gildi í 1985.

Djóraverndarlógin hevur góð 30 ár á baki, men upprunalógin, sum galdandi djóraverndarlóg er bygd á, er útvið 70 ára gomul. Spurningurin um at endurskoða djóraverndarlógina hevur verið frammi við jøvnum millumbilum, men bara smærri broytingar eru gjørdar farnu 30 árini. Lógin er í støðum rættiliga yvirskipað, meðan hon aðrastaðni skipar ávís viðurskifti í smálutir. Samstundis eru hendar stórar broytingar í vinnuligum djórahaldi, m.a. við aling og mjólkarframleiðslu, uttan at hesi viðurskifti eru neyvari skipað í lógini. Húsdjórahaldini eru vorðin færri, men talið av djórum í einstøku djórahaldunum er hækkað. Fiskaaling er vorðin ein týðandi vinna, og nøgdin av alifiski veksur støðugt. Alt fleiri fólk fáa sær kelidjór ella stuttleikadjór, eisini við aling og sølu fyri eyga.

Viðurskiftini eru broytt munandi, bæði í mun til tær umstøður, sum djór hava, og í mun til ta fatan, sum fólk í dag hava av djórum, djóravernd og djóravælferð. Kunnleikin um djór, teirra eginleikar og tørv, er størri í dag, men fólk hava yvirhøvur altíð havt ta fatan, at djór skulu viðfarast væl. Góð djóravælferð hevur fyrst og fremst týdning fyri djórini sjálv, men er eisini ein kollektivur samfelagsságóði. Djór hava týdning í samfelagi og mentan okkara. Fólk hava djór fyri at fáa mat og klæði, men eisini til stuttleika, til ítrótt og til hugna. Djór verða eisini brúkt í tænastu, t.d. sum seyðahundar, førarahundar, tænastuhundar og terapihundar. Í onkrum førum er tað einamest samspælið við djórið sum eina livandi veru, ið gevur gleði og nøgdsemi; í øðrum førum er tað bara eginleiki djóranna sum nyttudjór, ið er avgerandi. Ílegutøkni ger tað møguligt at brúka djór, tá ið heilivágur verður framleiddur, og ílegutøknin fer kanska at hava við sær, at djór kunnu brúkast sum yrkisgagnargevarar (organdonorar). Samanumtikið ber til at siga, at djór verða mett sum livandi verur, ið hava virði í sjálvum sær – hetta uttan mun til, um talan er um nyttudjór ella stuttleikadjór.

Tá ið fólk hava djór, hava tey samstundis ræði á øllum lívsskeiði djórsins, og djórið er bundið at teirri røkt og umsorgan, sum fólk gevur tí. Djór, sum verða hildin, eru ikki fræls, og natúrliga atferðin, sum djórini høvdu havt í náttúruni, er skerd. Vinnuligt djórahald kann

neyvan rekast, uttan at hetta verður góðtikið, men greiða fatanin er, at almenningurin yvirhøvur góðtekur hesar fortreytir, tá ið talan er um vinnuligt djórahald. Við hesi lóg verður størri dentur lagdur á bæði vegleiðing um djór og djórahald, eins og eftirlitið verður betri. Av tí at lógin eisini heimilar eftirliti við vinnuligum djórahaldi, gevur hon myndugleikunum betri møguleikar at vegleiða og mæla til broytingar, uttan at inntrivið verður ov stórt.

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, ið varðar av djóraverndarlóggávuni, avgjørdi á vári 2016 at seta ein bólk at endurskoða djóraverndarlógina. Arbeiðsbólkurin var mannaður við umboðum frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Heilsufrøðiligu starvsstovuni og landsdjóralæknaembætinum. Í tilgongdini at endurskoða lógina hevur arbeiðsbólkurin havt fundir við tey feløg, áhugabólkar og stovnar, sum á einhvønn hátt hava áhuga í málinum. Hesir hoyringarpartar hava havt høvi at gera viðmerkingar til uppskotið, áðrenn tað varð sent til almenna hoyring, eins og partarnir hava havt høvi at lata Uttanríkis- og vinnumálaráðnum viðmerkingar í sambandi við ta almennu hoyringina. Víst verður til hjáløgdu hoyringsskriv og upprit um innkomnar viðmerkingar. [Uppritið verður skrivað, tá ið almenna hoyringin er av]

Arbeiðsbólkurin hevur hugt at ymiskari djóraverndar- og djóravælferðarlóggávu, men avgjørdi skjótt at brúka ta norsku djóravælferðarlógina (Lov om dyrevelferd) frá 2009 sum høvuðsgrundarlag undir arbeiðinum við nýggju djóravælferðarlógini. Norska lógin er grundað á *Stortingsmelding nr. 12 (2002-2003) om dyrehold og dyrevelferd*, sum er ein rúgvumikil frágreiðing, ið norska stjórnin lat Stórtinginum.

Í lógaruppskotinum verður heitið *djóraverndarlógin* brúkt um løgtingslóg um vernd av dýrum frá 1985. Verður sipað til hetta lógaruppskot, verður heitið *djóravælferðarlógin* brúkt.

## 1.2. Galdandi lóggáva

Í 1985 kom í gildi løgtingslóg um vernd av dýrum (vanliga nevnd djóraverndarlógin). Djóraverndarlógin setti úr gildi ta donsku djóraverndarlógina frá 1916, sum varð sett í gildi í Føroyum við fyriskipan frá 1919. Samstundis varð sett úr gildi § 196 í revsilógini, sum ásetti revsing fyri djórapínslu og -vanrøkt.

Djóraverndarlógin er fyri tað mesta í samsvari við tað lógaruppskot, sum varð sett fram í *Álit um dýraverndarlógina (1984.01)*, sum ein arbeiðsbólkur, settur av landsstýrinum, lat úr hondum í 1984. Lógaruppskotið bygdi í høvuðsheitum á ta donsku djóraverndarlógina frá 1950 (lóg nr. 256 frá 27. mai 1950 om værn af dyr), men var í ávísan mun lagað til føroysk viðurskifti. Lógin fevnir um tom dýr (allýst sum djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki) og vill dýr, men lógin viðger einamest tom dýr, og tá serliga stór nyttudýr (seyð, neyt og ross) og heimafugl (høsn, gæs og dunnur). Leggjast skal tó afturat, at vill dýr eru viðgjørd í aðrari lóggávu, t.d. í lógunum um fugla- og haruveiðu, grindalóggávuni og í fiskivinnulóggávuni.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

### *1.3.1. Alment um endamálið við uppskotinum*

Uppskot til løgtingslóg um djóravælferð hevur til endamáls at fremja djóravælferð, djóravernd og virðing fyri djórum, eins og lógin ásetur tær skyldur, sum eru galdandi í viðurskiftunum millum fólk og djór, bæði vill djór og djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki.

Uppskotið forðar ikki fyri, at fólk hava og brúka djór, men krøv verða sett til røkt, viðferð o.a. Økt vitan um djór og hugburðsbroytingar, sum koma av hesi vitan, fara at ávirka, hvussu lógin verður brúkt og tulkað, og hvussu lógarverkið sum frálíður verður broytt.

Í dag halda tey flestu, at tað sjálvandi skal bera til at hava og, sum part av at hava djór, eisini at avlíva djór. Samstundis verður hildið, at djór skulu ikki vera fyri tilvildarligari og óumhugsaðari avlíving, sum ikki hevur nakað endamál. Mest umráðandi er tó, at djórini verða hildin og viðfarin rætt, meðan tey eru á lívi, at djórini verða avlívað á rættan hátt so skjótt og pínuleyst sum til ber, og at endamálið við at hava djórið er nóg týðandi. Kortini kunnu ikki øll góð endamál heimila eina og hvørja nýtslu av djórum; talan er um eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri. At fólk hava og halda djór fyri at nøkta sín egna tørv kann hava við sær, at tørvurin hjá djórinum verður ikki nøktaður til fulnar, og tí skal metast um, hvørt endamálið við at hava djórið gongur fram um vælferðina hjá djórinum.

Við støði í viðkomandi gransking ber helst til at siga, at djór sansa og kenna til t.d. svongd, ótta, pínu, nøgdsemi, gleði og øði. Um djór fata pínu á sama hátt sum fólk hevur verið týðandi í spurninginum um tær moralsku skyldurnar, sum fólk hava mótvegis djórum. Pína er, sum aðrar kenslur, subjektiv, og kann tí ikki mátast beinleiðis, hvørki hjá fólkum ella djórum. Um hugt verður at nervabygnaðinum, virknaðinum av pínulinnandi heilivági, og teimum háttum, sum djór hava at sleppa sær undan støðum, sum fyrr hava elvt til pínu, er rímiligt at staðfesta, at í øllum førum geisladýr og t.d. høgguslokkar kenna pínu. Fyri geislaleys djór er støðan meira óviss, og kunnleiki vantar á økinum.

Higartil galdandi djóraverndarlóggáva, bæði í Føroyum og í øðrum evropeiskum londum, hevur lagt dent á, at djór skulu verjast móti skammfaring, vanrøkt og líðing. Sum úrslit av, at vitanin um djór er vorðin betri, og hugburðsbroytingar eru farnar fram í samfelagnum, hevur lóggávan lagt seg meira eftir at fremja djóravælferð og ikki bara at forða fyri líðingum. Av tí at endamálið verður broytt frá vernd til vælferð, verður skotið upp, at lógin verður nevnd løgtingslóg um djóravælferð. *Djóravælferð* er tikið frá enska hugtakinum *animal welfare*, og hugtakið leggur dent á endamálið at djór skulu hava tað gott og trívast. Hugtakið fevnir tó eisini um *djóravernd*, ið leggur størri dent á at verja móti skammfaring, vanrøkt og líðing.

Djóravælferð er eitt mát fyri, hvussu eitt djór trívist í umstøðunum, tað livir í. Djórið er í einari góðari vælferðarstøðu, um tað er frískt, trívist, er væl í holdum, er í tryggum umhvørvi, hevur møguleika at bera fram sín viðføddа atburð, og at tað ikki er fyri líðing av óunniligari støðu, t.d. pínu, ótta og neyð. Fyri at djóravælferðin skal vera nøktandi, er tørvur á sjúkufyribyrging, djóralæknaviðgerðarmøguleikum, hóskandi skýli ella lívd, røkt, føði, leiðslu og handfaring, humanari viðferð og humanari avlíving.

Við hesi broyting – frá vernd til vælferð – verður eisini staðfest, at djór hava eginvirði, sum ikki er treytað av tí virði, fíggjarligt ella á annan hátt, sum djór hava ella kunnu hava fyri fólk. Eginvirði í hesum høpi merkir eisini, at djór skulu viðfarast hóskandi og við virðing uttan mun til, um tey hava fíggjarligt virði ella annað virði fyri fólk.

*1.3.2. Aðrar almennar ásetingar*
Í § 1 í djóraverndarlógini er ásett, at djór skulu viðfarast forsvarliga og skulu ikki av vanrøkt, overving ella á annan hátt vera fyri óneyðugari líðing. Í § 2 er ásett, at tann, sum heldur djór, skal syrgja fyri, at djórini verða røkt nóg væl. Hesar ásetingar eru grundarlagið undir lógini og eru meginásetingarnar, sum verða brúktar, tá ið ítøkilig djóraverndarmál verða viðgjørd.

Skotið verður upp at broyta og víðka hesar ásetingar soleiðis, at almennar meginreglur um djóravælferð verða ásettar í hesum greinum fyri at gera greitt, at talan ikki bert er um djóravernd, men eisini um djóravælferð. Til tess at nágreina ta støðu og tey rættindi, sum djór hava í sjálvum sær, verður skotið upp at áseta, at djór hava eginvirði, sum ikki er treytað av tí virði, ið tey hava fyri fólk, annaðhvørt sum nyttudjór ella stuttleikadjór. Afturat tí verður nágreinað, at fólk hava skyldu til at fara væl við djórum, at fólk hava skyldu til at ansa eftir, at djór ikki eru fyri óneyðugum líðingum ella óneyðugari strongd, og at fyrilit verður havt fyri kropsliga og sálarliga tørvinum hjá einstaka djórinum.

Um orðingina *óneyðuga líðing* skal serliga viðmerkjast, at tað er trupult at verja djór móti øllum líðingum. Avgerandi er tó, at tað, alt tað ber til, verður forðað fyri, at djór eru fyri *óneyðugum* líðingum. Tað er tó ein sannroynd, at ávísar líðingar eru natúrligar í einum djóralívi. Í slíkum førum skal dentur leggjast á, um fólk eru orsøkin til hesar líðingar, hvat endamálið er við at lata djór vera fyri hesum líðingum, og um gerðin er alment góðtikin. Tískil verður skotið upp, at orðið *óneyðugt* verður varðveitt í lógargreinini.

Djóravælferðarlógin ásetur eitt rættarligt mát fyri, hvussu viðurskiftini skulu vera millum fólk og djór. Galdandi rættarstøða, tá ið talan er um, hvørji djór, ið eru fevnd ella skulu verða fevnd av lógini, eigur at vera greið fyri øllum, og tí nevnir lógarteksturin beinleiðis tey djór, ið eru fevnd av lógini. Djórini eru nevnd við høvuðsslagi (species), og fyrivarni er tikið fyri djórum, sum ikki eru nevnd, men sum kortini eru í varðveitslu hjá fólki. Lógin fevnir eisini um ymisk menningarstig av djórunum, sum eru nevnd, um sansingargøgnini samsvara við menningarstigið hjá livandi (føddum) djórum.

Samanumtikið kann sigast, at hetta lógaruppskotið hevur til endamáls at áseta reglur um, hvussu fólk skulu fara við djórum soleiðis, at djórini eru vard. Djórini fáa tó ikki onnur rættindi enn hetta, eins og henda lógin ikki hevur beinleiðis virknað fyri støðu djóranna eftir aðrari lóggávu. Djór fáa ikki egin løgfrøðilig rættindi.

*1.3.3. Hjálparskylda*
Sambært § 13 í djóraverndarlógini skal ein og hvør, sum kemur fram á sjúkt ella skatt djór, eftir førimuni hjálpa djórinum.

Henda áseting er tikin við í hetta lógaruppskot, men verður í lógaruppskotinum víðkað soleiðis, at annaðhvørt eigarin ella politiið skal hava boð, um talan er um djór, sum eru partur av einum djórahaldi, t.d. seyður í einum fylgi, og um tann, sum kemur fram á djórið, ikki kann veita djórinum nóg góða hjálp.

Er tað so, at djórið ikki kann bjargast, kann tann, ið kemur fram á djórið, avlíva tað á staðnum, um hetta er neyðugt fyri at forða fyri, at djórið er fyri óneyðugari líðing. Í

útgangsstøði skal djór frá djórahaldi ikki avlívast, um tað ber til at fáa fatur á eigaranum ella politinum innan fyri rímiliga tíð, men er greitt, at djórið ikki kann verða bjargað, kann tað kortini avlívast beinanvegin. Hjálparskyldan hjá tí einstaka merkir í slíkum førum, at hann skal hjálpa djórinum eftir førimuni, men greitt er, at tað kann vera trupult hjá leikfólki at meta um, hvørt djórið kann hjálpast ella um djórið skal avlívast. Kortini er umráðandi at staðfesta, at fólk skulu ikki gera nakað, sum tey ikki eru før fyri at gera á tryggan hátt.

Í onkrum førum kunnu djór tørva hjálp, hóast tey ikki eru eyðsýniliga sjúk ella skadd. Tað kann vera trupult at gera av, um djór eru sjúk ella skadd, og tað er tí altíð meting hins einstaka, sum ger av, um hjálparskyldan er lokin. Ein og hvør eigur í størst møguligan mun at hjálpa djórum, um illgruni er um, at tey eru sjúk ella skadd, men av tí at hetta er ein trupul meting fyri tann einstaka, verður mett, at hjálparskyldan í slíkum førum ikki eigur at verða ásett sum ein sjálvstøðug skylda eftir lógini, ið verður revsað, verður hon ikki lokin.

Um tann einstaki ikki fær hjálpt ella ikki kann veita nóg góða hjálp, skal viðkomandi skjótast gjørligt boða annaðhvørt eigaranum ella politinum frá.

Í hesi grein er ikki ásett, at djórið, um tí ikki býðst bøtur, skal verða avlívað. Hetta er grundað á, at tað eru ikki øll, ið eru før fyri at avlíva djór á rættan hátt. Í aðrari lógargrein er ásett, at djórið skal ikki vera fyri óneyðugari líðing, og er tað so, at tann, sum kemur fram á djórið, hevur førleika at avlíva djórið, kann djórið verða avlívað, um einki annað er at gera. Sum meginregla er galdandi, at djór, sum ivaleyst eru í varðveitslu hjá fólki, t.d. seyður, ikki skulu verða avlívað, fyrr enn eigarin ella politiið hevur fingið boð. Kortini er loyvt at avlíva djór í djórahaldi, um greitt er, er djórinum ikki býðst bøtur, og um tann, sum kemur fram á djórið, hevur førleika at avlíva djórið. Havast skal í huga, at hjálparskyldan er alment galdandi, og at metast má um røttu hjálpina í hvørjum einstøkum føri.

Tann, sum hevur útreiðslur av at hjálpa, kann fáa útreiðslur sínar endurgoldnar frá landinum. Tann, sum av ósketni hevur elvt einum djóri skaða, kann eisini fáa útreiðslur sínar endurgoldnar. Hinvegin er galdandi, at tann, ið tilvitað ella av grovum ósketni hevur elvt djóri skaða, kann ikki fáa útreiðslurnar endurgoldnar frá landinum, hóast viðkomandi hevur havt útreiðslur av at hjálpa skadda djórinum.

Útreiðslurnar, sum landið hevur av hesum, kunnu krevjast endurgoldnar frá eigaranum ella tí, sum rekur vinnuliga djórahaldið, haðani djórið kemur. Endurgjaldsskylda landsins fevnir í fyrsta lagi bara um tær útreiðslur, sum standast av teirri hjálp, sum viðkomandi er førur fyri at veita. Talan er bara um beinleiðis útreiðslur, t.d. útreiðslurnar av at koma í samband við eigara, djóralækna ella politiið.

Til tess at avmarka útreiðslur landsins eftir hesi grein er neyðugt at áseta tær útreiðslur, sum kunnu verða endurgoldnar. Talan er fyrst og fremst um útreiðslur til einfaldar kanningar á staðnum og avlíving. Nærri reglur kunnu verða ásettar í kunngerð.

Ásetingarnar í ávikavist § 4 um hjálparskyldu og § 5 um fráboðan eru knýttar saman. Skyldan at hjálpa tekur seg upp, tá ið komið verður fram á sjúkt ella skatt djór. Fær onkur varhugan av, at djór eru fyri skammfaring ella vanrøkt, fær viðkomandi samstundis skyldu at boða frá

eftir § 5. Í slíkum førum verður tað politiið, sum skal taka málið upp. Er talan um listasjúku sambært løgtingslóg um djórasjúkur, skal landsdjóralæknin hava boð.

Hjálparskyldan tekur ikki við, tá ið talan er um fleiri vill djór, sum eru sjúk ella skadd, t.d. sjófuglur, ið er dálkaður við olju. Í slíkum førum er tað fráboðanarskyldan eftir § 5, sum tekur við. Avvarðandi myndugleikar skulu tá meta um, hvørt tiltøk skulu setast í verk.

Serliga ásetingin í § 13, stk. 2 í djóraverndarlógini, sum ásetur, at vegfarandi skulu hava fyrilit fyri djórum, ið eru á ella fram við vegi, verður varðveitt. Vegfarandi, sum elva djóri skaða, hava eins og frammanundan skyldu til eftir førimuni at veita djórinum hjálp.

*1.3.4. Fráboðanarskylda*

Í djóraverndarlógini er eingin áseting um, at avvarðandi myndugleikar skulu hava boð, um djór eru fyri vanrøkt. Skotið verður tí upp at áseta fráboðanarskyldu soleiðis, at viðkomandi myndugleikar kunnu koma upp í málið, áðrenn talan gerst um álvarsliga vanrøkt. Fráboðanarskyldan tekur við, tá ið hildið verður, at djór verða skammfarin ella eru fyri vanrøkt á annan hátt, t.d. av vantandi fóðri ella røkt.

Skotið verður upp, at henda fráboðanarskylda er galdandi við teimum avmarkingum, sum eru ásettar í aðrari lóggávu, og fráboðanarskyldan gongur tí ikki fram um aðra lógarásetta tagnarskyldu.

Ein fráboðan um, at djór eru fyri skammfaring ella vanrøkt, kann hava við sær, at tann, sum hevur ábyrgdina av djórinum, verður ákærdur fyri brot á lógina. Um tey, ið eru nær skyld við tann ákærda, fáa skyldu at boða frá slíkum viðurskiftum, hevur tað við sær, at tey óbeinleiðis gerast partur av revsimálinum móti einum, ið stendur teimum nær. Hetta er ikki í samsvari við meginregluna í § 171 í rættargangslógini, sum hevur til endamáls at verja hesi móti tyngdini av at vitna, og á tann hátt vera við til, at tann ákærdi verður revsaður.

Endamálið við fráboðanarskylduni er at forða fyri ella støðga líðingum hjá djórum. Hetta er eitt týðandi endamál, men hildið verður, at fyrilitið fyri teimum, ið standa tí ákærda nær, er meira týðandi. Tískil hava nærstandandi ikki skyldu at vitna í slíkum málum, sbr. tað, sum á sama hátt er galdandi eftir revsirættarligu meginreglunum.

Fráboðanarskyldan hevur til endamáls at forða fyri, at djór, ið eru í varðveitslu hjá fólki, koma illa fyri. Endamálið er ikki, at almenningurin skal hava skyldu at boða frá viðurskiftum, sum eru minni týðandi. Hetta forðar ikki fyri, at einstaklingar, hvussu álvarsom viðurskiftini enn eru, kunnu seta seg í samband við viðkomandi myndugleikar fyri at boða frá møguligum lógarbrotum. Myndugleikin metir um, hvussu fráboðanin skal handfarast.

Fráboðanarskyldan í § 5 og hjálparskyldan í § 4 hanga saman, men hjálparskyldan áleggur ikki einstaklingum skyldu at hjálpa, um talan er um fleiri vill djór. Í staðin áleggur fráboðanarskyldan fólki skyldu at boða myndugleikunum frá, um talan er um vill djór ella útiløgudjór, sum eru sjúk ella skadd ella á annan hátt illa fyri, sbr. § 5, stk. 2. Oljudálking, sum dálkar villfugl, er dømi um hetta. Við støði í slíkum fráboðanum kann myndugleikin gera av, um tiltøk skulu setast í verk.

Fráboðanir til myndugleikarnar skulu handfarast sambært teimum reglum, ið annars eru galdandi fyri virksemið hjá almennum myndugleikum, t.e. serliga fyrisitingarlóg, løgtingslóg um alment innlit, løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum o.s.fr.

Tað er ikki revsivert at lata vera við at boða frá eftir § 5. Hetta er í fyrsta lagi grundað á, at trupult er at fáa greiðu á, hvør *ikki* hevur boðað frá. Í øðrum lagi er hetta grundað á, at verður revsing ásett fyri hetta undanlátið, verða privatpersónar revsaðir munandi harðari í sambandi við djóraverndarmál enn fyri onnur mál.

Fráboðanarskyldan er fyrst og fremst ein staðilig áheitan á fólk um at boða frá, soleiðis at myndugleikarnir kunnu taka sær av djórum, sum eru fyri skammfaring ella vanrøkt.

*1.3.5. Heilivágsviðgerð og skurðviðgerð*

Í §§ 9-12 í djóraverndarlógini eru ásettar reglur um heilivágsviðgerð og skurðviðgerð. Bara djóralæknar kunnu skurðviðgera og veita aðra heilivágsviðgerð, tó so, at onnur enn djóralæknar kunnu gera ávís inntriv, um loyvi er fingið frá landsdjóralæknanum frammanundan. Tað er bannað øðrum enn djóralæknum at gelda djór uttan so, at hetta av onkrari serligari orsøk er neyðugt. Tað er somuleiðis bannað at kuta hala ella oyru, er tað ikki heilsuliga neyðugt, at svíða ull á djórum og at benda horn á seyði við nakkaspenni. Eisini onnur líknandi inntriv eru bannað eftir djóraverndarlógini, tó so at loyvt er at avhorna djór, um tað er neyðugt.

Skotin verður upp ein meira yvirskipað áseting enn tann, sum er ásett í djóraverndarlógini. Eins og frammanundan eru tað í útgangsstøði bara djóralæknar, sum kunnu seta djór í viðgerð ella skurðviðgera djór. Víst verður annars til løgtingslóg um djóralæknavirksemi. Sum meginregla er tað nú eitt krav, at skurðviðgerðin skal vera neyðug av heilsuligum ávum. Tað er tó framvegis loyvt at marka seyð.

Skotið verður upp at áseta serligar reglur um at gelda, beinskerja og avhorna djór. Hesi inntriv eru loyvd, tá ið tað er neyðugt í mun til djóravælferð ella onnur serlig viðurskifti. Vísast kann eisini á, at líknandi áseting er í ES-konventiónini um at verja kelidýr, sbr. art. 10. Har er ásett, at loyvt er at skurðviðgera frísk djór, um tað er veterinermedisinskt neyðugt, ella um tað er ein fyrimunur fyri ítøkiliga djórið.

Somuleiðis verður ásett, at skurðviðgerðir ella aðrar pínufullar viðgerðir bara kunnu gerast við hóskandi doyving og við pínuviðgerð. Gerast skal tó vart við, at henda áseting hevur samband við tær reglur, sum galda fyri djóralæknar og onnur djóraheilsustarvfólk, og at henda áseting ikki avmarkar tað virksemið, sum hesi hava rætt at útinna eftir viðkomandi lóggávu. Kravið um at brúka doyving ella pínuviðgerð er ein nágreining av ásetingini í § 9, stk. 1, 1. pkt. í djóraverndarlógini.

Tiltøk, sum hava til endamáls at stýra atferðini hjá djórum uttan at skurðviðgera ella brúka heilivág, verða skipað neyvari eftir ásetingunum um venjing, framsýning, undirhald og kappingar.

Tað verður ikki mett skynsamt at seta upp eitt kasuistiskt yvirlit yvir tey inntrivini, sum verða bannað. Tað er eftir lógaruppskotinum ein treyt, at skurðviðgerðir og aðrar heilivágsviðgerðir skulu verða framdar í samsvari við góða djóravælferð, eins og tær skulu hava til endamáls at tryggja virkisføri og lívsgóðsku hjá djórinum.

At djór verða merkt hevur viðhvørt við sær, at djórini verða skurðviðgjørd ella at partur av kroppinum verður tikin burtur, og tí verður landsstýrismanninum heimilað at áseta undantøk frá meginregluni í serligum førum. Undantøkini verða ásett í kunngerð.

Ymiskar orsøkir kunnu vera fyri at gelda, beinskerja og avhorna djór. Orsøkirnar kunnu verða grundaðar á djóravælferðina hjá einstaka djórinum, vælferðina hjá djórafylginum, serlig viðurskifti í samlaða djórahaldinum ella onnur viðurskifti. Mett verður, at tað er rætt at loyva avhorning, beinskerjing og gelding, tá ið tað í mun til djóravælferð ella annað er neyðugt. Í heimildarásetingini verður skotið upp at staðfesta, at nærri treytir kunnu verða ásettar í kunngerð.

*1.3.6. At merkja og marka djór*

Sambært § 13 í hagalógini (Lov nr. 172 for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift m.m. frá 1937) hava bøndur og onnur, sum hava seyð, skyldu at marka seyðin við hagamarki og kenningarmarki. Hetta er einamest ásett fyri at tryggja ognarrættin, og tað er neyðugt at marka við nærlagni soleiðis, at markið er sjónligt og lætt at kenna. Seyðamørkini eru gomul og staðbundin, og eru nærum einki broytt gjøgnum tíðina. Tó er farið burtur frá onkrum seyðamarki, tí hildið hevur verið, at tað fer ov illa við oyranum. Tað er bóndin ella røktingarmaðurin, sum hevur ábyrgdina av at marka seyðin, og tað er ikki ein og hvør, ið kann marka seyðin. Seyðurin verður vanliga markaður við felliknívi, men fleiri eru eisini farin at nýta serligan saks, sum hevur stutt bit, einar 2 cm ella so til longdar. Við saksi er lættari at gera týðiligt mark, men pínan man vera nakað tann sama sum við felliknívi. Ongar formligar reglur eru um, hvussu seyðurin, í mun til djóravælferð, eigur at verða markaður.

Tað eru heldur ongar formligar reglur um at merkja onnur djór. Neyt verða merkt við klipsi í oyra, og ross verða merkt við flís (chip), um tey yvirhøvur verða merkt. Verður djór merkt við flís undir húðina, skal merkingin gerast av djóralækna. Annars er tað ikki eitt krav, at djóralækni skal marka og merkja djór, hóast talan er um eitt inntriv, sum er fevnt av hugtakinum *skurðviðgerð* í hesi lóg.

Ásetingin um at merkja og marka djór hongur saman við ásetingini um skurðviðgerð og aðra heilivágsviðgerð og ásetingini um at brúka djór í royndum og undirvísing. Mett verður, at tað er umráðandi at áseta greiðar reglur um merking. Siðbundin merking av seyði, neyti, rossi og gás er eisini fevnd av hesum reglum. Neyvaru reglurnar verða ásettar í kunngerð. Tá ið djór verða merkt, er umráðandi, at merkingarhátturin er so varligur sum gjørligt, men ásannast má, at nærum øll merking hevur ávísa pínu við sær. Tað slepst illa undan, at djórið kennir nakað av pínu, men fyri at tryggja, at mest møguligt samsvar er millum meginásetingina í § 3 og ásetingina um merking í § 7, líkist orðaljóðið í greinunum báðum.

*1.3.7. Flutningur*
Djóraverndarlógin hevur ongar serstakar ásetingar um, hvussu djór kunnu flytast. Slíkar reglur eru ásettar í kunngerð, givin við heimild § 17 í lógini.

Hildið verður, at tað er rættast at áseta reglur um flutning av djórum beinleiðis í lógina. Ásett verður, at djór skulu flytast soleiðis, at tey verða nervað sum minst. Nágreinað verður eisini, at djór einans kunnu flytast, um tey eru før fyri at verða flutt allan vegin, og at flutningseindin, tá ið ræður um trygd og eyðkenni djóranna, skal vera egnað at flyta djórini. Somuleiðis verður ásett, at djórini skulu vera undir eftirliti og fáa neyðuga røkt, meðan tey verða flutt. Til tess at tryggja, at fyrilit verður havt fyri ymsu djórasløgunum og einstøku djórunum verður mett rættast, at nærri reglur verða ásettar í kunngerð, og at lógin sjálv ásetur tær yvirskipaðu reglurnar.

*1.3.8. Avlíving*
Í djóraverndarlógini eru ásettar reglur um avlíving í § 9. Ásett er, at djórið skal drepast so skjótt og so pínuleyst sum gjørligt. Beinleiðis krav um doyving er ikki, men – við støði í meginregluni í § 1 um, at djór skulu viðfarast forsvarliga, og at tey ikki mugu vera fyri óneyðugari líðing – er galdandi, at djórið skal doyvast, áðrenn tað verður dripið. Hetta er tó ikki galdandi, um djórið missir vitið beinanvegin.

Ásetingin, sum verður skotin upp, er framhald av hesi siðvenju og nágreinar, hvussu djór skulu verða avlívað. Afturat hesum er forboð sett fyri at avlíva djór sum part av undirhaldi ella kapping. Hetta seinasta er grundað á endamál lógarinnar um at virða djórini. Neyðugt er ikki at hava serliga orsøk at avlíva djór. Lógin hevur til endamáls at tryggja, at djór hava tað gott, meðan tey eru á lívi, og at tey verða avlívað á hóskandi hátt. Tó at tað ikki er neyðugt at hava serliga orsøk fyri at avlíva, og fyri at fremja virðingina fyri djórum, verður kortini ásett, at loyvt er ikki at avlíva djór, um hetta er partur av undirhaldi ella kapping.

Ásett verður, at djór í sambandi við avlíving skulu handfarast soleiðis, at tað er djóravælferðarliga hóskandi. Endamálið er, at avlívingin skal gerast við minst møguligari strongd og pínu fyri djórið, men fyrilit eigur eisini at vera havt fyri tí, sum í royndum letur seg gera. Tá ið talan er um villan fugl, villan fisk og súgdjór, sum liva í náttúruni, t.d. haru og grind, verður hildið, at fiski- og avlívingarhættir, sum verða brúktir í dag, eru í samsvari við ta lóggávu, sum verður skotin upp.

Í djóraverndarlógini eru ikki ásett krøv um, at djór skulu doyvast, áðrenn tey verða avlívað; tó er, sum nevnt, heimilað landsstýrinum at áseta reglur fyri avlíving. Hetta verður nú broytt. Somuleiðis verður greidliga ásett, at kravið um doyving ikki er galdandi, um djórið missir vitið, í sama viðbragdi, tað verður avlívað. At doyvingarhátturin í sjálvum sær skal vera hóskandi í mun til djóravælferð sæst í § 9, stk. 1, 1. pkt. Í greinini er harumframt ásett, at doyvingarhátturin skal hava ta ávirkan á djórið, at djórið ikki kennir pínu, og at djórið er uttan vit áðrenn avlívingin byrjar, og til djórið doyr. Avlíving uttan doyving hevur við sær stóra líðing fyri djór, og hetta hevur leingi verið hildið at vera óhoskandi í mun til djóravælferð. Hildið verður, at djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki, einans eiga at verða avlívað, tá ið tey eru uttan vit, og uttan at tey kenna pínu. Til tess at tryggja hetta er neyðugt at krevja, at djór verða doyvd, og at doyvingin hevur virknað fyri at avlívingin byrjar, og til djórið er deytt.

Fyri kettlingar og hundahvølpar, ið eru upp til átta dagar gamlir, verður galdandi, at tey kunnu avlívast við at sláa høvdið (pannuna ella nakkan) so mikið hart í, at skallin brotnar og djórið missir vitið og doyr beinanvegin.

Sambært Evropeiska Mannarættindasáttmálanum hevur ein og hvør rætt til at útinna sína trúgv. Hetta hevur m.a. við sær rættin til mat, sum lýkur serlig krøv. Avmarkingar í trúarfrælsinum eru bara loyvdar, um tær eru neyðugar í einum fólkaræðisligum samfelagi og grundaðar á fyrilitini, sum eru nevnd í grein 9 í mannarættindasáttmálanum. Sambært uppskotinum verður kravt, at djór skulu doyvast, áðrenn tey verða avlívað. Hetta verður hildið at vera í samsvari við mannarættindasáttmálan. Henda fatan er grundað á, at tað er í lagi at krevja, at djór verða doyvd, áðrenn tey verða avlívað, um tað samstundis ber til at innflyta kjøt og kjøtúrdráttir frá hesum djórum. Í hesum sambandi kann vísast á dómin í málinum *Cha're Shalom ve Tsedek vs Fraklandi*, har tað í dómsúrskurðinum frá 27. juni 2000 stendur, at í tann mun trúarbólkar hava møguleika at fáa hendur á mati, sum lýkur serligu krøvini, er rættur teirra til trúarfrælsi tryggjaður. Henda lóg forðar ikki fyri innflutningi av mati frá djórum, ið eru avlívað uttan doyving, og slíkur matur er tøkur á altjóða marknaðinum. Við støði í hesum verður mett, at forboðið móti avlíving uttan doyving ikki er í stríð við rættin til trúarfrælsi.

Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta reglur um m.a. útgerð og handfaring, tá ið djór verða avlívað, eins og landsstýrismaðurin kann gera undantøk frá kravinum um doyving.

*1.3.9. Royndir, undirvísing og medisinskt virksemi*
Djóraverndarlógin hevur ongar ásetingar um royndir, undirvísing og medisinskt virksemi.

Skotið verður upp at áseta, at loyvi krevst fyri at brúka djór til royndir, undirvísing og medisinskt virksemi. Ásetingin er grundað á, at fyrilit skal havast fyri djórinum, og at greiðar reglur skulu galda, um djór skulu brúkast til royndir, undirvísing ella medisinskt virksemi. Mett verður tó, at tað í ávísum førum er rætt at brúka djór til royndir, og at hetta í sjálvum sær kann hava negativar avleiðingar fyri djórini. Tí er umráðandi, at djór hava best møguligar treytir, tá ið tey verða brúkt til royndir. Ásetingin fevnir eisini um djór í medisinskum virksemi, m.a. transgen djór (t.e. djór, sum eru ílegutillagað), at klona djór, og at brúka klonað djór at menna ella framleiða heilivág ella aðrar evnafrøðiligar úrdráttir, ella fyri at framleiða livandi kyknur, vevnað og gøgn. Til tess at tryggja, at tað altíð ber til at fáa eina fullfíggjaða mynd av støðuni, tá ið talan er um djór, sum verða brúkt til royndir, eru øll djór, sum verða nýtt til royndir, fevnd av ásetingini. Hetta fevnir eisini um djór, sum verða ald ella havd við tí endamáli at fáa gøgn og vevnað til gransking, undirvísing ella medisinskt virksemi.

Tað eru ikki allar merkingar av villum djórum, ið verða roknaðar sum royndir eftir hesi grein. Sum dømi kann nevnast hvalur, ið verður merktur við sendara fyri eitt nú at staðfesta ferðamynstur. Støða verður tikin í hvørjum einstøkum føri, og metast skal um endamálið við merkingini og í hvønn mun, merkingin ávirkar djórið. Víst verður annars til ásetingina um at merkja djór og viðmerkingarnar til somu grein.

Djór, sum verða brúkt til royndir, verða í summum førum ávirkað og nervað. Umráðandi er, at henda ávirkan ikki er størri enn tað, sum er neyðugt. Metast má tí í hvørjum einstøkum føri um, hvørt tær negativu avleiðingarnar fyri djórið eru størri enn tað nyttuvirðið, sum samfelagið fær av royndunum. Henda meting er grundarlagið undir avgerðini um, hvørt loyvi verður givið ella ikki.

Landsstýrismanninum verður heimilað at gera undantak frá hesi áseting.

*1.3.10. Serlig forboð*

Djóraverndarlógin bannar beinleiðis harðskapi móti djórum og gerðum, sum eru at meta sum harðskapur. M.a. er bannað at sláa djór við lutum, sum elva djórinum ábrek ella pínu, at svíða ullina av djórum, at benda horn við nakkaspenni, at skjóta kóp við høglum og at nýta onnur livandi geisladjór enn fisk til agn. Djóraverndarlógin bannar – undirskilt – kynsligum brúki av djórum, men bara um hetta hevur við sær vanda fyri líðing fyri djórið. Tað kann tó vera trupult – við nóg neyvari vissu – at prógva, at djórið hevur verið í vanda fyri líðing. Hevur djórið ikki verið í vanda fyri líðing, er kynsliga brúkið ikki ólógligt eftir djóraverndarlógini. Kynsligt brúk av djórum er ikki fevnt av revsilógini í sjálvum sær, men kynsligt brúk av djórum hjá øðrum kann vera fevnt av revsilógarinnar ásetingum um herverk og brúksstuldur.

Er ikki lógarheimild at revsa ávísa gerð, ber ikki til at revsa gerðina. At ein gerð verður mett atfinngarsom ella revsiverd er ikki nóg mikið til at revsa gerðina, er gerðin ikki bannað við lóg. Hóast fleiri av gerðunum, ið eru nevndar ítøkiligt í ásetingini, metast at vera fevndar av almennu ásetingini í § 3, verður hildið, at tað er neyðugt við greiðum forboði soleiðis, at eingin ivi er um, at hesar gerðir eru revsiverdar.

Mett verður rættast at banna kynsligum sambandi millum fólk og djór, eins og onnur kynslig nýtsla av djórum er bannað, um henda nýtsla kann hava við sær skaða ella líðing fyri djórið. Í hesum føri verður fyrilit havt fyri natúrligu atferð djóranna, og tað er ikki avgerandi, at djórið hevur fingið sjónligan kropsligan ella sálarligan skaða. Slíkt forboð er í samsvari við, hvussu fólk flesta halda, at djór eiga at verða viðfarin.

Í djóraverndarlógini eru fleiri nágreinilig forboð í sambandi við djór og djórahald. Nýggja lógin er meira yvirskipað, og hóast tað ikki er skrivað beinleiðis í lógartekstin, eru tað viðurskifti, sum eisini eftir nýggju lógini eru bannað. Ítøkiligu forboðini eru tí avmarkað til tær gerðir ella undanlát, sum eru serliga atfinningarsom. Er tað so, at viðurskifti koma fyri, sum ikki eru ítøkiliga bannað í lógini, og har tað ikki ber til at seta bann við heimild í øðrum lógarásetingum, gerst spurningurin um lógarbroyting viðkomandi. Hetta er grundað á eina meting um, at fyrilitið fyri legalitetsmeginregluni er so mikið týðandi, at tað ikki er rætt at áseta eina almenna heimild at seta bann fyri ávísum gerðum ella undanlátum, sum ikki eru nágreinað frammanundan.

*1.3.11. Bygningar, girðingar og aðrar smærri innrættingar*

Skotið verður upp, at bygningar, girðingar og aðrar smærri innrættingar skulu gerast soleiðis, at djórini ikki verða nervað óneyðugt. Ásetingin hevur við sær, at tann, sum eigur ella hevur ábyrgdina av bygningum, girðingum og øðrum smærri innrættingum, skal hava eftirlit við, at standurin er í lagi, og at djórini í mest møguligan mun eru vard móti skaða ella líðingum, t.d.

um vandi er fyri, at djórini sita føst ella verða læst inni. Ásetingin fevnir bara um nýggjar ella endurnýggjaðar bygningar, girðingar o.tíl., og kravt verður ikki, at verandi bygningar, girðingar o.tíl. skulu broytast uttan so, at umstøðurnar eru soleiðis háttaðar, at djórini eru fyri óneyðugari líðing ella trega.

Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur í kunngerð.

*1.3.12. Veiða og fiskiveiða*
Djóraverndarlógin hevur ikki serligar ásetingar um veiðu og fiskiveiðu. Galdandi lóggáva um fiskivinnu, fuglaveiðu, haruveiðu og grindarakstur hevur nærri ásetingar um hesi viðurskifti, og víst verður tí til ta lóggávuna.

Skotið verður upp at staðfesta eina meginreglu um, at øll veiða og fiskiveiða skal útinnast á ein hátt, sum er hóskandi í mun til djóravælferð. Endamálið er at byrgja fyri, at veiða og fiskiveiða verða útint á óhóskandi hátt. Mett verður rættast at viðgera djóravælferðina í mun til veiðu og fiskiveiðu, og at tað best kann gerast við at hava eina almenna meginreglu um hetta í djóravælferðarlógini.

Við jøvnum millumbilum eigur at verða mett um, hvørt veiðuhættir og –reiðskapur eru hóskandi í mun til djóravælferð, og slík viðurskifti eiga at verða skipað í kunngerð. Dentur verður tó lagdur á, at tað ikki ber til heilt at sleppa undan, at djór verða skadd í sambandi við veiðu ella fiskiveiðu; umráðandi er, at hesin vandi minkar sum mest. Tað er landsstýrismaðurin í fiskivinnnu- og landbúnaðarmálum, ið varðar av hesi lóggávu, og kunngerðarheimildin er tí hjá honum.

Hóast lóggáva, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og landbúnaðarmálum umsitur, hevur ásetingar, sum skulu gera sítt til, at veiða av villum djórum fer fram á hóskandi hátt, fevnir henda lóggáva ikki um øll vill djór. Tískil verður mett rættast, at djóravælferðarlógin staðfestir ta yvirskipaðu meginreglu, at øll veiða skal fara fram á hóskandi hátt. Tó at talan í ávísan mun kann gerast um dupultar ásetingar, verður ikki hildið vera rætt, at ávís djór als ikki eru fevnd av lóggávu um djóravælferð. Neyvari skipan av hesum viðurskiftum eigur at verða gjørd í samstarvi millum viðkomandi landsstýrismenn soleiðis, at tey, sum brúka lóggávuna, bara hava eitt regluverk at halda seg til, og soleiðs, at lógarverkið røkkur sínum endamáli.

*1.3.13. Vill djór*
Skotið verður upp at heimila landsstýrismanninum í fiskivinnu- og landbúnaðarmálum at áseta nærri reglur í kunngerð um at taka og handfara vill djór.

Yvirhøvur verður mett, at vill djór eiga ikki at verða tikin og hildin í fangilsi; kortini verður mett, at eitt alment galdandi forboð móti hesum er ov víðgongt, og tískil verður viðkomandi landsstýrismanni heimilað at áseta nærri reglur í kunngerð. Reglur, ásettar í hesi kunngerð, eiga í størst møguligan mun at vera í samsvari við tað yvirskipaða endamálið um djóravælferð í hesi lóg. Víst verður annars til viðmerkingarnar omanfyri um veiðu og fiskiveiðu.

*1.3.14. At sleppa djórum út í náttúruna*
Loyvt er ikki at sleppa djórum út í náttúruna, um tey ikki natúrliga hoyra heima í føroysku náttúruni, ella um orsøk er til at halda, at djórini eru ella kunnu vera natúrliga stovninum, øðrum djórastovnum ella plantulívinum at bága.

Sostatt mugu djór, sum ikki eru natúrliga heimahoyrandi í Føroyum, als ikki sleppast út í náttúruna. Bara djór, sum (eisini) eru at finna í náttúruni í Føroyum, kunnu sleppast út. Talan kann eitt nú vera um pisur, haruungar o.s.fr.

Loyvt er bara at sleppa djórum frá djórahaldi út í náttúruna, um roknast kann við, at djórini hava góðan møguleika at laga seg eftir umstøðunum. Talan kann t.d. vera um síl, sum verða ald við tí fyri eyga at sleppa teimum í vøtn, har fiskað verður (sleppingarsíl). Víst verður í hesum sambandi til alilóggávuna og djórasjúkulóggávuna.

Djór, sum verða sett út – t.e. bæði djór frá djórahaldi og vill djór, sum hava verið í varðveitslu hjá fólki – kunnu hava trupulleikar við at finna sær føði og at laga seg til nýggju umstøðurnar, og hesi viðurskifti eiga at verða havd í huga, tá ið djór verða sett út. Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur í kunngerð; í slíkari kunngerð eigur fyrilit at havast fyri aðrari lóggávu um vill djór.

*1.3.15. Djórahald*
Djóraverndarlógin hevur bara yvirskipaðar ásetingar um djórahald. Við heimild í djórasjúkulógini eru ásett forboð fyri innflutningi av eksotiskum djórum, eins og reglur eru ásettar um innflutning av øðrum djórum. Bannið fyri at innflyta eksotisk djór er grundað á, at slík djór kunnu laga seg til umhvørvið her á landi og gerast invasiv, eins og bannið er grundað á vandan fyri at innflyta djórasjúkur, sum ikki finnast í Føroyum í dag. Afturat hesum skal fyrilit eisini havast fyri náttúruvernd.

Skotið verður upp at áseta, at djór, sum verða hildin í einum djórahaldi, skulu kunna laga seg eftir djórahaldinum á ein hátt, sum er hóskandi í mun til djóravælferðina. Hetta merkir, at djórið bæði skal kunna laga seg til sjálvt djórahaldið, eins og djórið skal kunna laga til umhvørvið, sum tað verður hildið í. Talan er um umhvørvi, sum eftir lógini verður mett lógligt. Djórasløg, sum ikki eru før fyri at laga seg til djórahaldið og umhvørvið, tí tey eru av serligum djóraslagi, kunnu heldur ikki haldast sum húsdjór, hóast einstaklingar høvdu kunnað fingið tað at borið til. Djór, sum verða hildin í djórahaldi, eiga yvirhøvur at verða fødd í djórahaldi, og hesi djór eiga eisini at enda sítt lív í einum djórahaldi. Talan er um eina yvirskipaða áseting, sum verður nágreinað í kunngerðum. Slíkar kunngerðir kunnu bæði fevna um húsdjór, nyttudjór og stuttleikadjór ella kelidjór. Ásetingin er í útgangsstøði galdandi fyri øll djór, men greitt er, at tað ikki í øllum førum í royndum fer at bera til at lúka hetta krav.

Ein og hvør, sum hevur djór, hevur djórahald og er á tann hátt fevndur av teimum reglum, sum eftir hesum uppskoti galda fyri djórahald.

At umhvørvið er egnað til endamálið er avgerandi fyri bæði vælferð og heilsu djóranna. Nevnast kunnu t.d. fjósumstøðurnar, tá ið talan er um mjólkneyt, ella vatngóðskuna, tá ið

talan er um alifisk. At djór skulu vera í einum umhvørvi, sum er egnað til endamálið, merkir eisini, at djór, eru tey úti, skulu hava møguleika fyri at søkja sær skjól, t.d. í einum bóli.

Málið er, at djórini skulu hava tað gott; tað er ikki nóg mikið, at tey ikki hava tað ringt. Eitt gott og egnað umhvørvi gevur djórinum møguleika at trívast, bæði kropsliga og sálarliga, og umhvørvi, sum avmarka henda trivnað, kunnu hava við sær vánaliga djóravælferð, ið sæst aftur í atferðini, t.d. við einstáttaðari atferð (stereotypi). Strongd og vantrivnaður kann koma fyri, um tað eru ov nógv djór á ov lítlum øki, ella um djórini eru einsamøll. Vælferðin er m.a. treytað av í hvønn mun, grundleggjandi tørvur er nøktaður, um djórið hevur møguleika fyri sosialari samveru, og um djórið hevur møguleika at eta á natúrligan hátt. Djór hava tørv á at verða stimbrað og at hava møguleika fyri at reagera upp á slíka stimbran, aloftast á ein hátt, ið er eyðkendur fyri djóraslagið. Umhvørvið skal hóska til sansingargøgnini hjá djórunum, tí djór kunnu sansa slíkt, ið fólk ikki kunnu.

Afturat tí er tryggleiki ein týðandi partur, tí órógv, ótti, angist og strongd kunnu hava við sær vánaliga vælferð. Støðugur ótti ella angist er óheppin og kann hava við sær støðuga strongd, ið síðani kann hava við sær psykosomatiskar sjúkur ella brek. Tryggleiki, eins og trivnaður, er eisini umráðandi fyri djórini, og er partur av endamálsorðingini. Hetta er grundað á altjóða reglur, ið hava djóratrivnað *(animal well-being)* sum aðalhugtak, sum fevnir um gleði og nøgdsemi.

Roknað verður við, at kunnnleikin um, hvussu djór uppliva sínar umstøður, alla tíðina økist. Hesin kunnleiki fer við tíðini at fáa týdning fyri tey ítøkiligu krøvini, sum verða tulkað inn í reglurnar um umstøðurnar, sum djór liva í, og sum tí kunnu ásetast í kunngerð.

*1.3.16. Krøv um skráseting ella loyvi*

Sambært § 18 í djóraverndarlógini krevst loyvi frá politinum til vinnuligan handil við djórum frá handli ella øðrum føstum sølustaði. Á sama hátt er ásett í § 7, at vill djór mugu ikki brúkast til sirkusframsýningar, varieté-sýningar og líknandi vinnu. Í aðramátar eru ikki serligar ásetingar um, at ítøkiligt loyvi krevst til ávíst virksemi.

Skotið verður tí upp at geva landsstýrismanninum eina generella heimild at áseta reglur um, at ávíst virksemi krevur serligt loyvi, ella at ávíst virksemi krevur serliga skráseting. Talan er um eina kunngerðarheimild, sum heimilar landsstýrismanninum at áseta reglur um stovnseting, staðseting, skipan og rakstur av virksemi, ið er fevnt av lógini. Somuleiðis verður landsstýrismanninum heimilað at áseta krøv um loyvi og afturkalling av loyvum, fráboðan, skráseting o.tíl. Mett verður, at slíkar reglur og slík krøv ikki eiga at verða ásett í lógini sjálvari, tí lógin ásetur yvirskipaðu meginreglurnar fyri djóravælferð og djóravernd.

*1.3.17. Vinnuligt djórahald*

Skotið verður upp at lata Heilsufrøðiligu starvsstovuna hava eftirlit við vinnuligum djórahaldi. Eftirlitið eftir hesi lóg fevnir um djóravælferð og djóravernd; eftirlitið við matvøruframleiðslu og umstøðum annars í sambandi við djórasjúku er heimilað í aðrari lóggávu.

Vinnuligt djórahald rekur tann, sum við fíggjarligum vinningi og sølu fyri eyga elur, hevur, gagnnýtir og selur djór ella djóraúrdráttir ella veitir tænastur beinleiðis ella um heil- ella smásølu til brúkaran ella til meirvirking við sølu fyri eyga. Hetta merkir, at tey, sum fáast við durasølu, eisini eru fevnd av hugtakinum *vinnuligt djórahald*. Tey, sum ala t.d. hundahvølpar við sølu fyri eyga, reka eisini vinnuligt djórahald. At fólk, sum hava kelidjór, lata øðrum avkom undan hesum kelidjórum, t.d. hvølpar ella kettlingar, fyri einki, verður ikki mett sum vinnuligt djórahald, og slík føri eru ikki fevnd av reglunum um vinnuligt djorahald. Einki niðara mark, t.d. tal av djórum ella inntøkumark, er sett fyri, nær talan er um vinnuligt djórahald, tí hetta eftirlitið er grundað á fyrilitið fyri djóravælferð og djóravernd. Eftirlitsmyndugleikin fær við hesum atgongd til at fremja eftirlit í mun til djóravælferð og djóravernd hjá privatum, t.e. teimum, ið ikki reka løggilt ella góðkent virksemi. Hóast talan er um eina inntrívandi heimild, t.e. heimildin at fara inn á privata ogn uttan rættarúrskurð, verður mett, at fyrilitið fyri vælferðini hjá djórum í hesum føri eigur at ganga fram um fyrilitið fyri einstaklinginum. Heimildin er bert galdandi fyri vinnuligt djórahald; eru umstøðurnar hjá øðrum djórum soleiðis háttaðar, at vandi er fyri vælferðini, verður málið – eins og frammanundan – at viðgera og avgreiða av politinum.

Eftirlitsmyndugleikin hevur heimild at seta neyðug tiltøk í verk, m.a. við boðum ella við at flyta djórini, men øll inntriv og tiltøk skulu vera í samsvari við meginásetingarnar í hesi lóg og mugu ikki vera meira inntrívandi enn neyðugt fyri at røkka endamáli lógarinnar.

Djóraverndarlógin hevur ongar ásetingar um, at viðkomandi myndugleikar hava rætt til at fremja eftirlit við djórum, ið eru fevnd av lógini. Eftir § 7, stk. 3 kann landsstýrið tó áseta nærri reglur um eftirlit við vinnu, sbr. § 7, stk. 1. Politiið hevur eisini møguleika fyri at gera ástaðarkanningar, um politiið er kunnað um, at djór eru skadd ella sjúk.

Skotið verður upp at áseta, at eftirlitsmyndugleikin hevur atgongd til støð, har vinnuligt djórahald verður rikið. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur frammanundan hesa atgongd við heimild í matvørulógini, men tá er eftirlitsvitjanin grundað á matvørufyrilit, og tað ber ikki til at nýta somu heimild, um endamálið er at staðfesta vælferðina hjá djórunum, sum eru partur av djórahaldinum. Tí verður mett rættast, at henda atgongd at fremja eftirlit eisini verður staðfest í djóravælferðarlógini. Ásett verður eisini, at tann, ið rekur vinnuliga djórahaldið, skal vera eftirlitsmyndugleikanum til hjálpar soleiðis, at til ber at fremja eitt virkið eftirlit. Dentur verður tó lagdur á, at tað ber ikki til at krevja víðari atgongd ella meira hjálp enn tað, sum er neyðugt fyri at fremja eftirlitið.

Sambært lógini hevur politiið skyldu at hjálpa eftirlitsmyndugleikanum um so er, at eftirlitsmyndugleikin metir tað vera neyðugt fyri at útinna eftirlitið. Mett verður ikki neyðugt at geva politinum óavmarkaða atgongd til støð, har vinnuligt djórahald verður rikið, ella har annað virksemi, ið er fevnt av lógini, fer fram. Sostatt er leikluturin hjá politinum, tá ið talan er um vinnuligt djórahald, avmarkaður til at veita eftirlitsmyndugleikanum neyðuga hjálp.

Nágreinað verður í ásetingini, at eftirlitsmyndugleikin hevur heimild at fremja *neyðugt eftirlit*. Fyrivarni skal havast fyri friði hins einstaka, og tað merkir, at hógv skal sýnast, um neyðugt er at fremja eftirlit í privatum heimum. Vanliga kann ein eftirlitsmyndugleiki ikki fara inn í privat heim uttan við samtykki frá tí, sum eigur ognina. Vinnuligt djórahald verður

vanliga ikki rikið frá privatum heimi, og eftirlit í privatum heimum kann tí bara gerast viðkomandi, um grund er at halda, at djór eru fyri líðing av teirri orsøk, at lógarásetingar ikki eru hildnar. Er ikki talan um eina beinleiðis neyðrættarstøðu, má eftirlitsmyndugleikin biðja um hjálp frá politinum, um ætlanin er at fara inn í privat heim uttan samtykki eigarans. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til § 32.

*1.3.18. Eftirlit og røkt*
Ásetingarnar um eftirlit og røkt, saman við ásetingunum um umhvørvi og livilíkindi annars hjá djórunum, skulu tryggja, at ansað verður eftir djórum í djórahaldi, og at tey fáa neyðuga røkt í einum hóskandi umhvørvi, har djórið hevur møguleika at trívast.

Góð djóraheilsa er umráðandi fyri góða djóravælferð, og tí er neyðugt við sjúkufyribyrging og góðari viðgerð av sjúkum og skaddum djórum. Við fyribyrging ber til at minka um vandan fyri sjúku, og tí verður skotið upp, at tað er ein skylda at avmarka smittu. Tann, ið hevur ábyrgdina av djórunum, skal syrgja fyri, at djórini eru undir neyðugum eftirliti og fáa neyðuga røkt, samstundis sum tey eru vard móti skaða, sjúku, sníkum og øðrum vandum.

Skotin verður upp ein almenn áseting um, at djórini skulu vera undir neyðugum eftirliti og fáa neyðuga røkt. Mett verður, at hetta er eitt grundleggjandi krav til alt djórahald. Henda áseting verður síðani útgreinað nakað, men neyvaru krøvini verða ásett í kunngerð. Kunngerðirnar verða bygdar á faklig og objektiv metingarstøði, sum hava týdning fyri vælferðina hjá djórum, og í hesum sambandi er eisini hugsandi, at landsstýrismaðurin leitar sær ráð hjá øðrum viðkomandi fakstovnum og -myndugleikum. Tá ið fólk hava djór, hava tey eisini eina serliga ábyrgd fyri trivnaði djóranna. Málið er, at djórini skulu hava tað gott; tað er ikki nóg mikið, at tey einans eru vard móti ymsum sløgum av líðingum.

*1.3.19. Førleikar og ábyrgd*
At fara væl við djórum krevur førleikar, men djóraverndarlógin hevur ongar ítøkiligar ásetingar um verkligar ella formligar førleikar hjá tí, sum rekur vinnuligt djórahald. Í aðrari lóggávu eru tó ásettar førleikareglur, t.d. í landbúnaðarlóggávuni og alilóggávuni.

Skotið verður upp at áseta, at tann, ið rekur vinnuligt djórahald, skal tryggja, at djór verða ansað av starvsfólki, ið hevur neyðugu førleikarnar. Talan er um realførleikar. Møgulig krøv um formligar førleikar verða at áseta í kunngerð. Tann, ið rekur vinnuligt djórahald, hevur stóra ábyrgd, og umráðandi er tí, at viðkomandi hevur neyðugan kunnleika um djórahald, og hvussu hetta skal rekast. Tað verða støðugt sett størri krøv um kunnleika um kropsliga og sálarliga tørv djóranna, tá ið djóravælferðin skal tryggjast. Talið av keli- og stuttleikadjórum økist eisini, og meira vitan og betri førleikar forða eisini fyri, at djór eru fyri skammfaring ella vanrøkt.

Mett verður, at størri dentur á førleikar fer at hava við sær, at djóravælferðin batnar. Djóraeigarar við neyðugum og góðum førleikum eru kanska týdningarmesta amboðið fyri at fáa góða djóravælferð, og ásetingin fer at hava við sær, at einstaki djóraeigarin í størri mun kann forða fyri vælferðartrupulleikum og taka neyðug stig, um djóravælferðin versnar.

Í djóraverndarmálum er ofta talan um fólk, ið hava heilsuligar ella sosialar trupulleikar. Hesi eru ikki altíð før fyri at taka sær av djórum á nøktandi hátt, hóast tey fegin vilja hava djór. Mett verður, at ynski um at hava djór skal ikki ganga fram um kravið um, at tey, sum hava djór, skulu hava neyðugar førleikar.

Djóravælferðar- og djóraverndarførleikin skal vera so mikið góður, at tann, sum vinnuliga rekur djórahald, til fulnar skilir endamálið við lógini, eins og viðkomandi til fulnar skal skilja einstøku ásetingarnar. Í kunngerðum, gjørdar við heimild í § 20, er tí umráðandi at lýsa økini væl, lýsa neyðugu førleikarnar væl og møguliga áseta reglur um, at tann, sum rekur vinnuligt djórahald, skal dagføra førleikarnar, er tað neyðugt. Í fleiri vinnugreinum eru frammanundan ásett førleikakrøv, og tær reglur, sum verða ásettar við heimild í hesi lógini, skulu samsvara við aðra viðkomandi lóggávu, ið er galdandi frammanundan.

Førleikakrøvini kunnu broytast við tíðini, men sum meginregla eru hollar royndir og realførleiki nóg mikið at lúka lógarinnar krøv. Hollar royndir eru tó ikki altíð nóg mikið at geva neyðugan kunnleika um djór, m.a. tí at vitan um tørv hjá djórum støðugt verður vísindaliga ment. Tí er neyðugt at meta um førleikakrøvini í hvørjum einstøkum føri, eins og neyðugt er at áseta alment galdandi krøv, so reglurnar eru greiðar frammanundan. Ymsar vinnur seta ymisk krøv, og tí krevur onkur vinna formligar førleikar, meðan aðrar vinnur krevja realførleikar.

Umráðandi er tó, at førleikakrøvini ikki verða ásett soleiðis, at tað gerst ov trupult hjá teimum, sum frammanundan reka vinnuligt djórahald, at halda fram, ella at reglurnar eru fyrisitingarliga tungar og kostnaðarmiklar.

Til tess at tryggja, at tey, sum ansa djórunum, hava neyðugar førleikar, verður ásett, at børn undir 16 ár ikki skulu hava sjálvstøðuga ábyrgd av djórum. Hetta er galdandi í arbeiðsviðurskiftum, og tað er tí leiðarin, sum hevur yvirskipaðu ábyrgdina av djórunum. Leiðarin hevur skyldu at fáa sær neyðuga førleikan og skal ansa eftir, at djórahaldið verður rikið í samsvari við lógina.

Skotið verður upp at áseta, at tann, ið rekur vinnuligt djórahald, skal ikki lata djór upp í hendurnar á fólki, um orsøk er til at halda, at tey ikki megna ella vilja fara væl við djórinum. Ásetingin er grundað á, at djór, sum verða brúkt í vinnuligum høpi, kunnu hava tørv á aðrari verju enn djór, sum eru familju- ella stuttleikadjór.

At enda verður heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um neyðugar førleikar. Mett verður rættast at áseta slíkar reglur í kunngerð, tí førleikakrøvini eru ymisk, alt eftir djóraslagi og vinnugrein.

*1.3.20. Rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir*

Djóraverndarlógin hevur einstakar sera ítøkiligar ásetingar um, hvussu djór kunnu verða tjóðrað, og hvussu t.d. horn á seyði kunnu verða bend. Serligar ásetingar eru um verpingarbúr, eins og meira almennar reglur um tilhaldsrúm eru í lógini. Djóraverndarlógin hevur nakrar fáar ásetingar um rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir, men eisini í hesum førum er talan um ítøkiligar ásetingar.

Skotið verður tí upp at heimila landsstýrismanninum at áseta nærri reglur í kunngerð soleiðis, at einstøku reglurnar verða lagaðar til einstaka djórið ella djóraslagið. Somuleiðis verður skotið upp, at tann, ið rekur vinnuligt djórahald, skal tryggja, at rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir eru egnað at røkka endamálinum um, at fyrilit skal havast fyri djóravælferð. Tað er altíð tann, sum rekur vinnuliga djórahaldið, sum hevur ábyrgdina av, at djórahaldið er í samsvari við lógina. Tann einstaki skal tryggja, at tað bara verða brúktir rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir, sum eru egnað til endamálið.

Afturat hesum fáa tey, sum framleiða og selja slíka útgerð o.tíl., eisini ábyrgd í mun til djóravælferð. Skotið verður somuleiðis upp, at nýggj útgerð og tøkniligar loysnir skulu vera royndar í verki, áðrenn tær kunnu seljast í fríari sølu. Mett verður, at tað kann gerast viðkomandi at ábyrgda tann, sum selur ella leigar út rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð ella tøkniligar loysnir, sum skulu brúkast til djór. Tí fáa tey, sum selja ella leiga út hesar vørur, medábyrgd fyri, at tað, sum selt verður, er egnað til endamálið, og at fyrilit verður havt fyri djoravælferðini. Fyri at marknaðarføra ella selja rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir, sum eru nýggj í føroyskum høpi, er umráðandi, at seljarin vissar seg um, at tað, sum selt verður, er egnað í mun til djóravælferð. Skotið verður tískil upp at geva seljaranum greiða ábyrgd fyri hesum.

Keyparin fer at kunna krevja neyðug skjalprógv fyri at vissa seg um, at vøran er lóglig at brúka. Krøvini til vavið á skjalprógvum kunnu vera ymisk, og tí verða ikki ásett ítøkilig krøv til sjálvt skjalprógvið. Hetta kann tó verða ásett í kunngerð, verður tað mett neyðugt.

*1.3.21. Upplýsingarskylda, skjalprógv o.a.*
Skotið verður upp at áleggja tí, ið rekur vinnuligt djórahald, og øðrum, ið hava skyldur eftir lógini, skyldu at lata upplýsingar og skjalprógv, sum eftirlitsmyndugleikin krevur. Henda áseting gevur eftirlitsmyndugleikanum heimild m.a. at krevja upplýsingar um, hvørt krøv, sum eru heimilað í lógini, ella krøv, ásett í kunngerð, givin við heimild í lógini, eru lokin.

Ásetingin er skotin upp til tess at veita eftirlitsmyndugleikanum møguleika at hava eftirlit við, at lógin verður hildin, og fyri at geva eftirlitsmyndugleikanum møguleika at skjalprógva møgulig brot á lógina.

*1.3.22. Djóraaling*
Talan er um nýggja áseting. Fyri at ala djór krevst, at djórini, sum verða brúkt til aling, eru væl fyri heilsuliga, bæði kropsliga og sálarliga. Øll djóraaling skal hava til endamáls at ala djór, sum hava góða heilsu og góðar virkismøguleikar og eginleikar annars. Umráðandi er at forða fyri, at ald verða djór, sum hava eginleikar, sum ikki eru í samsvari við meginreglurnar í hesi grein.

Ásetingin fevnir ikki bara um aling, men eisini um nøring. Hetta merkir, at tað eisini er bannað at lata djór nørast, um djórini hava óhepnar eginleikar.

Aling er ikki loyvd, um alingin hevur við sær almennar etiskar reaktiónir. Tað eru almennu myndugleikarnir, sum varða av hesi lóg, sum meta um, hvat hugtakið *almennar etiskar reaktiónir* ítøkiliga merkir. Tá ið støða skal takast til, um talan er um eina *almenna etiska*

*reaktión*, skal henda almenna fatanin viðgerast saman við eini fakligari meting av, um ítøkiliga gerðin er óheppin í mun til djóravælferð.

*1.3.23. Venjingar, framsýningar og kappingar*
Djóraverndarlógin ásetur, at loyvt er ikki at venja djór til framsýningar, sirkussýningar, filmsupptøkur o.tíl., um hetta elvir djórinum mein ella álvarsliga pínu. Afturat tí er ásett, at loyvt er ikki at brúka vill djór til framsýningar o.tíl.

Framsýningar, kappingar o.tíl. og venjingar til slík endamál kunnu ávirka djórini negativt, og tí verður hildið fast við galdandi forboð, t.e. forboð fyri slíkum virksemi, um tað elvir djórinum mein ella álvarsliga pínu. Yvirhøvur verður mett, at tað elvir villum djórum, ið ikki eru von við fólk, mein, um tey verða brúkt til framsýningar, kappingar o.tíl. Talan er um eina meira yvirskipaða áseting, og fyri at hava møguleika at áseta nærri reglur, tá ið tað verður viðkomandi, verður landsstýrismanninum heimilað at áseta nærri reglur í kunngerð.

Trupult er at eyðmerkja øll viðurskifti, sum hava týdning fyri djóravælferðina, tá ið talan er um venjingar, framsýningar, kappingar o.tíl. Í staðin eru ásettar almennar reglur um, hvussu slíkt virksemi skal útinnast.

Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at djór kunnu verða lúgvað, uttan at hetta í sjálvum sær er skaðiligt fyri djórið, men virksemi, sum hevur við sær, at djórið er so útlúgvað, at heilsuvandi er, er ikki loyvt. Er neyðugt er nágreina ásetingina, kann hetta gerast í kunngerð. Víst verður annars til serligu viðmerkingarnar.

Ásett verður eisini, at loyvt er ikki at brúka djór í bardaga móti øðrum djórum ella fólki, eins og tað ikki er loyvt at venja djór til hetta. Slík venjing kann ala fram ódliga atferð, og venjing, sum greitt hevur til endamáls at fremja hetta, er bannað. Víst verður í hesum sambandi til hundalógina, eins og víst verður til reglurnar um innflutning av hundum og kettum.

*1.3.24. Kæra*
Avgerðir, tiknar við heimild í hesi lóg, kunnu kærast til Vinnukærunevndina. Tað sama er galdandi fyri avgerðir, tiknar við heimild í reglum, sum eru givnar við heimild í hesi lóg.

*1.3.25. Gjøld*
Ásett verður, at landsstýrismaðurin í kunngerð kann áleggja gjald fyri at rinda kostnaðin av eftirliti og serligum tænastum. Reglurnar um gjald samsvara við tær meginreglur um gjøld, sum eru ásettar í aðrari líknandi lóggávu, serliga matvørulógini og djórasjúkulógini. Gjøldini skulu samsvara við veruliga kostnaðin av eftirlitinum ella tænastuni.

*1.3.26. Dátuskráir*
Heimilað verður Heilsufrøðiligu starvsstovuni at stovna dátuskrá ella knýta seg at verandi dátuskráum, um tað er neyðugt fyri at lúka endamál lógarinnar ella fyri at lúka treytir, ásettar í millumtjóðasáttmálum. Heilsufrøðiliga starvsstovan og landsdjóralæknin brúka í dag ymsar útlendskar dátuskráir, m.a. fyri at lúka treytirnar, sum eru galdandi eftir veterineravtaluni millum Føroyar og ES. Tær dátuskráirnar eru heimilaðar í aðrari lóggávu.

Dátuskráir eftir hesi áseting kunnu m.a. brúkast til at gera skrá yvir stuttleikadjór ella kelidjór. Heimild er bara at skráseta viðkvæmar persónsupplýsingar, sbr. løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, um viðkomandi hevur givið samtykki til tess.

*1.3.27. Revsiásetingar*
Djóravælferðarlógin verjir týðandi samfelagsáhugamál, og grundarlag er ikki fyri at fara burtur frá at revsa brot á hesa lóggávu.

Djóraverndarlógin ásetur í § 19 revsingina at vera sekt ella fongsulsrevsing í upp í 1 ár. Í ávísum førum kann revsingin verða hækkað til fongsul í upp í tvey ár. Mett verður, at hesar revsiásetingar eru nøktandi, og hildið verður tískil fast við hesa revsiáseting. Tá ið mett varð um, hvørt galdandi revsiáseting var hóskandi, varð dentur serliga lagdur á fyribyrgjandi virknaðin av revsingini, tí revsiásetingarnar skulu fyrst og fremst virka fyri, at lógin verður hildin. Um tað er hóttanin um revsing, sum forðar fyri lógarbrotum, er treytað av fleiri viðurskiftum, men í ávísan mun hevur revsingin fyribyrgjandi virknað, bæði alment og fyri einstaklingin. Eru tað meira persónlig viðurskifti, sum hava við sær, at djór eru fyri líðingum, er ikki vist, at hóttanin um revsing hevur nakran virknað. Er viðkomandi ikki førur fyri at taka sær av djórum, ber til at forða fyri endurtøkum á annan hátt, t.d. við dómi at taka rættin at hava djór frá viðkomandi, sbr. niðanfyri pkt. 1.3.28.

Hóast eitt brot sambært lógini er revsivert, kann revsingin, við støði í ítøkiligu umstøðunum í málinum og eftir eina ítøkiliga meting, vera ymisk fyri sambærilig brot.

Brot kunnu verða revsað við sekt ella við bæði sekt og fongsulsrevsing. Í flestu førum er revsing við sekt ein hóskandi revsing. Revsing fyri brot á lógina verður ásett sambært reglunum í 10. kapitli í revsilógini, har tað er tilskilað, at tá ið revsingin skal ásetast, skal havast fyrilit fyri, hvussu álvarsligt brotið er.

Eisini skal havast fyrilit fyri upplýsingum um lógbrótaran, eitt nú um persónlig og sosial viðurskifti, um viðurskifti hansara fyri og eftir gerðina og um orsøkina til, at brotið er framt. Harafturat skal, tá ið revsing verður ásett, havast fyrilit fyri, um brotið er framt við fíggjarligum vinningi ella sparing fyri eyga, uttan mun til um fíggjarligi vinningurin er fingin ella bert var tilætlaður, sbr. revsilógarinnar § 51, stk. 3, og § 80.

Revsiásetingin er býtt sundur í tveir partar; orsøkin til hetta sundurbýtið er m.a., at politiið fyri smærri lógarbrot skal hava møguleika at avgreiða málið við sektaruppskoti. Tá ið metast skal um, hvørt talan er um grovar ella serliga herðandi umstøður, skal dentur leggjast á tær avleiðingar, sum lógarbrotið hevur havt við sær, t.d. vavið á kropsligum ella sinnisligum skaða og pínu, og um lógarbrotið hevur staðið við í longri tíð ella er endurtikið. Dentur eigur eisini at leggjast á, um lógarbrotið er framt á serliga pínufullan hátt, og um lógarbrotið er framt tilvitað.

Í flestu førum er sekt ein hóskandi revsing fyri brot á lógina. Dentur skal leggjast á, hvussu revsivert brotið er, og revsingin skal eisini hava fyrilit fyri øðrum ásetingum í lógini, sum hava til endamáls at tryggja, at lógin verður hildin, t.d. eftirlit og boð. Mett verður, at tað í

flestu førum hevur størri virknað at brúka onnur amboð enn revsing. Revsingin er avmarkað til tilætlað brot ella brot, framd av grovum ósketni. Medvirkni verður revsað á sama hátt.

Trupult er at revsa fólk, sum ikki hjálpa øðrum fólkum, og ikki eru nógvar revsiásetingar um hetta. Tað sama er galdandi, tá ið umræður djór. Brot á ávikavist hjálparskylduna og fráboðanarskylduna verða tí ikki revsað.

*1.3.28. Forboð fyri virksemi, sum er fevnt av lógini*
Eftir § 20 í djóraverndarlógini kann rætturin gera av, at tey, sum eru dømd fyri skammfaring av djórum ella fyri djórapínslu, kunnu missa rættin at hava djór. Henda áseting verður varðveitt.

Talan er um eina sera inntrívandi áseting, og slíkar avgerðir eiga tí bara at verða tiknar, har tað er neyðugt til tess at forða fyri, at djór í framtíðini verða skammfarin ella á annan hátt fyri óneyðugum líðingum. Avgerðirnar skulu vera galdandi so leingi, sum neyðugt er fyri at røkka endamálinum.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Staðfest verður, at djór hava eginvirði, og at øll handfaring av djórum skal gerast við umsorgan og virðing fyri djórinum. Hetta merkir at hava fyrilit fyri natúrliga tørvinum hjá djórinum og at fyribyrgja sjúku, skaða og pínu.

Lógaruppskotið ásetur yvirskipaðar og almennar reglur um, hvussu farast skal við djórum. Samstundis er talan um eina heimildarlóg, sum gevur landsstýrismanninum heimild at áseta nærri reglur í kunngerð. Lógin ásetur, at fyrilit skal havast fyri góðari vælferð hjá djórum, bæði á landi og á sjógvi, eins og lógin ásetur, hvussu fólk skulu bera seg at móti djórum, bæði teimum, sum eru í varðveitslu hjá fólki, og villum djórum. Lógin ásetur sostatt tær yvirskipaðu reglurnar, og nærri reglur verða ásettar í kunngerð.

Fiskur hevur higartil ikki verið mettur at vera eitt sansandi djór. Kortini verður dentur lagdur á, at alifiskur er fevndur av hesi lóg og hevur krav upp á góða røkt og góðar umstøður annars, eins og djór á landi. Aling av fiski er skipað í alilóggávuni, og víst verður tískil eisini til ta lóggávuna.

Djóravælferðarlógin er grundað á hugburð, siðvenju, virði og normar í samfelagnum, samstundis sum lógin leggur stóran dent á nýggja fakliga vitan. Siðvenja og mentan kann tí ikki í sjálvum sær heimila, at ávísar gerðir eru loyvdar, um tær eru skilaleysar.

Yvirskipað ber til at siga, at farið verður frá eini verndarlóg til eina vælferðarlóg. Dentur verður lagdur á, at djór verða havd, hildin og brúkt á best møguligan hátt, og at umstøðurnar støðugt verða lagaðar til tørvin hjá djórunum. Henda broyting er grundað á, at kunnleikin um djór er broyttur, og at fólk í dag hava eina aðra fatan av djórum enn áður. Yvirhøvur vilja fólk, at tað verður farið væl við djórunum, og at lógarverkið lýsir hetta. Djór fáa tó ikki egin løgfrøðilig rættindi.

Talan er um eina yvirskipaða lóg, sum ásetur meginreglurnar fyri góða djóravælferð o.a. Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta neyvari reglur í kunngerð. Líknandi kunngerðir um djórahald o.tíl. eru frammanundan galdandi á onkrum økjum, m.a. tá ið talan er um vinnuligt djórahald, men hesar kunngerðir áseta heldur reglur um matvørutrygd og -handfaring og ikki um djóravælferð. Ongar reglur eru, sum áseta nærri treytir um djóravælferð, tá ið talan er um kelidjór ella stuttleikadjór, og hildið verður tí neyðugt at hava yvirskipaðar reglur um viðurskiftini hjá slíkum djórum.

Lógin er orðað soleiðis, at tað, sum er skrivað í dag, eisini skal kunnað verða tulkað eftir teimum etisku normum, sum møguliga seinni verða galdandi, og lógin fer á tann hátt at varðveita sítt tíðarbæri eitt longri tíðarskeið.

Eins og djóraverndarlógin er henda lóg eisini galdandi fyri vill djór. Landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og landbúnaðarmálum umsitur økið *vill djór*, men reglur um vill djór, sum verða givnar við heimild í aðrari lóggávu, skulu mest møguligt verða í samsvari við ásetingarnar í hesi lóg.

Umframt at farið verður frá eini djóraverndarlóg til eina djóravælferðarlóg, eru aðrar meginregluligar broytingar. Ein av hesum broytingum er, at lógin eisini fær gildi fyri onnur viðurskifti enn tey, har fólk hava beinleiðis ávirkan á djór, tí onnur viðurskifti, sum ávirka djóravælferð og virðing fyri djórum, eru nú partur av lógini.

Eins og í djóraverndarlógini er galdandi, at djór, sum líða, skulu fáa hjálp. Tí er umráðandi at varðveita galdandi reglu um, at øll hava skyldu at hjálpa hesum djórum. Tann, ið hevur ábyrgd av djórinum, hevur eina serliga skyldu, men eisini onnur, sum ikki hava serligt samband við djórið, varðveita skylduna at hjálpa djórinum eftir førimuni í ítøkiliga førinum. Aloftast er nóg mikið at boða eigaranum ella einum almennum myndugleika, t.d. politinum, landsdjóralæknanum ella Heilsufrøðiligu starvsstovuni frá. Galdandi skylda at boða rætta myndugleika frá, um talan er um djór, sum líða, verður varðveitt.

Loyvt er ikki at skurðviðgera ella taka burtur kropslutir á djórum, um tað ikki er heilsuliga grundað. Djóraeigara er tó framvegis loyvt at merkja djór, eins og djóraeigari kann beinskerja fugl, sum í mesta lagi er sjey dagar gamal. Djóralækna er eisini loyvt at gelda og avhorna, um tað er djóraheilsuliga neyðugt ella av øðrum orsøkum. Heimild er eisini at krevja, at djór verða merkt, og at hesi djór verða skrásett.

Djór skulu avlívast á hóskandi hátt og við hóskandi útgerð. Hetta er galdandi fyri øll djór, bæði djór í djórahaldi og vill djór. Nágreinað verður, at djór í djórahaldi skulu doyvast, áðrenn tey verða avlívað.

Ásettar verða reglur um djóraaling, eins og ásettar verða reglur um, hvussu djór kunnu brúkast til royndir, í undirvísing ella til medisinskt virksemi.

Kunnleiki er umráðandi, tá ið ræður um at fara væl við djórum, og kravt verður tí, at tey, sum hava djór ella reka vinnuligt djórahald, hava neyðugu førleikarnar. Rakstrarhættir og útgerð eiga at nerva djórini minst møguligt, og tí verður kravt, at rakstrarhættir, mannagongdir,

útgerð og tøkniligar loysnir skulu verða roynd í verki og mett egnað til nýtsluna, áðrenn farið verður undir at brúka tey.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Akvariufelagnum, Atlantic Airways, Bóndafelagnum, Djórahandlinum, Djóraverndarfelagnum, Felagnum Føroysk Ross, Føroya Hundaførarafelag, Føroya Ríðingarfelag, Føroya Seyðahundafelag, Grindamannafelagnum, Havbúnaðarfelagnum, Hummarafelagnum, Hundaeigarafelag Føroya, Íslandsrossafelagnum, Óðalsfelagnum, privatstarvandi djóralæknunum, Sjósavninum, Smyril Line, Vága Floghavn og Veiðimannafelagnum.

Harumframt hevur uppskotið verið til hoyringar hjá stjórnarráðunum, Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, Búnaðargrunninum, Búnaðarstovuni, Dátueftirlitinum, Føroya Landfúta, Havstovuni, Landsapotekaranum, Strandfaraskipum Landsins, Søvnum Landsins (Náttúrugripsasavnið), TAKS, Umhvørvisstovuni og Vørn.

Í tilgongdini at endurskoða lógina hevur arbeiðsbólkurin boðið áhugabólkum og stovnum, sum á einhvønn hátt hava serligan áhuga í málinum, á fund at umrøða málið. Teir hoyringspartar, ið tóku av, hava havt høvi at gera viðmerkingar til uppskotið, áðrenn tað varð sent til almenna hoyring, eins og partarnir hava havt høvi at lata Uttanríkis- og vinnumálaráðnum viðmerkingar í sambandi við ta almennu hoyringina. Víst verður til hjálagda hoyringarskjal, sum tekur samanum viðmerkingarnar, sum vórðu latnar Uttanríkis- og vinnumálaráðnum í sambandi við ta almennu hoyringina. [Hetta verður skrivað, tá ið almenna hoyringin er av]

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Fleiri av ásetingunum í lógaruppskotinum eru framhald av djóraverndarlógini, eins og fleiri viðurskifti frammanundan eru skipað í aðrari lóggávu og við øðrum endamáli, t.d. eftirlit við heimild í matvørulógini ella djórasjúkulógini. Hetta merkir, at lógaruppskotið í sjálvum sær hevur avmarkaðar fíggjarligar avleiðingar. Uppskotið hevur fleiri kunngerðarheimildir, og ilt er at nágreina fíggjarligu avleiðingarnar av hesum reglum, áðrenn tær eru gjørdar. Roknast kann tó við ávísum fíggjarligum avleiðingum.

Hjálparskyldan er víðkað sammett við djóraverndarlógina og kann tí hava við sær útreiðslur til djóralækna, avlíving o.tíl. Slíkar útreiðslur ber landið uttan so, at djór tilvitað ella av grovum ósketni hava fingið skaða ella hava verið fyri vanrøkt. Í slíkum førum rindar tann, sum tilvitað ella av grovum ósketni hevur elvt til skaðan.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlit við vinnuligum djórahaldi, men tað eftirlitið er grundað á reglur í matvørulógini og djórasjúkulógini, av tí at talan er um matvøruframleiðslu til bæði útflutnings og heimamarknað. Við hesum uppskoti fær Heilsufrøðiliga starvsstovan heimild til eisini at hava eftirlit við djóravælferð og djóravernd. Kortini er eftirlit við djóravælferð og djóravernd bara ein partur av uppgávuni, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan fær afturat verandi uppgávum, tí við støði í hesum lógaruppskoti fer Heilsufrøðiliga starvsstovan at leggja dent á at upplýsa og vegleiða um djóravælferð. Endamálið við at leggja

dent á at upplýsa og vegleiða um djóravælferð og djóravernd er at arbeiða fyri, at meginmálið um betri djóravælferð verður rokkið við viðkomandi upplýsing og góðari vegleiðing heldur enn bara eftirliti. Eyðsæð fer hetta at krevja meira orku, men trupult er kortini at meta um, hvørjar fíggjarligu avleiðingarnar verða av uppskotinum, tí metast skal um og í hvønn mun ymsu uppgávurnar hjá Heilsufrøðiligu starsvsstovuni, bæði verandi uppgávur og tær, sum standast av hesum uppskoti, kunnu skipast soleiðis, at allar uppgávurnar verða røktar til fulnar og á skynsamasta hátt. Helst ber til at skipa arbeiðið soleiðis, at fleiri uppgávur kunnu røkjast samstundis, men ein neyv fíggjarlig meting kann ikki gerast, fyrr enn lógin hevur virkað eina tíð.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Víst verður til viðmerkingarnar omanfyri undir pkt. 2.1. Talan er í ávísum førum um nýggjar uppgávur, og aldan tí at Heilsufrøðiliga starvsstovan skal umsita hetta økið afturat tí, sum starvsstovan umsitur frammanundan, fer uppskotið at hava ávísar umsitingarligar avleiðingar við sær fyri landið.

Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Upplýsingarskyldan hevur fíggjarligar avleiðingar fyri tann, sum hevur skyldu at lata upplýsingar. Avleiðingarnar verða í fyrsta lagi mettar at vera smáar, tí talan er í allarflestu førum um upplýsingar, sum viðkomandi hevur frammanundan.

Kravið um, at bygningar, girðingar o.tíl. skulu gerast soleiðis, at djór ikki eru í vanda fyri líðingum, fer at hava fíggjarligar avleiðingar fyri tann, ið hevur ábyrgdina. Alt eftir stødd á bygningi ella girðing, djóratali og staðseting, kann kostnaðurin skifta.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Eingin millumtjóðasáttmáli, heldur ikki norðurlendskir sáttmálar, eru á hesum øki, men øll norðurlendsk djóravælferðar- og djóraverndarlóggáva viðurkennir, at djór hava rætt til góða viðferð og vernd móti óneyðugum líðingum, pínu, sjúku o.a.

Djóravernd og -vælferð er partur av veterineravtaluni millum Føroyar og ES, og við hesi avtalu hava Føroyar partvíst bundið seg til at seta í verk ES-lóggávuna á hesum øki. ES-reglur eru implemeteraðar í føroyska lóggávu, tá ið talan er um flutning av livandi djórum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
*2.8.1. Evropeiski mannarættindasáttmálin (Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention)*

Sambært Evropeiska Mannarættindasáttmálanum hevur ein og hvør rætt til at útinna sína trúgv. Hetta hevur m.a. við sær rættin til mat, sum lýkur serlig krøv. Avmarkingar í trúarfrælsinum eru bara loyvdar, um tær eru neyðugar í einum fólkaræðisligum samfelagi og grundaðar á fyrilitini, sum eru nevnd í grein 9 í mannarættindasáttmálanum.

Sambært uppskotinum verður kravt, at djór skulu doyvast, áðrenn tey verða avlívað. Hetta verður hildið at vera í samsvari við mannarættindasáttmálan. Henda fatan er grundað á, at tað er í lagi at krevja, at djór verða doyvd, áðrenn tey verða avlívað, um tað samstundis ber til at innflyta kjøt og kjøtúrdráttir frá (somu) djórum, har djórini ikki eru doyvd, áðrenn tey verða avlívað. Í hesum sambandi kann vísast á dómin í málinum *Cha'are Shalom ve Tsedek vs Fraklandi* (dómur sagdur 27. juni 2000), har tað í dómsúrskurðinum stendur, at í tann mun trúarbólkar hava møguleika at fáa hendur á mati, sum lýkur serligu krøvini, er rættur teirra til trúarfrælsi tryggjaður. Henda lóg forðar ikki fyri innflutningi av mati frá djórum, ið eru avlívað uttan doyving, og slíkur matur er tøkur á altjóða marknaðinum. Við støði í hesum verður mett, at forboðið móti avlíving uttan doyving ikki er í stríð við rættin til trúarfrælsi.

Sostatt verður mett, at uppskotið er í samsvari við Evropeiska Mannarættindasáttmálan.

*2.8.2. Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*
Mett verður, at uppskotið er í samsvari við omanfyri nevnda sáttmála.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at uppskotið fer at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið ásetur reglur um revsing, t.e. sekt og fongsulsrevsing, fyri brot á reglurnar. Talan er í stóran mun um somu reglur, sum eru ásettar í løgtingslóg um vernd av dýrum. Heimild er eisini at áseta revsireglur í kunngerð.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Landsstýrismaðurin hevur heimild at áseta reglur um gjald fyri eftirlit, tænastur o.a., sum Heilsufrøðiliga starvsstovan fremur ella veitir.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Uppskotið áleggur teimum, ið reka vinnuligt djórahald, skyldu at veita almennum myndugleikum upplýsingar, ið hava týdning fyri almenna eftirlitið við djóravælferðini og djóraverndini. Mett verður kortini, at hetta ikki hevur umsitingarligar ella fíggjarligar avleiðingar við sær.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Heimildin at áseta nærri reglur um at veiða og fiska vill djór, eins og heimildin at áseta reglur um at taka og handfara vill djór, er løgd til landsstýrismannin í fiskivinnu- og landbúnaðarmálum. Hetta skerjir ikki møguleikan at kæra avgerðir, sum verða tiknar við heimild í hesum reglum, til Vinnukærunevndina.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Við hesum uppskoti fær almenni eftirlitsmyndugleikin, t.e. Heilsufrøðiliga starvsstovan, heimild at koma á eftirlitsvitjan á løggildum ella góðkendum virkjum, sum hava vinnuligt djórahald. Heimildin er ájavnt við ta heimild, sum frammanundan er galdandi eftir matvørulógini og djórasjúkulógini. Sum nakað nýtt fevnir hugtakið *vinnuligt djórahald* eisini um tey, sum við fíggjarligum vinningi og sølu fyri eyga ala, hava, gagnnýta og selja djór ella djóraúrdráttir ella tænastur beinleiðis ella um heil- ella smásølu til brúkaran ella til meirvirking við sølu fyri eyga. Hetta merkir, at tey, sum selja slíkar vørur í durasølu, eisini kunnu koma undir eftirlit. Gjørt verður tó vart við, at talan ikki er um matvørueftirlit, men um eftirlit við djóravælferð og djóravernd.

Lógaruppskotið gevur ikki á annan hátt almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Lógin hevur til endamáls at fremja djóravælferð, djóravernd og virðing fyri djórum. Endamálið er grundað á ta fatan, at djór eru livandi verur, ið hava eitt eginvirði, sum ikki er treytað av tí nyttuvirði, sum djór hava ella kunnu hava fyri fólk.

Hugtakið djóravælferð tekur støði í einstaka djórinum og støðu tess. Djóravælferð er eitt torskilt hugtak, og ymisk fólk hava ymsar allýsingar av hugtakinum. Djóravælferð tekur støði í subjektivu sálarligu støðuni hjá djórinum, og við støði í hesum ber til at siga, at tað eru kenslur sum ótti, pína, ørkymlan og nøgdsemi ella – sagt á annan hátt – javnvágin millum góðar og ringar upplivingar, sum avgera vælferðarstigið. Annað, sum eisini kann vera partur av hugtakinum djóravælferð, eru møguleikarnir, sum djórið hevur at varðveita og útinna sína natúrligu atferð. Tilsamans ber til at siga, at hugtakið djóravælferð í roynd og veru er *trivnaður* í breiðari merking.

Góð djóravælferð eigur í størst møguligan mun at verða grundað á objektiv og faklig metingarstøði, og djóravælferðin er ymisk frá djóri til djór. Útgangsstøðið er ein lýsing av støðuni hjá einstaka djórinum. Skal vælferðarhugtakið brúkast fyri t.d. eitt heilt seyðafylgi ella ein heilan aliring, eigur støðið at verða tikið í teimum djórum, sum eru ringast fyri. Samstundis ber tó til at siga, at samlaða djóravælferðin er góð, hóast einstøk djór ikki hava ta somu vælferðina sum hini.

Virðingin, sum fólk hava fyri djórum, kann hava beinleiðis týdning fyri vælferð djóranna. Virðingin kann eisini hava óbeinleiðis týdning á tann hátt, at hugburður kann hava við sær, at djór verða illa handfarin. Endamál lógarinnar um at fremja virðing fyri djórum er ætlað at skapa og styrkja eina hugburðsbroyting, sum fyrst og fremst verður rokkin við átøkum, ið fremja góða djóravælferð. At fremja virðing fyri djórum er eitt sjálvstøðugt endamál, hóast vantandi virðing fyri djórum ikki neyðturviliga hevur við sær, at djóravælferðin versnar. Tá ið hugtakið *virðing* verður tulkað, verða etiskar áskoðanir um, hvussu djór eiga at verða viðfarin, lagdar afturat hugtakinum *djóravælferð.*

**Til § 2**
Djóraverndarlógin nevnir ikki hvørt djór og hvørt djóraslag, sum er fevnt av lógini. Til tess at gera púra greitt, at øll djór í útgangsstøði eru fevnd av hesi lóg, eru vanligastu meginættirnar nevndar. Talan er um súgdjór, fugl, paddur, skriðdjór, tíggjubeint krabbadjór (t.e. m.a. krabba, hummara og rækju) og hogguslokk. Afturat hesum er ásett, at lógin eisini er galdandi fyri djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki. Á henda hátt fæst lógin at fevna um tey djór, sum fólk hava sum kelidjór ella stuttleikadjór, hóast talan er um onnur enn nevndu djórasløg, og hóast talan kann vera um djór, sum eru komin ólógliga til Føroya.

Virkisøkið er víðkað til eisini at fevna um ymisk menningarstig av somu djórum, áðrenn tey eru fødd ella klakt, um sansagøgnini samsvara við tey hjá livandi djórum.

Lógin er galdandi fyri øll viðurskifti, sum ávirka vælferðina hjá og virðingina fyri djórum. Viðurskiftini, sum her verður sipað til, fevna um alt virksemi og allar gerðir, eisini undanlát,

sum hava týdning fyri vælferðina hjá og virðingina fyri djórinum. Innrættingar, útgerð, raktrarhættir o.tíl. eru tí eisini fevnd av lógini.

Í lógini verður í flestu førum ásett, hvønn reglurnar galda fyri. Er tað ikki beinleiðis ásett, eru lógarásetingarnar galdandi fyri ein og hvønn. Fleiri ásetingar eru ætlaðar tí, ið rekur vinnuligt djórahald, meðan aðrar ásetingar eru ætlaðar tí, sum rekur ella hevur ávíst virksemi ella fremur ávísar gerðir. Øll djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki, hava ein eigara, sum hevur ábyrgdina av djórinum. Eigarin hevur í útgangsstøði ábyrgdina, men kann eisini lata onnur hava varandi ella tíðaravmarkaða ábyrgd av djórinum. Ábyrgdin er objektiv.

Lógin er landafrøðiliga avmarkað til at galda á føroyskum landøki og á sjóøkinum innan fyri fiskimarkið, á skipum, ið eru skrásett í Føroyum, og á flogførum hjá feløgum, sum eru skrásett í Føroyum.

**Til § 3**
Ásetingin er ein almenn meginregla, sum er ein víðkan av ásetingini í § 1 í djóraverndarlógini frá 1985.

Ásett verður, at djór skulu viðfarast væl, at tey skulu ikki verða nervað óneyðugt, og at tey skulu verjast fyri strongd og vandanum fyri hesum. Ásetingin hevur, eins og § 1 í djóraverndarlógini, sjálvstøðugan týdning, um ávís viðurskifti ikki eru fevnd av øðrum ásetingum í lógini. Ásetingin er eisini viðkomandi, um talan er um viðurskifti, har onkur annar enn tann, sum hevur ábyrgdina av djórinum (eigari ella tann, sum rekur vinnuligt djórahald) fremur gerðina ella undanlátið. Afturat hesum hevur ásetingin sjálvstøðugan týdning í mun til at tulka og brúka aðrar ásetingar í lógini.

Hvørt djór verða viðfarin væl er ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri. Kravið um góða viðferð er knýtt at einstaka djórinum, tí kravið merkir m.a., at fyrilit skal havast fyri kropsliga og sálarliga tørvinum hjá djóraslagnum sum heild og hjá einstaka djórinum, og at djór kunnu hava bæði góðar og ringar upplivingar. Ásetingin er eisini galdandi, tá ið talan er um vinnuligt djórahald, ella annað djórahald, har tað ikki er gjørligt at hava støðugt eftirlit við hvørjum einstøkum djóri, t.d. tí tey eru á beiti, ella tá ið talan er um serliga nógv djór.

Kravið um, at djór skulu verjast fyri at verða strongd ella nervað óneyðugt og vandanum fyri hesum, merkir, at tann, sum hevur ábyrgdina av djórinum, á virknan hátt skal verja djórið móti sjúku, skaða og væntandi vandum.

Leyst av skyldunum hjá tí, ið rekur vinnuligt djórahald, hevur ein og hvør skyldu til at bera seg soleiðis at, at djór ikki verða nervað óneyðugt ella eru fyri óneyðugari strongd. Hetta er galdandi fyri djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki, eins og tað er galdandi fyri vill djór.

Tá ið metast skal um, hvørt eitt djór er fyri óneyðugari strongd ella verður nervað óneyðugt, skal viðkomandi faklig vitan nýtast sum grundarlag. Slíkar metingar skulu, alt tað ber til, verða grundaðar á vísindi, men greitt er, at ikki øll viðurskifti kunnu metast vísindaliga. Í slíkum førum má metast um eftir førimuni. Tá ið mett verður um, hvørt djórið verður strongt ella nervað óneyðugt, má dentur leggjast á, hvussu djórið er strongt ella nervað, og hvussu

álvarsligt tað er, um hetta er elvt av mannaávum, hvat endamálið er, og um gerðin er alment góðtikin.
Kravið um at verja djór móti vandanum at verða strongt ella nervað óneyðugt hevur við sær, at átøk skulu gerast, áðrenn støðan tekur seg upp.

**Til § 4**
Ásetingin er tann sama sum í § 13, stk. 1 í djóraverndarlógini, men verður víðkað og nágreinað. Ásetingin áleggur einum og hvørjum, sum kemur fram á eyðsýniligt sjúkt, skatt ella hjálparleyst djór, skyldu at veita djórinum hjálp. Henda hjálparskylda er eisini galdandi fyri vill djór. Er talan um djór frá einum djórahaldi, og ber ikki til at veita nóg góða hjálp á staðnum, verður hjálparskyldan útint við at boða eigaranum ella politinum frá. Er talan um fleiri vill djór, sum eru illa fyri, t.d. oljudálkaður fuglur, broytist hjálparskyldan til eina fráboðanarskyldu, sbr. § 5. Víst verður til viðmerkingarnar niðanfyri.

§ 4 er galdandi fyri tann, sum kemur fram á djórið. Eru tey fleiri, hava øll skyldu at hjálpa djórinum. Í ávísum førum kann gerast neyðugt at heita á onnur um hjálp, t.d. tí tey eru nærhendis. Hesi hava ikki sjálvstøðuga hjálparskyldu, men eiga at hjálpa eftir førimuni.

Hjálparskyldan er galdandi fyri øll djór, sum eru fevnd av lógini. Hvør einstakur hevur skyldu at hjálpa eftir førimuni og í tann mun, tað ber til. Í hvørjum einstøkum føri má metast um, hvørt ráðiligt er at handfara djórið, um tað ber til at flyta djórið, og um tað ber til at fáa neyðuga hjálp. Hvussu nógv skal til, fyri at hjálparskyldan er lokin, veldst um ta ítøkiligu støðuna. Er talan um djór, sum eru í stórum vanda ella har vandi er fyri varandi meini, eigur at verða lagt meira fyri. Skyldan er tó í mongum førum lokin við at boða eigarum, politinum ella kommununi frá.

Hvat hjálpin fevnir um, og hvussu hjálpin verður veitt, verður avgjørt eftir aktuellu støðuni, sum djórið er í. Hjálpin kann t.d. vera at loysa djór, sum eru føst, at sleppa út djórum, sum eru innilæst, ella at fáa djórið til djóralækna.

Djór frá djórahaldi kunnu ikki verða sett í viðgerð ella avlívað, fyrr enn eigarin hevur fingið boð. Er talan um t.d. eitt ákoyrt ella omandottið lamb, kann útreiðslan hjá bóndanum gerast alt ov stór í mun til ta inntøku, sum seinni kann fáast fyri lambið, um tann, sum kemur fram á djórið, biður um kostnaðarmikla viðgerð. Í slíkum førum verður mett umráðandi, at eigarin hevur møguleika at avlíva lambið, hóast tað kortini hevði kunnað komið fyri seg, um tað fekk viðgerð. Ásetingin um, at djórið kann verða avlívað, býðst tí ikki bøtur, verður standandi, so tað ber til at avlíva djórið, um greitt er, at djórinum ikki er lív lagað.

Ásetingin í stk. 2 um, at vegfarandi skulu hava fyrilit fyri djórum á og fram við vegi, er tann sama sum í § 13, stk. 2 í djóraverndarlógini. Eins og í djóraverndarlógini verður ásett, at vegfarandi, sum koyra á eitt djór, skulu steðga og eftir førimuni hjálpa djórinum.

Er eyðsýnt, at djórinum ikki er lív lagað, er loyvt at avlíva djórið á staðnum, sbr. stk. 3. Áðrenn djór frá djórahaldi verður avlívað, skal eigarin kortini fáa høvi at meta um, hvørt djórið skal setast í viðgerð, ella um tað skal avlívast beinanvegin. Avlíving hevur við sær, at djórið sleppur undan líðing, og avlíving verður tí roknað sum neyðug ella nóg góð hjálp í

nógvum førum, serliga tá ið talan er um vill djór og djór, har eigarin er ókendur, hóast onnur viðgerð hevði kunnað hjálpt djórinum. Er talan um vill djór, skal metast um, hvørt djórið framhaldandi kann liva í náttúruni, og fyrilit skal harumframt havast fyri, um talan er um djór, sum er partur av stovni, ið er í vanda fyri at hvørva. Eisini má metast um, hvørt afturmenningartíðin vil overva djórið.

Í sama viðfangi skal vísast á, at fyrilit má eisini havast fyri tí, sum er gjørligt. Hevur eitt djór, t.d. á útoyggj ella burturi frá miðstaðarøkinum um kvøldið ella ein sunnudag, bráðneyðugan tørv á djóralæknahjálp, og ber tað ikki til hjá djóralækna at koma á staðið vegna veður ella vantandi ferðamøguleikar, kann tann, sum varðar av djórinum, sjálvur fremja neyðug inntriv. Talan skal vera um inntriv, sum ikki kunnu bíða, til djóralækni kemur á staðið. Í slíkum førum skal tann, sum varðar av djórinum, seta seg í samband við djóralækna, sum um telefon kann geva neyðuga leiðbeining og hjálp, sbr. § 11, stk. 4 í løgtingslóg um djóralæknavirksemi v.m.

Í stk. 4 verður staðfest skylda landsins at rinda fyri neyðugar útreiðslur fyri tiltøk eftir § 4. Landið kann krevja útreiðslur sínar endurgoldnar frá eigaranum, um talan er um djór frá einum djórahaldi.

Rætturin at fáa útreiðslur sínar endurgoldnar er natúrliga knýttur at hjálparskylduni, men fyri at avmarka gjaldsskyldu landsins er bara talan um *neyðugar* útreiðslur, t.e. landið hevur ikki skyldu at endurrinda útreiðslur fyri onnur tiltøk enn tey, sum vóru neyðug fyri at bøta um aktuellu støðuna, undir hesum eisini avlíving. Neyðugar útreiðslur kunnu m.a. vera rímiligar útreiðslur til flutning til djóralækna, telefonkostnaður o.tíl.

Útreiðslur til t.d. bráðfeingis kanning hjá djóralækna fyri at staðfesta støðuna hjá djórinum, bráðfeingis fyrstuhjálp ella avlíving hjá djóralækna, kann djóralæknin fáa endurgoldið beinleiðis frá landinum. Víðkað kanning fyri at staðfesta sjúkustøðu og fyri at taka støðu til møguliga avlíving kann tó eftir umstøðunum verða fevnd av ásetingini, og um so er, fær djóralæknin kostnaðin endurgoldnan frá landinum. Meginreglan er kortini, at eigarin hevur ábyrgd av allari aðrari viðgerð enn bráðneyðugari viðgerð.

Hevur onkur av ósketni elvt djóri skaða, og hevur viðkomandi útreiðslur av at hjálpa djórinum, kann hesin fáa útreiðslur sínar endurgoldnar eins og onnur, ið hava útreiðslur av at hjálpa.

Í stk. 5 verður staðfest, at tann, sum av ósketni hevur elvt einum djóri skaða, hevur skyldu at hjálpa djórinum. Hjálparskyldan er tann sama sum hjá teimum, sum av tilvild koma fram á sjúkt ella skatt djór. Tann, sum tilvitað ella av grovum ósketni hevur elvt til skaðan, kann kortini ikki krevja endurgjald frá landinum fyri útreiðslur til tiltøk, sum viðkomandi hevur framt í hesum sambandi.

Stk. 6 heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur í kunngerð. Kunngerðin kann m.a. áseta nærri treytir fyri at fáa endurgjald og reglur um endurgjaldsupphæddir.

**Til § 5**
Ásetingin í § 5 um fráboðan er nýggj.

Ásetingin er galdandi fyri ein og hvønn. Fráboðanarskyldan í stk. 1 er galdandi, tá ið orsøk er til at halda, at djór eru fyri skammfaring ella álvarsligum svíki í umhvørvi, eftirliti og røkt. Talan skal vera um ávísan illgruna um, at talan er um álvarslig brot á djóravælferðarlógina.

Tað er aloftast politiið, ið fær boðini, men kann politiið ikki meta um heilsustøðuna hjá djórinum, skal embætisdjóralækni boðsendast at gera ta veterinerfakligu metingina.

Fráboðanarskyldan gongur ikki fram um aðra lógarálagda tagnarskyldu. Djóralæknar hava tó í summum førum lógarásetta fráboðanarskyldu, sbr. § 14, stk. 2-3 í løgtingslóg um djóralæknavirksemi v.m.

Fráboðanarskyldan í stk. 2 er galdandi, um fleiri vill djór ella útiløgudjór eru sjúk ella skadd ella fyri aðrari líðing. Talan er um eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri; talan kann t.d. vera um fleiri oljudálkaðar fuglar ella útbrot av smittandi djórasjúku. Boðast skal politinum ella landsdjóralæknanum frá, og viðkomandi myndugleikar taka síðani støðu til, um tiltøk skulu setast í verk. Tá ið støða skal takast til, um tiltøk skulu setast í verk, skal metast um støðuna hjá djórunum (sjúka, strongd o.tíl.), kostnaðin av tiltøkunum, og hvørt talan er um hótt djór ella djóraslag.

**Til § 6**
Ásetingin er víðkað og nágreinað sammett við tað, sum er ásett í §§ 8-12 í djóraverndarlógini. Stk. 1 um heilivágsviðgerð og skurðviðgerð fevnir m.a. um kanningarhættir og sjúkuavgerð, koppsetingar, heilivágsviðgerð, skurðviðgerðir og aðrar terapeutiskar viðgerðir. Skurðviðgerð fevnir um viðgerð, sum hevur við sær, at hol verður sett á húð ella slímhinnu, ella at vevnaður verður knústur. Viðgerðin fevnir eisini um bæði skurðviðgerðir, akupunktur og innspræningar, og tá ið hol annars verður sett á húð ella slímhinnu í sambandi við koppseting og royndartøku og fyri at geva heilivág og vætu.

Kravið um, at øll heilivágsviðgerð og allar skurðviðgerðir skulu verða gjørdar við fyriliti fyri virkisføri og lívsgóðsku hjá djórinum merkir, at veljast skal ein viðgerð, sum er egnað at røkka hesum fyriliti. Er tað ivasamt, um viðgerðin fer at røkka hesum máli – at hava fyrilit fyri virkisføri og lívsgóðsku – gerst tað kanska neyðugt at avlíva djórið. Hvørt ein viðgerð ella annað tiltak verður mett egnað at røkka fyrilitinum fyri virkisføri og lívsgóðsku broytist ivaleyst við tíðini og verður ávirkað av nýggjari fakligari vitan og hugburðinum í samfelagnum.

Sambært løgtingslóg um djóralæknavirksemi v.m. eru tað bara djóralæknar, sum kunnu útskriva heilivág til djór, sbr. § 1, nr. 7 í løgtingslóg um djóralæknavirksemi v.m., og sum kunnu skurðviðgera djór o.tíl. sbr. § 2, sbr. § 1 í somu lóg. Eftir § 7 í løgtingslóg um djóralæknavirksemi v.m. er landsstýrismanninum heimilað at góðkenna persónar, sum ikki hava útbúgving sum djóralækni, men sum hava aðra viðkomandi útbúgving, at útinna ávíst virksemi, sum annars bara kann útinnast av djóralækna. Talan kann t.d. vera um kynbótaarbeiði, sjúkufyribyrging og matvørueftirlit.

Ásetingin í § 2 í løgtingslóg um djóralæknavirksemi v.m., sbr. stk. 1 í somu lóg, er endurtikin í § 6, stk. 1, 2. pkt. í uppskotinum. Heimildir landsstýrismansins eftir § 7 í løgtingslóg um djóralæknavirksemi v.m. eru framvegis galdandi.

Ásett verður, at skurðviðgerðir sum meginregla bara kunnu gerast, tá ið tað er heilsuliga neyðugt. Hóast hesa meginreglu er loyvt djóralækna at avhorna og gelda djór, um tað er neyðugt í mun til djóravælferð ella av øðrum orsøkum. Fyrilitið fyri djóravælferð kann vera bæði fyrilitið fyri einstaka djórinum og fyrilitið fyri fylginum ella bólkinum, sum djórið er partur av; eitt nú kunnu neyt verða avhornað fyri at forða fyri løstum á fólk ella onnur djór.

Orðingin *aðrar orsøkir* sipar til viðurskifti, ið ikki eru grundað á djóravælferð. Dømi um hetta kann t.d. vera, at neyðugt er at gelda kelidýr fyri at sleppa undan avkomi ella at gelda kettu fyri at minka um talið av útiløgukøttum. Slíkar skurðviðgerðir skulu bara gerast av djóralækna. At beinskerja fugl er undantikið hesi áseting; djóraeigari kann beinskerja fugl, um fuglurin er í mesta lagi sjey dagar gamal. Viðmerkjast skal, at beinskerjing ikki er at meta sum merking, sbr. § 7.

Skurðviðgerðir, sum ikki eru loyvdar, eru skurðviðgerðir, sum einans hava eitt estetiskt endamál, t.d. at kupera oyrað ella halan á djórum, ella at geva djórum piercingar ella onnur inntriv, sum ikki taka burtur kropslutir, men sum kortini forða djórinum í natúrligari atferð ella á annan hátt bera djórinum trega. Í onkrum føri eiga inntriv at verða loyvd, hóast eingin djóraheilsulig orsøk er fyri inntrivinum, t.d. at geva tarvum nasaring. Slíkar reglur kunnu ásetast í kunngerð.

Í útgangstøði er tað tann, sum skal gera inntrivið, ið skal meta um, hvørt inntrivið er neyðugt; henda meting skal gerast í samráð við tann, sum biður um at fáa inntrivið gjørt. Tá ið talan er um at gelda kelidýr, er metingin hjá eigaranum serliga viðkomandi.

Stk. 2, síðsta pkt., ásetur, at djóraeigara er loyvt at merkja djór í djórahaldi, um tað kann gerast á tryggan hátt. Í Føroyum er serliga viðkomandi at viðgera málið um at marka seyð. Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 7.

Í stk. 3 verður ásett, at neyðug doyving og pínuviðgerð skal brúkast, tá ið djór verða skurðviðgjørd ella á annan hátt eru fyri pínufullum inntrivum. Hetta er bæði galdandi, tá ið skurðviðgjørt verður, og tá ið djórið skal koma fyri seg eftir viðgerðina. Gelding við skurðviðgerð verður mett sum pínufult inntriv, sum krevur doyving og pínuviðgerð.

Stk. 4 heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur í kunngerð, undir hesum at áseta treytir fyri ella banna ávísum viðgerðum, og at loyva undantøkum frá ásetingini í stk. 2. Eitt nú kann gerast viðkomandi at áseta reglur um at avhorna og gelda djór, reglur um at taka burtur aðrar kropslutir, og reglur um at brúka heilivágsviðgerð ella skurðviðgerð í øðrum førum enn teimum, ið eru nevnd omanfyri.

**Til § 7**
Talan er um nýggja áseting.

Í fleiri førum er viðkomandi at merkja djór, og stk. 1 ásetur eitt alment krav um, at øll merking av djórum skal gerast á hóskandi hátt. Djór verða merkt við annaðhvørt at broyta útsjóndina á djórinum ella við at festa eitt frámerki, t.d. eitt oyramerki (klips) ella ein ring, á djórið. Merkingin hevur til endamáls at gera tað lættari at eyðmerkja djórið, at fáa greiðu á, hvør eigur djórið, ella fyri at fáa greiðu á, hvar djórið er.

Fleiri ymiskir hættir eru at marka djór. Aðalkravið er, at merkingin skal vera hóskandi, og at merkingin ikki skal darva atferðina hjá djórinum. Tað er ikki hóskandi at merkja djór við at frysta ella brenna merkið á djórið, tó so, at hetta kann gerast á kropspartar, sum ikki merkja pínu – á hógv, kleyv, skel ella horn. Sum meginregla er tað at taka burtur kropspartar heldur ikki hóskandi merking, sí tó niðanfyri um at marka seyð og gæs. Tá ið metast skal um, hvørt ein merkingarháttur er hóskandi, verður støðið tikið í aktuellari vitan, og merkingarhættir kunnu nágreinast í kunngerð, sbr. stk. 2.

Djór, sum er merkt ella markað á ein hátt, sum kann hava við sær ígerð, bruna ella aðrar heilsuligar avleiðingar fyri djórið, skal vera undir ávísum eftirliti, t.e. eigarin skal ansa eftir, at hetta ikki hendir, og neyvar ásetingar um merking kunnu verða ásettar í kunngerð. Um djór í sambandi við royndir mugu merkjast á ein hátt, sum ikki er í samsvari við hesa áseting, skal merkjast í samsvari við ásetingarnar um at brúka djór til royndir og undirvísing.

Sambært hagalógini (Lov om Haugers Styrelse og Drift m.m. frá 1937) hava bøndur og onnur, sum hava seyð, skyldu at marka seyðin við hagamarki og kenningarmarki. Hetta er einamest ásett fyri at tryggja ognarrættin, og tað er neyðugt at marka við nærlagni soleiðis, at markið er sjónligt og lætt at kenna. Seyðamørkini eru gomul og staðbundin, og eru nærum einki broytt gjøgnum tíðina. Tó er farið burtur frá onkrum seyðamarki, tí hildið hevur verið, at tað fer ov illa við oyranum. Tað er bóndin ella røktingarmaðurin, sum hevur ábyrgdina av at marka seyðin, og tað er ikki ein og hvør, sum hevur loyvi at marka seyð.

Seyðurin verður vanliga markaður við felliknívi, men fleiri eru eisini farin at nýta serligan saks, sum hevur stutt bit, einar 2 cm ella so til longdar, ella serliga tong. Við saksi og tong er lættari at gera týðiligt mark, men pínan man vera nakað tann sama sum við felliknívi. Ongar formligar reglur eru um, hvussu seyðurin, í mun til djóravælferð, skal verða markaður. Tað eru heldur ongar formligar reglur um at merkja onnur djór, men vanliga verða djór, ið verða merkt við mikrotranspondara (flís ella chip) merkt ovarlaga á hálsinum vinstrumegin. Neyt verða merkt við oyraspjaldri (klipsi), og ross verða merkt við flís (chip), um tey yvirhøvur verða merkt. Verður djór merkt við flís undir húðina, skal tað gerast av djóralækna, tí tað inntrivið verður mett so mikið stórt, at serkunnleiki krevst. Annars er tað ikki eitt krav, at djór verða merkt og markað av djóralækna, hóast talan er um eitt inntriv, sum er fevnt av hugtakinum *skurðviðgerð* í hesi lóg. Aloftast er tað eigarin, sum merkir ella markar, og henda siðvenja verður nú løgskipað, sbr. orðingina í § 6, stk. 2, síðsta pkt. í hesi lóg.

Heimafuglur, t.e. serliga gás, verður í dag vanliga merktur við ringi. Merkingin er einføld og uttan pínu, og mælt verður yvirhøvur til at merkja heimafugl við ringi, sbr. tó niðanfyri.

Fyrr var gás markað við skurði í fitjurnar. Á fótinum vóru markini riva og hol, í innfit og útfit, í høgra og vinstra fóti. Markini vórðu nevnd *riva innfit, riva útfit, hol í innfit, hol í útfit, riva hol í innfit, riva hol í útfit.* Í hvørjum fóti var so lagt afturat, t.d. riva innfit í høgra fóti. Upp í tríggjar rivur og onkuntíð hol afturat kundu vera í somu fit. Summir markaðu eisini í veinginum, skóru eina ella fleiri fjaðrar. Okkurt hús í Ørðavík hevði markið *riva innfit í høgra fót og triðju fjøður í vinstra veingi.* (Hagar og seyðamark, Kári Thorsteinsson, Búnaðargrunnurin 2007).

Gásamark er ikki skipað á sama hátt sum seyðamark, tí gásamark verður ikki samtykt á grannastevnu, eins og seyðamark. Gásamark er heldur ikki skrásett hjá sýslumanninum. Seyðamark verður broytt við grannastevnusamtykt, og er talan um broyting í hagamarki, skal broytingin góðkennast av landsstýrinum. So er ikki við gásamarki, sum er knýtt at einstøku húsunum í bygdini. Hesi gásamark eru avgomul og brúkt í fleiri ættarlið. Í flestum bygdum eru gæsnar avsagdar, men onkrar bygdir eru enn, sum hava gæs, t.d. Ørðavík og Hov í Suðuroy.

Í hesum bygdum verður gamla merkingin brúkt, og hetta lógaruppskot forðar ikki fyri, at gamalt gásamark verður varðveitt og brúkt. Hevur eigarin ikki gamalt gásamark, skulu gæsnar merkjast við ringi. Tað sama er galdandi fyri dunnur og hønur, um hesar verða merktar.

Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um at merkja djór, undir hesum krevja og banna merking.

Heimild er eisini at áseta reglur um, at ávís djór skulu merkjast. Tað kemur javnan fyri, at ómerkt djór, sum hava fingið skaða ella elvt til skaða, verða tikin upp, og trupult er tá at finna eigaran, sum er tann, ið skal gjalda fyri møguliga viðgerð ella avlíving ella skaða, sum djórið hevur elvt til. Trupulleikin er størstur við hundum og kettum, sum ikki eru merkt.

Slíkar reglur um merking eru eisini viðkomandi, nú íleguеginleikarnir fyri ridluskriða verða kannaðir. Her er serliga umráðandi at eyðmerkja og skráseta hvønn einstakan brundseyð, skal skil vera á kanningararbeiðinum.

Slík kunngerð um merking kann eisini fevna um treytir og mannagongdir í sambandi við ávísar merkingarhættir, áseta reglur um, at merkt djór skulu skrásetast í eini skrá, og reglur um, hvør hevur atgongd til hesa skrá. Kunngerðarheimildin kann m.a. brúkast til at áseta krav um, at kettur skulu merkjast fyri at minka um talið av útiløgukøttum. Í kunngerð kunnu eisini ásetast reglur um, at djór, sum ikki eru merkt, kunnu verða avlívað ella latin øðrum uttan endurgjald til eigaran.

**Til § 8**
Ásett verður, at djór skulu flytast soleiðis, at tey verða nervað sum minst, og at djór bara kunnu flytast, tá ið tey eru soleiðis fyri, at tað er ráðiligt at flyta tey allan vegin. Flutningur í hesi grein fevnir um alla tilgongdina: Tá ið djórini verða koyrd í flutningseindina, sjálvur flutningurin, møguligir steðgir á leiðini og tá ið djórini verða tikin úr flutningseindini. Hetta er galdandi fyri øll djór.

Ein fyritreyt fyri at flyta djór er, at tað er sannlíkt, at flutningurin kann gerast á hóskandi hátt eftir umstøðunum, djórið er í. Eitt nú er ikki loyvt at binda seyð niður, sbr. kunngerð um vernd av djórum undir flutningi, men kortini er tað í ávísum førum neyðugt at binda seyð niður, skal flutningurin vera tryggur. Í slíkum førum skal niðurbindingin vera so stutt sum gjørligt, og loyvt er bara at brúka bleytar grímur ella høft, t.d. ullarhaft.

Viðkomandi í hesum sambandi er heilsustøðan hjá djórinum, og um djórið júst hevur verið ella er um at vera fyri burði. Sjúk djór eiga bara at verða flutt, um sannlíkt er, at tað er tað besta fyri djórið, t.d. fyri at fáa tað til djóralækna.

Flutningstíðin kann ávirka djóravælferðina, og tí skal flutningstíðin verða hóskandi fyri djórið. Markið fyri, nær flutningstíðin verður mett hóskandi, kann ásetast í kunngerð, og markið kann broytast í samsvari við nýggja og betri vitan. Yvirhøvur eigur at verða strembað eftir, at flutningurin ikki tekur longri tíð enn neyðugt. Hóskandi flutningstíð er treytað av flutningsumstøðunum, t.d. veðrinum, umstøðunum í flutningseindini, t.d. luftskifti, djóratættleika og flutningstíð, og støðuni hjá djórinum sjálvum, t.d. aldur og heilsustøða.

Ásett verður í stk. 2, at flutningseindin skal vera egnað at flyta djór, og støðið verður tikið bæði í djóravælferðini og í trygdini hjá djórinum, meðan tað verður flutt. Hetta merkir, at flutningseindin skal vera gjørd soleiðis, at djórini ikki eru í vanda fyri at verða kroyst ella á annan hátt kunnu verða fyri skaða. Verða fleiri djór flutt samstundis, skal bera til at skilja djórini hvørt frá øðrum, t.d. við skilaveggum. Flutningseindin skal eisini hóska til veðrið, og lasting og lossing skal leggjast til rættis soleiðis, at djórini í mest møguligan mun sleppa undan óneyðugari strongd og ótta. Djórini skulu vera undir neyðugum eftirliti og fáa neyðuga røkt, meðan tey verða flutt, soleiðis at til ber at fyribyrgja óhepnum støðum. Kravið hevur m.a. við sær, at tann, sum flytur djórið, skal ansa eftir, at djórini hava nøktandi luftskifti og pláss, at hitin er tann rætti, og at djórini fáa føði og vætu, tá tørvur er á tí.

Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur í kunngerð. Slíkar reglur eru frammanundan ásettar í kunngerð um vernd av djórum undir flutningi.

**Til § 9**
Ásetingin er í høvuðsheitum tann sama sum í djóraverndarlógini, men ásetingin er meira nágreinilig. Ásetingin er galdandi fyri øll djór, sum lógin fevnir um.

Stk. 1 ásetur, at djór skulu handfarast og avlívast upp á djóravælferðarligan fullgóðan hátt. Ásett verður, at bæði handfaringin av djórinum í sambandi við avlíving, undir hesum eisini møgulig doyving, og sjálv avlívingin skulu gerast við fyriliti fyri djóravælferðini. Hóskandi avlívingarháttur er treytaður av galdandi vitan um djóraslagið, menningarstigið og ymsu avlívingarhættirnar. Er vitanin um hóskandi avlívingarhátt fyri eitt ávíst djóraslag avmarkað, skal avlívingarhátturin veljast fyri varsemi. Hóskandi avlíving treytar eisini neyðugar førleikar hjá teimum, ið fremja avlívingina, sbr. meginregluna um førleikar í lógini. Verður dentur einans lagdur á sjálva avlívingina, kann tað hava við sær, at djóravælferðin í avlívingarstøðuni versnar, tí handfaringin av djórinum ella umstøðurnar hjá djórinum ikki eru tær best møguligu í støðuni. Dømi um hetta er ótti, grundaður á tvingsil, ið kann streingja

djórið meira enn avlívingin sjálv. Tískil er nágreinað í lógini, at eisini handfaringin av djórinum skal gerast við fyriliti fyri djóravælferðini.

Munur er á hóskandi avlíving alt eftir, um talan er um avlíving av djórum í djórahaldi ella avlíving í sambandi við veiðu og fiskiveiðu. Tað ber ikki til at seta somu krøv um neyvleika og fyrilit, tá ið djór verða avlívað á veiðu ella fiskiveiðu, sum tá ið djór í ella frá einum djórahaldi verða avlívað. Kortini eigur avlívingin mest møguligt at hava fyrilit fyri djóravælferðini. Fiskur, sum verður tikin upp ein og ein, kann avlívast beinanvegin. Hetta er t.d. galdandi við línuveiðu, har toskur og seiður verður blóðgaður. Í royndum ber illa til at avlíva villan fisk, sum verður fiskaður í stórum nøgdum í senn.

Í stk. 1, 2. pkt., er ásett, at doyvingar- ella avlívingarútgerð skal vera egnað til endamálið, og at útgerðin skal haldast viðlíka, so minkað verður um vandan fyri, at útgerðin er ófullfíggjað ella slitin. Slík brek kunnu elva djórinum stórar líðingar. Saman við førleikakravinum og ábyrgdarkravinum skal hetta tryggja, at øll djór verða doyvd og avlívað á hóskandi hátt í mun til djóravælferð. Brúkarin, nevndur í ásetingini, fevnir um bæði tann, sum brúkar útgerðina, og tann, sum hevur ábyrgdina av avlívingini, t.d. leiðarin á einum sláturvirki.

Eisini tá ið talan er um veiðu og fiskiveiðu av villum djórum, skal avlívingin vera hóskandi. Hetta merkir m.a., at útgerðin, sum verður brúkt til veiðu og fiskiveiðu, skal vera egnað og hildin viðlíka. Kravið um egnaða doyvingarútgerð er ikki viðkomandi í hesum sambandi, tí kravið um doyving er bara galdandi fyri djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki, sbr. stk. 2.

Stk. 2 fevnir bara um djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki. Ásetingin er galdandi fyri bæði landdjór og akvatisk djór. Kravt verður, at djórið verður doyvt, áðrenn tað verður avlívað uttan so, at djórið verður avlívað soleiðis, at djórið missir vitið beinanvegin. Dømi um hetta er seyður, sum verður doyvdur við píkabyrsu, áðrenn hann verður svavdur, gás, sum verður doyvd við slagi í høvdið ella við eletriskum stoyti, og fuglur, har høvdið verður høgt av. Ásett verður somuleiðis, at loyvt er ikki at drepa djór við at drukna tey. Henda áseting er tikin við, tí tað er ikki óvanligt, at djór verða avlívað á henda hátt. Hesin avlívingarháttur verður ikki mettur hóskandi í mun til djóravælferð. Eisini aðrir avlívingarhættir verða mettir at vera óhóskandi, tó at teir ikki eru nevndir beinleiðis, og loyvt er t.d. ikki at blaka hund fyri bakka ella at drepa djór við gassi frá útstoyti. Kravið um, at djórið skal verða doyvt, áðrenn tað verður avlívað, skal tryggja, at djórið er uttan vit, áðrenn avlívingin byrjar, og til djórið er deytt. Fyri at tryggja hetta, eigur avlívingin at gerast so skjótt sum til ber, eftir at djórið er doyvt.

Doyvingarhátturin skal vera hóskandi í mun til djóravælferð, sbr. stk. 1, og skal gera, at djórið missir vitið og ikki kennir pínu. Hetta merkir, at doyvingarhátturin annaðhvørt skal virka beinanvegin ella stutt eftir byrjan, og at doyvingarhátturin ikki skal geva djórinum munandi trega.

Í stk. 3 er ásett, at bráðneyðug avlíving mest møguligt skal gerast í samsvari við ásetingarnar í stk. 1 og 2. Bráðneyðug avlíving kann gerast átrokandi, um djórið er sjúkt, skatt ella hjálparleyst av øðrum orsøkum. Í slíkum støðum skulu vanligu reglurnar fyri avlíving fylgjast so væl, sum til ber. Er talan um avlíving í sambandi við niðurberjing av álvarsligum smittandi

sjúkum, kann talið av djórum, sum skulu avlívast, gerast høgt, og serligt fyrilit fyri smittu eigur at verða havt. Í slíkum førum kann gerast neyðugt at víkja frá vanligu krøvunum til avlíving, og metast má um, hvørt vandin fyri at spjaða smittandi sjúku skal ganga fram um fyrilitið fyri djóravælferðini í sambandi við avlíving. Við hóskandi tilbúgvingarætlanum ber til at meta um støðuna frammanundan, eins og til ber at hava eina greiða ætlan, verður tað viðkomandi.

Ásetingin verður eisini at brúka, tá ið talan er um at avlíva djór eftir § 4 fyri at lúka hjálparskylduna. Tann einstaki má meta um, hvørt tað er rætt at avlíva djórið, m.a. við fyriliti fyri djórinum, skaðanum, egnum førleikum og møguleikanum at fáa djórið til djóralækna ella fáa fatur á fólki, ið hava neyðugu førleikarnar. Er viðkomandi ikki førur fyri at avlíva djórið á hóskandi hátt, kann hann í staðin elva djórinum størri líðingar.

Í stk. 4 verður bannað at avlíva djór sum sjálvstøðugan part av undirhaldi ella kapping. Hetta fevnir um støður, har sjálv avlívingin er undirhaldið ella kappingin, og uttan mun til, um áskoðarar eru til staðar ella ikki. Vanlig veiða og fiskiveiða er ikki fevnt av hesum banni. Onnur tiltøk, har avlívingin ikki er ein sjálvstøðugur partur, eru heldur ikki fevnd av hesum banni. Talan kann t.d. vera um fiskikappingar, har fiskurin verður avlívaður sum neyðug avleiðing av kappingini. Tað sama er galdandi, um seyður verður dripin og flettur fyri at vísa skúlanæmingum og øðrum, hvussu flett og hagreitt verður.

Landsstýrismanninum verður í stk. 5 heimilað at áseta nærri reglur í kunngerð, undir hesum eisini krøv um útgerð, staðseting og handfaring í sambandi við avlíving, eins og landsstýrismaðurin kann áseta og avmarka lógligar avlívingarhættir. Við heimild í hesi kunngerð kunnu ásetast reglur, sum hava til endamáls at minka um talið av vanligum skaðadjórum, t.d. mús og rottu. Heimild er eisini at geva undantak frá kravinum í stk. 2 um, at djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki, skulu doyvast, áðrenn tey verða avlívað.

**Til § 10**
Ásetingin er nýggj. Í stk. 1 verður ásett, at loyvi krevst at ala, hava, selja ella lata, avlíva ella brúka djór til royndir, til undirvísing, sbr. tó niðanfyri, ella til medisinskt virksemi. Loyvi krevst ikki, um endamálið er at brúka djór í sambandi við undirvísing í vanligari røkt og handfaring. Slík undirvísing fevnir t.d. um landbúnaðarskeið, undirvísing á ríðiskúlum og undirvísing, tá ið hundar verða vandir.

Loyviskravið er galdandi fyri bæði stovnin, fyritøkuna o.tíl., eins og fyri tann, sum hevur ábyrgdina av virkseminum. Loyviskravið er avmarkað til tey føri, har virksemið hevur til endamáls at brúka djórið ella avkom tess í royndum, undirvísing ella medisinskum virksemi. Treytir, sum verða settar slíkum virksemi, kunnu fevna um øll djórini á stovninum ella í fyritøkuni o.tíl. uttan mun til, um øll djórini eru ætlað at brúka ella verða brúkt til royndir.

At brúka djór til royndir merkir, at djórini verða brúkt til at fáa vitan ella at vátta vitan, sum var kend frammanundan, av lívfrøðiligum, sálarligum, atferðarfrøðiligum, kropsligum ella evnafrøðiligum slag, eisini tá ið hetta er partur av undirvísing. Djór, sum verða brúkt at framleiða royndarevni, so sum antigen og andevni o.tíl., til sjúkuavgerð, til eftirlitsvirksemi og fyri at grundleggja ílegutillagað djórasløg, kunnu eisini verða fevnd av hugtakinum

*medisinskt virksemi*. Tað sama er galdandi fyri at brúka djór, eisini klonað djór, fyri at menna ella framleiða heilivág og onnur evnafrøðilig evni, ella fyri at framleiða livandi kyknur, vevnað og yrkisgøgn.

Eisini aðrar royndir, sum hava til endamáls at fáa til vega ella vátta vitan, eru fevndar av loyviskravinum, um royndirnar hava við sær inntriv ella á annan hátt manipulera djórið ella umstøðurnar hjá djórinum á ein slíkan hátt, at tað ávirkar djórið negativt ella skapar eina ólívføra (ófysiologiska) støðu.

At brúka kyknur, vevnað ella yrkisgøgn frá djórum, sum eru ald ella havd við tí endamáli at brúka til royndir, undirvísing ella medisinskt virksemi, krevur sama loyvi, sum tá ið livandi djór verða brúkt til hesi endamál. Loyvi krevst ikki til at brúka tilfar frá djórum, sum ikki eru ald ella havd við tí endamáli at brúka til royndir, undirvísing ella medisinskt virksemi.

Loyviskravið, tá ið talan er um aðra undirvísing enn vanliga røkt og handfaring, er t.d. galdandi, tá ið talan er um royndarlíknandi virksemi, sum er partur av undirvísingini í lívfrøðiligum lærugreinum.

Loyviskravið er ikki galdandi, um djór verða brúkt í undirvísing av t.d. djóralæknum og fiskaheilsubiologum, tá ið djórið fær vanliga sjúku- ella skaðaviðgerð. Tað sama er galdandi, um djór, sum ikki eru avlívað í sambandi við royndir, verða skorin upp ella líkkannað. Vanligt virksemi á gørðum, at djór í djórahaldi verða sýnd fram fyri barnagørðum, skúlum ella almenninginum, ella at undirvíst verður í ríðing á ríðiskúlum, verður ikki roknað sum at brúka djór í undirvísing og krevur tí ikki loyvi.

Landsdjóralæknin letur slík loyvi. Tá ið metast skal um, hvørt loyvi skal latast, skal gerast ein fakligt og etisk meting av stovninum ella fyritøkuni og ítøkiliga virkseminum. Metast skal um, hvørt umsøkjarin hevur neyðugar førleikar til royndina, og metingin skal taka støðu til, um nyttuvirðið fyri samfelagið skal ganga fram um negativu árinini á djórið. Dentur skal m.a. leggjast á kropsligu og sálarligu árinini á djórið bæði frammanundan, ímeðan og eftir, at royndin er gjørd, um royndin er samfelagsgagnlig, um hóskandi pínumátingar verða brúktar, um vandi er fyri pínu, um nóg góð doyving og pínuviðgerð verður brúkt, og um góðir møguleikar eru at gera greiðar niðurstøður. Tann, ið søkir um loyvi, skal lata landsdjóralæknanum allar neyðugar og viðkomandi upplýsingar. Er talan um skurðviðgerð, skal tað upplýsast, eins og upplýsast skal um førleikan, viðkomandi hevur at skurðviðgera. Loyvið, sum verður givið, tá ið royndardjór verða ald, hildin ella seld ella latin, skal vera avmarkað til ávíst virksemi, sum eisini er avmarkað í vavi og tíð. Á sama hátt skulu loyvi, sum snúgva seg um undirvísing, verða avmarkað. Neyvari treytir um umsóknarmannagongdir og treytir verða at áseta í kunngerð, sbr. stk. 4.

Stk. 2 ásetur, at loyvi verður ikki latið, um endamálið kann røkkast uttan at brúka djór, ella um djórini verða fyri óneyðugum trega. Loyvt er ikki at brúka fleiri djór enn neyðugt, og djórini, sum verða brúkt, skulu vera fyri minst møguligum árinum. Hetta er í samsvari við vanligu meginreglurnar í royndarvirksemi, har strembast skal eftir at sleppa undan at brúka djór (replacement), at brúka so fá djór sum gjørligt (reduction) og at hava miðvísar og betraðar royndir (refinement).

Stk. 3 ásetur, at víkjast kann frá ásetingunum í løgtingslóg um djóralæknavirksemi v.m. soleiðis, at onnur enn djóralæknar kunnu geva lokala ella fulla doyving. Slíkt undantak er viðkomandi, um tann, sum skal gera royndina, hevur nóg góðan fakligan førleika at tryggja, at doyvingin og inntrivini kunnu gerast eins væl, sum var tað ein djóralækni.

Landsstýrismanninum verður í stk. 4 heimilað at áseta nærri reglur um djór, sum verða brúkt til royndir, undirvísing og medisinskt virksemi, undir hesum at seta forboð fyri at brúka ávís djór og at gera ávísar royndir. Heimild er eisini at loyva undantøkum frá kravinum um loyvi. Henda heimild er fyrst og fremst ætlað at sleppa ávísum virksemi, sum sambært ásetingini krevur loyvi, undan hesum kravi, tí inntrivið er so mikið lítið, at tað ikki er skynsamt at krevja serligt loyvi.

**Til § 11**
Ásetingin er ein nágreining av galdandi rætti, men er eisini víðkað sammett við tað, sum var galdandi frammanundan. Sum nakað nýtt er ásett, at kynsligt samband við djór og kynsligar gerðir við djórum eru bannaðar uttan mun til hvørja ávirkan, tær hava ella hava havt á djórið.

Stk. 1, nr. 1 fevnir um harðskap móti djórum, t.e. gerðir, sum eftir almennum samfelagsmorali eru átaluverdar. Kjarnin í harðskapi er, at tann, sum tilvitað ella ótilvitað er harðligur móti djórum, elvir djórinum pínu, ampa ella trega, ella á annan hátt letur djórið vera fyri ógvusligari ávirkan, ið er óneyðug fyri djórið ella fyri onnur lóglig endamál. Harðskapur kann elva til ampa og trega av kropsligum og sálarligum slag. Dømi um hetta eru skaðar og pína. Harðskapur er ofta bæði sálarligur og kropsligur, men djór kunnu gerast bangin og strongd, uttan at talan er um kropsligan harðskap. Dømi um slíkan sálarligan harðskap kunnu vera órógv, ótti, angist, strongd og onnur sálarlig ávirkan, sum kann elva til verri vælferð.

Kropsligur harðskapur fevnir m.a. um at sláa, sparka, klípa, bíta, brenna og frysta, eins og kropsligur harðskapur kann koma fyri, um útgerð og óneyðugur tvingsil verður brúktur at reka djór ov hart o.tíl. Óløglig nýtsla av venjingarútgerð, ið elvir til pínu, kann vera eitt dømi um harðskap móti djórinum. Dømi um slíka útgerð eru m.a. píkahelsi og elektrisk helsi, sum geva hundinum stoyt, um hann t.d. goyr. Allir skaðar, bæði innvortis og útvortis, eru fevndir av hugtakinum *kropsligur harðskapur*.

Orðingin *at fara illa við djórum* er truplari at allýsa og avmarka, men yvirskipað verður sipað til tey føri, har tað – eftir vanligu fatanini millum fólk, serliga fakfólk – verður farið soleiðis við djórinum, at djórið ikki hevur tað so gott, sum tað kundi. Eitt dømi um hetta kundi verið ovurgøðing, har djórum verður givið alt ov nógv fóður, uttan at talan er um beinleiðis at noyða fóður í djórið.

Stk. 1, nr. 2 fevnir um tey føri, har djór verða sett í eina hjálparleysa ella vandamikla støðu, ella har djór eru einsamøll og í eini støðu, har tey ikki eru før fyri at klára seg sjálv. Eitt dømi kann vera at hava djór inni í einum bili, har hitin nervar djórið nógv. Eitt annað dømi kann vera, tá ið djór verða slept út, meðan eigarin er burturstaddur, ella at djór verða koyrd út, so eigarin kann sleppa av við tey. At sleppa djórum hjá øðrum leysum kann somuleiðis verða fevnt av hesi áseting. Verður eitt djór slept út, uttan at djórið verður sett í eina hjálparleysa støðu, kann hetta koma undir almennu ásetingina um, at loyvt er ikki at sleppa djórum út í

náttúruna. Ásetingin fevnir eisini um tey føri, har tann, ið hevur elvt einum djóri skaða, ikki veitir djórinum neyðuga hjálp.

Stk. 1, nr. 3 fevnir um kynsligt samband við djór og kynsligar gerðir við djórum, og er galdandi uttan mun til, um djórið hevur verið fyri skaða ella ampa í hesum sambandi. Kjarnuøkið er, tá ið menniskju brúka djór fyri á onkran hátt at nøkta sín egna kynsliga tørv. Ásetingarnar um kynslig brotsverk í revsilógini og tulkingin av hesum ásetingum kunnu brúkast vegleiðandi, tá ið metast skal um, hvørt ein gerð er fevnd av forboðnum. Eins og í revsilógini er tað ikki ein treyt, at gerðin er kynsliga grundað. Harðskapur móti djórum í sambandi við kynsligar gerðir kann vera fevnt at bæði hesi áseting og ásetingini í nr. 1 um harðskap. At taka sáð, at ísáa og aðrar neyðugar mannagongdir í sambandi við aling og nøring verða ikki roknaðar sum kynsligar gerðir eftir hesi áseting.

Eftir stk. 1, nr. 4 er bannað at brúka livandi djór sum fóður ella agn til onnur djór. Eitt dømi um hetta er at brúka livandi mýs og rottur sum fóður til slangur. At eta livandi djór er fevnt av øðrum ásetingum, undir hesum eisini ásetingini í stk. 1, nr. 1 um harðskap. Djór, sum ikki eru partur av virkisøki lógarinnar, eru ikki fevnd av hesum banni. Sum dømi kunnu nevnast skeljadjór og reyðmaðkur.

Eftir stk. 1, nr. 5 er ikki loyvt at skjóta kóp og størri havdjór við høgli. Hetta er grundað á, at slík avlíving ikki er í samsvari við meginregluna um, at djór skulu avlívast á ein hátt, sum er hóskandi í mun til djóravælferð. Sama forboð er ásett í § 3, nr. 9 í djóraverndarlógini.
Eftir stk. 1, nr. 6 er ikki loyvt at avlíva djór sum part av undirhaldi ella kapping, tí slík avlíving er ikki í samsvari við meginregluna um, at djór skulu avlívast á ein hátt, sum er hóskandi í mun til djóravælferð, sbr. tó § 26. Sama er ásett í § 3, nr. 8 í djóraverndarlógini.

Sambært stk. 1, nr. 7 er ikki loyvt at brúka krafttól, sum ikki eru góðkend til endamálið, og rossadrátt at avloysa djór við burð. Hetta sipar einamest til burðarhjálp til kúgv, tá ið kálvurin er ov stórur ella liggur skeivt, og tað kann vera neyðugt at hjálpa kúnni at kálva. At menn hava band ella ketu um beinini á kálvinum nervar hvørki kúgv ella kálv stórvegis. Hinvegin er bannað at seta talju ella aðra kraft á, tí tá ber ikki til at fylgja við, hvussu stór dráttarmegin er. Hetta kann vera til stóran skaða fyri bæði kúgv og kálv, og hevur óneyðuga pínu við sær. Sama er ásett í § 3, nr. 5 í djóraverndarlógini.

Í stk. 1, nr. 8 verður forboð sett fyri at benda horn á seyði við nakkaspenni ella á annan hátt. At benda horn á henda hátt hevur við sær óneyðuga pínu, og kann í ringasta føri hava við sær, at nakkin klovnar. Kortini er loyvt at benda við fjarðastáli ytst á hornunum. Sama regla er ásett í § 3, nr. 6 í djóraverndarlógini.

**Til § 12**
Ásetingin er nýggj. Stk. 1 fevnir um bygningar, girðingar og aðrar smærri innrættingar, sum kunnu vera ein vandi fyri vælferðina hjá djórum; hetta uttan mun til, um bygningurin ella girðingin er gjørd til djór ella ikki. Ásett verður ein alment galdandi skylda at byggja, gera og halda viðlíka slíkar innrættingar, so djór ikki verða nervað óneyðugt. Verandi girðingar skulu haldast viðlíka, og kravið um at halda viðlíka fevnir eisini um skylduna at rudda upp, tá ið bygningar, girðingar o.tíl. ikki longur verður brúkt.

Ásetingin er ikki so umfatandi, at hon forðar fyri samfelagsmenning, men ásetur eina skyldu at seta í verk neyðug tiltøk fyri at minka um vandan fyri, at djór verða nervað óneyðugt, tá ið bygningar, girðingar o.a. verður gjørt. Ásetingin merkir m.a., at tann, ið stendur fyri at gera bygningar o.tíl., skal ansa eftir, at tað mest møguligt slepst undan, at djór fáa skaða.

Ábyrgdin hjá teimum, sum hava bygningar, girðingar o.tíl., avmarkar ikki ábyrgdina hjá teimum, ið hava djór. Tann, ið hevur djór, skal verja síni egnu djór móti vandum, hóast hesin vandi kann standast av, at tey, ið hava ábyrgdina av bygningum o.tíl., ikki røkja skyldur sínar eftir hesi áseting.

Um girðingar skal serliga viðmerkjast, at reglur um hetta eru ásettar í girðingarlógini (Lov om Hegn og Markfred). Ósemja um hesi viðurskifti verður at taka upp við Hegnsýnisnevndina á staðnum.

Ásetingin í stk. 2 um, at eftirlit skal havast við bygningum, girðingum o.tíl., merkir, at tað skal gerast ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri, og kravið um eftirlit skal metast í mun til vandan fyri, at djór verða nervað. Er talan um størri vanda, krevst í útgangsstøði meira eftirlit.

Við heimild í stk. 3 kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur í kunngerð. Talan kann vera um nærri reglur um tilfar, slag av girðing o.tíl. Ætlanin er ikki at áseta beinleiðis byggitøknilig krøv. Um tað er viðkomandi at seta slík krøv, skal hetta gerast í samsvari við viðkomandi reglur og samskipast við avvarðandi myndugleika. Reglur kunnu eisini ásetast um at umvæla ella taka burtur innrættingar ella leivdir av innrættingum.

Við heimild í hesi áseting kann landsstýrismaðurin eisini áseta nærri reglur um stødd á búrum til t.d. kaninir og onnur smærri loðdjór.

**Til § 13**
Talan er um eina nýggja áseting, tó at meginreglan frammanundan er at finna í djóraverndarlógini.

Stk. 1 ásetur, at veiða og fiskiveiða skal, alt tað ber til, útinnast á ein hátt, sum er hóskandi í mun til djóravælferð. Djóravælferðin er treytað av tí djóraslagi, talan er um. Greinin snýr seg einans um at veiða og fiska vill djór, og tað er landsstýrismaðurin, ið varðar av hesum øki, ið ásetur nærri reglur. Tað, sum verður mett hóskandi eftir viðkomandi lóggávu, t.e. m.a. fiskivinnulóggávuni, grindalóggávuni og lóggávuni um fugla- og haruveiðu, verður vanliga eisini mett hóskandi eftir djóravælferðarlógini.

Tað ber í dag ikki til at siga við vissu, um teir veiðuhættir, ið verða brúktir í sambandi við fiskiskap, eru nøktandi til kravið um djóravælferð. Tó er trupult at seta krav um hóskandi fyrilit fyri avlívingina, tá ið talan er um at fiska stórar nøgdir av fiski. Kortini eiga veiðuhættirnir mest møguligt at hava fyrilit fyri djóravælferðini. Havast skal eisini í huga, at nýggj vitan kann hava við sær, at veiðuhættir, sum verða brúktir í dag, seinni ikki verða mettir at vera hóskandi.

Í stk. 3 verður heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur í kunngerð um at veiða ella fiska djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki. At djórini eru innibyrgd er ikki avgerandi, tá ið metast skal um, hvørt djórini eru í varðveitslu hjá fólki. Djór, sum onkur eigur, og sum eru undir ávísum eftirliti og røkt, t.e. djór, sum verða fóðrað, koppsett, ald o.tíl., eru fevnd av ásetingini; dømi um hetta er hagaseyður. Djór, sum eru slept út í náttúruna, eru ikki fevnd av ásetingini. Ásetingin hevur til endamáls at tryggja, at veiðan ella fiskiveiðan fer fram í einum umhvørvi, sum er so natúrligt sum gjørligt, so virksemið nervar djórið sum minst. Eitt dømi um hetta eru síl, sum verða ald og síðani slept í sleppingarvøtn (put-and-take vøtn) við tí endamáli, at tey seinni verða fiskað.

Veiða ella fiskiveiða eftir djórum, sum eru partur av einum djórahaldi, eru ikki fevnd av forboðnum í § 9, stk. 4 um, at djór mugu ikki verða avlívað sum partur av undirhaldi ella kapping, um avlívingin er meginendamálið. Víst verður til viðmerkingarnar til § 9.

**Til § 14**
Ásetingin er nýggj.

Heimilað verður landsstýrismanninum í fiskivinnu- og landbúnaðarmálum at áseta reglur um at taka og handfara vill djór. Heimild er m.a. fyri at áseta nærri reglur um t.d. merking av villum djórum, royndartøku og stovnseftirlit og -røkt. Heimild er eisini fyri at treyta ella banna ávísum virksemi.

**Til § 15**
Ásetingin er nýggj.

Við hesi áseting verður bannað at sleppa djórum út í náttúruna, um tey ikki natúrliga hoyra heima í føroysku náttúruni, ella um orsøk er til at halda, at djórini eru ella kunnu vera natúrliga stovninum, øðrum djórastovnum ella plantulívinum at bága.

Heimildin at sleppa ávísum djórum í náttúruna skal tulkast avmarkandi, og er ivi um, hvørt eitt djór kann hava negativa ávirkan á føroysku náttúruna, djóra- ella plantulívið, skal djórið als ikki sleppast út í náttúruna.

Djórini, sum talan er um, kunnu bæði vera eksotisk djór, sum ikki hoyra natúrliga heima í føroysku náttúruni, og djór, sum hóast tey eru natúrlig í Føroyum, kunnu vera øðrum djórum ella plantulívinum at bága. Seinna førið fevnir t.d. um kettur, ið gerast útiløgukattar, ið kunnu vera fuglalívinum at bága, ella rottur, ið eru beinleiðis skaðadjór.

Stk. 2 ásetur, at djór frá djórahaldi bert kunnu sleppast út í náttúruna, um endamálið er, at tey gerast vill djór, og um mett verður, at djórið hevur góðar møguleikar at laga seg eftir umstøðunum og at koma undan í nýggja umhvørvinum. At sleppa djórum, ið hava livað í djórahaldi, út í náttúruna kann vera ein avbjóðing, og ansast skal eftir, at hetta ikki elvir djórinum mein ella bága. Forboðið at koma djórum í eina hjálparleysa støðu kann gerast viðkomandi, um djór verða sett út í stríð við hesa áseting.

Dentur skal leggjast á, at stk. 2 bara er galdandi fyri djór, sum eru natúrliga heimahoyrandi í føroysku náttúruni.

Vill djór, sum fyribils hava verið í varðveitslu hjá fólki vegna t.d. skaða ella sjúku, og sum síðani verða slept út aftur í náttúruna, eru ikki fevnd av hesi áseting.

Landsstýrismanninum er heimilað sbrt. stk. 3 at áseta nærri reglur í kunngerð, undir hesum eisini áseta treytir ella bann fyri at seta ávís djór ella djórasløg út í náttúruna.

**Kapittul 2: Serligar ásetingar um djórahald**

**Til § 16**
Ásetingin er nýggj.

Í stk. 1 verður ásett grundleggjandi treytin fyri at halda djór. At halda djór (djórahald) merkir í hesum føri, at djórini støðugt verða hildin í djórahaldi, t.e. í varðveitslu hjá fólki. Seyður, sum gongur í haganum, verður eisini mettur at vera í varðveitslu hjá fólki, hóast seyðurin ikki er undir støðugum eftirliti. Ásetingin forðar ikki fyri, at djórasløg, sum ikki áður hava verið hildin í djórahaldi, kunnu haldast í djórahaldi, men ásetingin hevur ta avmarking, at djór kunnu bara haldast í djórahaldi, um djórini eru før fyri at laga seg til haldið á ein hátt, sum er hóskandi í mun til djóravælferð. Hetta krevur serligt ansni, tá ið talan er um djór, sum ikki eru von at vera partur av einum djórahaldi. Verður farið undir at halda hesi djór í djórahaldi, skulu viðurskiftini frammanundan verða løgd so mikið væl til rættis, at broytingin fyri djórini ikki gerst ov stór. Ásetingin er m.a. viðkomandi, tá ið tryggjast skal, at vill landdjór og akvatisk djór, sum verða tikin inn í djóragarðar ella sjódýrasøvn, eru før fyri at laga seg til umstøðurnar, og at øll neyðug fyrilit eru tikin.

Partur av at halda djór á djóravælferðarligan fullgóðan hátt merkir eisini, at tann, sum hevur djórið ella djórini, skal fáa sær viðkomandi vitan um djórið og djóraslagið soleiðis, at djórið trívist.

At taka sjúk ella skadd djór inn fyri at lekja ella røkta tey við tí endamáli at seta tey út aftur í náttúruna er loyvt sambært lógini. Eru sannlíkindini fyri, at djórið fer at koma fyri seg, vánalig, ella er vandi fyri, at djórið ikki fer at klára seg, um tað verður sett út aftur, eigur djórið at verða avlívað. Við støði í djóravælferðini ber til at siga, at tað oftari er neyðugt at avlíva vill djór, sum eru sjúk ella skadd, enn tom djór, ið hava somu sjúku ella sama skaða, men sum eru í varðveitslu hjá fólki. Vill djór, sum verða tikin í varðveitslu hjá fólki vegna sjúku ella skaða, kunnu verða nervað av hesum, og hetta kann eisini hava týdning fyri, um tey aftur gerast før fyri at klára seg í náttúruni. Slík varðveitsla eigur tí at vera so stutt sum gjørligt. Er talan um sjáldsom djór ella hótt djór, kann tað av hesum orsøkum gerast neyðugt at góðtaka, at djórini verða nervað, ella at tey eru longur í varðveitslu hjá fólki.

Ásetingin fevnir bæði um djórasløg og einstøk djór. Djóravælferð tekur støði í einstaka djórinum, og tað kann vera stórur munur í evnunum hjá einstaka djórinum at laga seg til umstøðurnar.

Í stk. 2 verður heimilað landsstýrismaðurin í kunngerð at áseta reglur um, hvussu gomul djór í minsta lagi skulu vera, áðrenn tey verða latin fólki. Ásetingin er serliga viðkomandi fyri hundahvølpar og kettlingar, og aðrastaðni er galdandi, at hundahvølpar skulu vera hjá tíkini, til teir eru í minsta lagi 8 vikur gamlir, og at kettlingar skulu vera hjá løðuni, til teir eru í minsta lagi 12 vikur gamlir.

Heimild landsstýrismansins er grundað á, at tað ofta kemur fyri, at hvølpar verða tiknir ov tíðliga, og tað hevur stórar negativar avleiðingar fyri hundin seinni. Tær seinastu vikurnar, tá ið hvølparnir eru hjá tíkini, verða hvølparnir uppaldir og búnaðir at fara frá tíkini, og tá læra hvølparnir teir sosialu førleikarnar, sum seinni eru so avgerandi í sambandinum og samspælinum millum hund og fólk. Doyr tíkin, er umráðandi, at hvølparnir eru saman við hinum hvølpunum hesa tíðina, so teir hvør av øðrum læra sosialu førleikarnar. Trupulleikarnir av, at ein hvølpur verður tikin ov tíðliga, síggjast kortini ikki beinanvegin, men tá ið hvølpurin verður unghundur, koma trupulleikarnir fram. Tað er nærum ógjørligt – eisini hjá teimum, sum hava serliga útbúgving og vitan um hundar – at rætta hesar trupulleikar, og hundurin kemur sjáldan burtur úr trupulleikanum. Hetta er í minni mun galdandi fyri kettlingar, men kortini skulu kettlingar vera hjá løðuni, til teir eru 12 vikur gamlir, tí tástani eru teir førir fyri at fara frá løðuni. Landsstýrismaðurin ásetur hesar reglur í kunngerð.

Í stk. 3 verður heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur í kunngerð, undir hesum reglur um at avmarka ella banna ávísum djórahaldi, djórasløgum *(species)*, undirsløgum *(subspecies)*, ættarsløgum *(race)* og aligreinum. Víst verður í hesum sambandi til reglurnar um innflutning av eksotiskum dýrum og reglurnar um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidýrum.

**Til § 17**
Stk. 1 áleggur tí, ið hevur djórahald, skyldu til at tryggja, at djór – inni sum úti – eru í einum umhvørvi, sum í mun til trivnað og vælferð er hóskandi eftir tí tørvi, sum bæði djóraslagið og einstaka djórið hevur. Djórini skulu hava møguleika fyri skjóli, rásarúmi, rørslu, hvíld og aðrari natúrligari atferð.

Ásetingin fevnir um øll djór, sum eru partur av einum djórahaldi. Ásetingin hevur, saman við ásetingini í § 18, til endamáls at verja einstaka djórið í djórahaldinum. Nevnd verða tey grundleggjandi fyrilitini, sum skulu havast í mun til umhvørvi, men ítøkiligu krøvini valdast djóraslagið og einstaka djórið; hesi krøv kunnu broytast so hvørt, nýggj vitan er tøk. Krøvini eru ikki tey somu alla tíðina, og munur er á umhvørvinum, har djórið verður havt, og á tí umhvørvi, har djórið bara er í stutta tíð, áðrenn tað verður dripið. Umhvørvið kann partvíst verða mett eftir atferðini hjá djórinum, og umráðandi er at ansa eftir, at djórið hevur møguleika at útinna natúrliga atferð. Djórið kann kenna strongd og ampa, um tað ikki hevur møguleika at útinna natúrliga atferð, tí umhvørvið forðar fyri hesi atferð. Tí er umráðandi, at djórunum stendur í boði umhvørvi, sum letur tey útinna sína natúrligu atferð, t.d. at geva fugli møguleika at reiðrast.

Ásetingin skal tryggja, at djór verða havd í einum umhvørvi, sum gevur góða vælferð, og fevnir um viðurskifti bæði innan- og uttandura, m.a. luftgóðsku, vatngóðsku, lendi, gróður, ljósviðurskifti, møguleika at søkja sær skjól í ringum veðri og skugga í sól, atgongd til beiti,

føði og vatn. At sleppa undan sníkum og øðrum árinum, sum kunnu skerja lívsgóðskuna, eru eisini viðurskifti, sum hava týdning fyri umhvørvið, sum djórini eru í. Ansast skal eisini eftir, at djór, sum hava lágan status, hava møguleika at sleppa burtur frá ódligum djórum.

Umhvørvið skal lagast eftir tørvinum hjá djóraslagnum. Hetta merkir m.a., at leggjast skal upp fyri, at summi djór eru soliter og tí skulu haldast einsamøll, eins og leggjast skal upp fyri, at summi djórasløg eru floksdjór og hava tørv á at vera saman í flokki ella bólkum. Slíkt fyrilit er ikki neyðugt í øllum førum, tí eitt nú kann sosiali tørvurin hjá hundum nøktast við sambandi við fólk ella hundar hjá øðrum. Í hvønn mun, menniskjaligt samband kann koma í staðin fyri samband við djór av somu djóraætt er ymiskt, alt eftir djóraslagi og einstaka djórinum. Bara í serligum førum, t.d. í sambandi við sjúku, er ráðiligt at halda fenað burtur frá øðrum fenaði. Tað sama er galdandi fyri fleiri smádjór, t.d. undulátar og marsvín. Eisini ross eiga at hava møguleika fyri sambandi við onnur djór av sama djóraslagi, t.d. á beiti o.tíl. Floksdjór hava ofta tørv á støðugum bólkum, har djórini kenna hvørt annað og hava skipað seg innanhýsis, t.d. í einum hierarkii. Kortini kann tað vera neyðug at halda djór burturi frá flokkinum fyri at forða fyri, at tey nørast ella elva hvørjum øðrum skaða. Í einstøkum djórahaldum ella framleiðslum kann tað vera neyðugt at skilja móður og avkom hvørt frá øðrum fyrr enn tað, sum hevði verið natúrligt fyri djórini. Um hesin skilnaður hevur við sær sosiala avbyrging og vánaligan trivnað, skal tann, sum hevur djórini, seta neyðug tiltøk í verk.

Í aliframleiðslum, har fleiri einstakir fiskar verða hildnir, er vanligt, at tað eru lívfrøðilig frábrigdi í hópinum. Í einum stórum hópi eru altíð einstaklingar, ið eru øðrvísi, og sum eru ella verða mettir at vera sjúkir, rak o.s.fr. Í dagligu røktini skal slíkur fiskur takast úr hópinum og avlívast. Slíkar støður skulu eisini setast upp ímóti fyrilitinum fyri hinum djórunum í framleiðsluni, sum kunnu gerast óneyðuga strongd og missa mótstøðuføri móti lívfrøðiligum ella umhvørvisligum parametrum, sum koma uttanífrá.

Fyri at tryggja neyðuga tillaging til umhvørvið gjøgnum læru, er aloftast neyðugt at hava ung djór í samsvarandi umhvørvi, sum tað umhvørvið, tey skulu vera í sum vaksin. At flyta djór úr einum góðum umhvørvi til eitt verri umhvørvi kann hava við sær vánaliga vælferð og skal bara gerast, um tað ikki slepst undan.

Eitt gott umhvørvi hevur eisini týdning fyri trivnað og vælferð hjá fiski og øðrum akvatiskum djórum. Hetta merkir, at leggjast skal upp fyri øðrum umhvørviskrøvum enn bara heilsu og vatngóðsku, og at viðurskiftini skulu lagast eftir einstaka djóraslagnum. Botnfiskur skal t.d. vera í einum umhvørvi, har hann kann liggja á botninum í myrkri. Onnur týðandi umhvørviskrøv fyri fisk eru t.d. nóg stór vatnrúmd, hóskandi fiskatættleiki og hóskandi fiskasamanseting, so fiskarnir ikki eru til vanda fyri hvønn annan. Hesi krøvini eru fyrst og fremst galdandi fyri akvariufiskar, men eisini fyri villan fisk, ið verður tikin og havdur í djórahaldi (í varðveitslu).

Góðar liviumstøður skulu fremja góða heilsu, trygd og trivnað. Samstundis fer eitt avbjóðandi umhvørvi, t.d. tá ið djór eru á beiti, at seta størri krøv til heilsu og treysti djóranna. Tryggleiki djóranna fevnir um tørv djóranna at søkja sær skjól ella sosiala verju, um djórið gerst bangið ella um djórið vil sleppa undan ódligum djórum o.tíl. Kravt verður ikki, at djórið alla tíðina skal vera trygt, men at umhvørvið er soleiðis háttað, at tað stuðlar møguleika djórsins at

kenna seg trygt. Trivnaður djóranna skal fremjast, tí tað er eitt endamál í sjálvum sær og tí at økt fokus er á, at djór skulu hava tað gott og skulu kunna uppliva positivar kenslur. Er tíðum tørvur á heilivágsviðgerð ella skurðviðgerð í einum djórahaldi, kann hetta benda á, at umhvørvið og umstøðurnar annars ikki geva nóg góða vælferð.

Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um umhvørvið, undir hesum eisini reglur um egnað og trygg tilhaldsrúm. Egnað og trygg tilhaldsrúm eru ymisk, alt eftir djóraslagi, aldri og heilsu, eins og veðrið eisini hevur týdning. Egnað tilhaldsrúm skal vera turt og uttan gjóstur, og djórini skulu m.a. hava møguleika at standa og liggja. Talan kann vera um bygningar við veggjum og taki, men eisini seyðastøður ella –ból kunnu eftir umstøðunum vera egnað sum tilhaldsrúm. Tilhaldsrúmini skulu, tá tað er neyðugt, eisini vera brunatryggjað á hóskandi hátt, eins og tað eftir umstøðum og djóraslagi annars skal kunna bera til at bjarga djórunum úr rúminum, gerst tað neyðugt.

**Til § 18**
Tær skyldur, sum tann, ið hevur djórahaldið, hevur eftir hesi áseting, galda fyri øll sløg av djórahaldi, bæði landdjór og akvatisk djór uttan mun til, hvar hesi eru. Tann, ið hevur djórahaldið, skal tryggja, at djórini hava nøktandi eftirlit og røkt. Ásetingin skal tryggja, at djór fáa neyðuga verju, røkt ella viðgerð og, um neyðugt, verða avlívað.

Neyðug røkt fevnir um at halda bæði djórini og umhvørvið, har tey verða hildin, rein. Sum dømi kann nevnast, at seyður, sum ikki kastar ullina, eigur at verða roytttur hvørt ár í áseyðaroyting. Neyðugt eftirlit merkir eisini, at tann, ið hevur ábyrgdina, skal kunna varnast vandar og seta neyðug tiltøk í verk. Røkt og eftirlit er ymiskt, alt eftir djóri og djóraslagi, aldri, menningarstigi, temjingarstigi (domestiseringsstigi), kyni, heilsustøðu o.a, og nýfødd, veik ella sjúk djór kunnu t.d. hava meira hita og fóður fyri neyðini.

Fyri djór, sum ganga úti alt árið ella part av árinum, merkir ásetingin, at tann, ið hevur ábyrgdina, skal varnast vandar og hjálparleys, sjúk, rak ella skadd djór soleiðis, at til ber at seta neyðug tiltøk í verk, undir hesum neyðuga viðgerð ella at skipa fyri, at djórini verða avlívað fyri at forða fyri, at djórini eru fyri óneyðugari líðing í longri tíð. Skyldan at hava eftirlit við djórunum, tá ið tey eru á beiti, skal lagast til veðurviðurskiftini og annars viðurskiftini á staðnum, undir hesum til lendi, beiti, vandar á beitinum o.a. Um munandi váði er fyri, at djórini kunnu vera fyri vanda, skal neyvari eftirlit havast við djórunum. Í slíkum økjum kann tað, við støði í eini ítøkiligari váðameting, eisini vera tørvur á fyribyrgjandi tiltøkum, sbr. nr. 2 niðanfyri.

Hóast eftirlit í sjálvum sær ikki kann forða fyri øllum skaðum, sum t.d. standast av vanlukku, kann nøktandi eftirlit økja møguleikan fyri at varnast umstøður og viðurskifti, ið krevja tiltøk. Skyldan at tryggja, at djórini hava nøktandi eftirlit og røkt merkir eisini, at tann, ið hevur ábyrgdina av djórunum, skal ansa eftir, at djórini ikki eru einsamøll og uttan eftirlit i longri tíð á staði, sum ikki er hóskandi og trygt. Hetta forðar ikki fyri, at djór eru á beiti, men eftirlitsskyldan er eisini galdandi her. Henda skylda er frammanundan ásett í hagalógini (lov om Haugers Styrelse og Drift m.m.), tí allir hagar skulu hava í minsta lagi ein røktingarmann, sum skal standa fyri seyðarøktini, fjallgonguni, markingini og øllum øðrum arbeiði í haganum.

Um ætlanin er at gevast við djórahaldi, skal tað annaðhvørt gerast við at lata onkran annan taka ábyrgd av djórunum ella við at avlíva djórini. Tað er í stríð við hesa áseting at rýma frá djórunum ella á annan hátt halda uppat at røkja og fóðra tey og hava eftirlit við teimum uttan so, at tað verður gjørt í samsvari við ásetingarnar í hesi lóg ella ásetingar, givnar við heimild í hesi lóg.

Nr. 1 ásetur skylduna at tryggja, at fóður, beiti og vatn hava høga góðsku, nøkta tørvin á føði og vætu og fremja góða heilsu og vælferð. Hetta merkir m.a., at fóðurgóðska og -nøgd skal nøkta føðslutørvin, fremja góða heilsu, natúrligan vøkstur og menning, eins og djórini skulu kenna mettuna. Fóðurgóðskan skal vera heilsufrøðiliga nøktandi. Vandamikil evni mugu ikki vera í fóðrinum, og fóðrið skal vera í samsvari við ásetingar í matvørulógini og reglur, givnar við heimild í matvørulógini, um djórini eru ætlað til matna. Smakkur og aðrir eginleikar kunnu eisini hava týdning. Gevingin skal hóska til djóraslag, aldur, menningarstig, framleiðslu, nýtslu (t.d. til arbeiði) og støðuna annars (t.d. um djórini eru sjúk, ella um tey mjólka ella eru slept). Fóður og geving skulu eisini hóska til háttin, djórini natúrliga eta (tal av máltíðum, fóðurnøgd, fóðurtættleiki og gevingarháttur). Gevingarhátturin skal hava fyrilit fyri møguligari kapping millum djórini, og fóðrið skal vera egnað til djór, sum natúrliga brúka langa tíð um at eta soleiðis, at tað slepst undan vantrivnaði og ørkymlan. Fóður skal bæði gevast og goymast soleiðs, at djórini ikki óætlað kunnu koma at fóðrinum og oveta seg.

Drekkivatn til djór skal hava høga góðsku, t.e. serliga at djórini ikki gerast sjúk av vatninum, og nóg mikið av vatni skal gevast djórunum. Vatn skal vera tøkt alla tíðina ella gevast við jøvnum millumbilum, sum hóska til djóraslag, aldur, menningarstig og støðuna annars. Vatn skal eisini gevast soleiðis, at øll djórini fáa nóg mikið av vatni.

Kravið um, at beitið skal hava høga góðsku, er galdandi fyri øll djór, sum eru á beiti, og nágreinar alment galdandi skylduna at geva djórunum nóg mikið av fóðri. Beitið, ið verður brúkt sum partur av fóðurgrundarlagnum, skal hava høga góðsku og skal geva so mikið av fóðri, at tað hóskar til talið á djórum. Um beitið ikki nøktar fóðurtørvin, skal ískoytisfóður gevast. Ískoytisfóður kann eisini brúkast til at nøkta tørvin á vitamin- og mineralískoyti.

Nr. 1, síðsta pkt. ásetur bann fyri at noyða djór at eta ella at drekka uttan so, at tað eru djóraheilsuligar áneyðir fyri tí. Hóast tað kann vera djóraheilsuliga neyðugt, er ikki loyvt at tvinga meira enn neyðugt.

Nr. 2 áleggur tí, ið hevur ábyrgdina av djórunum, skyldu at verja djórið móti skaða, sjúku, síkum og øðrum vanda. Nr. 3 ásetur, at sjúk og skadd djór skulu fáa hóskandi viðgerð og verða avlívað um neyðugt.

Skyldan at verja djór móti vanda fevnir bæði um vanda, sum er staðfestur, og vanda, sum roknast kann við. Í hesum sambandi er viðkomandi at nevna, at ávísar sjúkur, síkar o.tíl. kunnu vera ein natúrligur partur av djóralívinum, og metast skal um tiltøkini, sum skulu setast í verk, í mun til bæði djóravælferð og praktisk viðurskifti. Um støðan eftir eini heildarmeting ikki er ráðilig í mun til djóravælferðina, skulu neyðug tiltøk setast í verk, hóast hetta kann vera trupult. Tað ber til at seta tiltøk í verk, tá ið vandi er staðfestur, ella tá ið roknast kann við vanda, og støðan ikki er soleiðis háttað, at tað ikki ber til at seta tiltøk í verk. Um djórini

eru á beiti, kann ikki roknast við, at tey fáa somu verju, sum vóru tey innandura. Harafturat kunnu viðurskiftini hava við sær, at tað ikki ber til at geva øllum djórum í einum fylgi verju beinanvegin og samstundis.

Kravið um verju er ikki absolutt. Ávís strongd ella ampi, sum djór kunnu vera fyri, tá ið tey eru á beiti, kunnu góðtakast, um fyrimunirnir við at hava djórini á beiti eru størri enn vansarnir. Er talan um beiti, sum er burturi frá húsum, verður mett um, hvussu og í hvønn mun strongdin ella ampin ávirkar djórini. Kravið um verju kann eisini metast í mun til talið av djórum, sum farast í økinum ella líknandi økjum, t.d. í feitilendi. Talið av djórum, sum farast, er bert ein av fleiri ábendingum, tá ið metast skal um, hvørt djórahaldið er ráðiligt. Kjarnin í metingini er, hvussu álvarsligt strongdin ella ampin ávirkar djórini. Bæði kropsligar og sálarligar ávirkanir, t.d. ótti og strongd, eru partur av metingini.

Kortini er mark fyri, hvussu álvarsliga strongd ella ampi, ella vandi fyri slíkum, kann góðtakast, og er økið, har djórini eru á beiti, í roynd og veru óegnað til endamálið, eigur økið ikki at verða brúkt til beiti.

Sjúka fevnir um alt tað, ið hevur negativ árin á djóraheilsuna, herímillum ígerðir og framleiðslutreytaðar sjúkur, ið standast av m.a. arvi, umhvørvi, síkum, eitran, hjáárinum av heilivágsviðgerð og føðslutroti.

Nr. 4 ásetur, at tann, ið hevur ábyrgdina av djórinum, skal tryggja, at smittubreiðslan verður avmarkað. Smittubreiðsla merkir, at møgulig sjúkuelvandi smittuevni verða flutt millum djór. At avmarka smittubreiðsluna merkir, at tann, ið ábyrgdina hevur, skal seta neyðug tiltøk í verk fyri at forða fyri smittubreiðslu. Skyldan er galdandi fyri smittubreiðslu til og frá djórum í egnum djórahaldi, smittubreiðslu til og frá djórum í øðrum djórahaldum og smittubreiðslu til og frá villum djórum. Djórasjúkulógin og reglur, givnar við heimild í henni, eru meginregluverkið, tá ið talan er um djórasjúkur, og tiltøk kunnu verða ávirkað ella avmarkað av djórasjúkulógini.

Nr. 5 staðfestir skylduna hjá tí, ið hevur ábyrgdina, at tryggja, at djór, har tað er viðkomandi, eru so mikið spøk, at tey kunnu handfarast og røktast á hóskandi hátt í mun til djóravælferðina. Ásetingin skal tryggja, at djór, um tað er viðkomandi fyri djóravælferðina, gerast von at hava samband við fólk og at verða handfarin av fólki. Hvussu spøk, djórini skulu vera, er treytað av djóraslagnum og endamálinum við djórahaldinum. Tað skal bera til at hava neyðugt eftirlit við djórunum og at handfara og røkta djórini.

Tað kann koma fyri, at vargur er komin í eitt fylgi, og at tað tí kann gerast neyðugt at skjóta djórini. Hetta kann koma fyri, um djórini eru burturi frá húsum í longri tíð, t.d. tá ið seyður er í bjargalendi. Í slíkum førum er loyvt at skjóta djórini, um ikki fæst fatur á teimum á annan hátt. Kortini eigur hetta ikki at koma fyri í høgum, ið eru høgligir at røkta, tí tá ber tað boð um, at hagin ikki er nóg væl røktaður.

Í stk. 2 verður heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur í kunngerð, undir hesum reglur um eftirlit við djórum og røkt av djórum, slag og tørv á eftirliti og røkt, og annars reglur um, hvussu djór skulu viðfarast. Sum dømi um slíkar reglur kann nevast, at tað í

kunngerð kann ásetast, at seyður skal roytast, og at feldur, tenn og kløur á hundi skulu røkjast.

**Til § 19**
Ásetingarnar í §§ 16-18 um djórahald eru galdandi fyri øll, sum hava djór. § 19 er bara galdandi fyri tann, sum rekur vinnuligt djórahald. Vinnuligt djórahald í hesum høpi verður nágreinað á tann hátt, at tann, sum við sølu og vinningi fyri eyga, elur, hevur, gagnnýtir og selur djór ella djóraúrdráttir ella tænastur, t.d. ríðiskúlar og djóravist, verður mettur at reka vinnuligt djórahald.

Vinnuligt djórahald fevnir um livandi djór, bæði nyttudjór sum seyð og neyt og stuttleikadjór sum hund og kettu. Eisini tey, sum hava djór við tí endamáli at selja úrdráttir, t.d. kjøt, egg, mjólk, skinn o.a., reka vinnuligt djórahald.

Ásetingin, saman við ásetingunum í serliga §§ 18-24, setur nøkur mørk fyri, hvussu vinnuligt djórahald skal rekast, og málið er at tryggja, at djór, hvørs meginendamál er við sølu at fáa eigaranum fíggjarligan vinning, eisini hava sømilig kor. Av tí at meginendamálið sostatt er djóravælferð, er einki inntøkumark sett, og í útgangsstøði er alt virksemi, ið ber brá av vinnuligum djórahaldi, fevnt av ásetingini. Sum dømi kunnu nevnast bøndur, ið selja seyð til slátur og meirvirking á løggildum sláturvirki, og bøndur, ið selja seyð ella kjøt beinleiðis til brúkaran við durasølu. Tey, sum við sølu og vinningi fyri eyga, hava høsn fyri at selja egg, eru fevnd av ásetingini, eins og tann, sum t.d. elur rasuhundahvølpar við sølu fyri eyga.

Ásetingin er tó ikki galdandi fyri tey, sum av og á – uttan at talan er um beinleiðis aling – selja djór, t.d. kettlingar ella hundahvølpar, fyri at sleppa undan at avlíva djórini. Fyri at sleppa undan at seta eitt inntøkumark og við tí skapa eina óneyðuga umsiting, verður tað latið upp í hendurnar á Heilsufrøðiligu starvsstovuni at meta um, hvørt virksemið er soleiðis háttað, at talan er um vinnuligt djórahald. Eisini í hesum høpi skal havast í huga, at ásetingin fram um nakað annað hevur til endamáls at fremja djóravælferð.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlit við, at djór, sum eru partur av einum vinnuligum djórahaldi, verða viðfarin, ansað og røkt í samsvari við ásetingarnar í hesi lóg, ásetingum, givnar við heimild í lógini, og ásetingar í aðrari lóggávu.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur frammanundan heilsufrøðiligt og veterinert eftirlit við slíkum djórahaldum, t.d. mjólkneytum og alifiski, men tað eftirlitið er grundað á aðra lóggávu, sum ikki hevur djóravælferð sum meginendamál. Við heimild í teirri lóggávuni hevur eftirlitsmyndugleikin heimild at fáa atgongd til staðið, har djórahaldið er, so eftirlitið kann fremjast. Mett verður neyðugt at geva eftirlitsmyndugleikanum greiða heimild at hava eftirlit við djóravælferðini, tá ið talan er um vinnuligt djórahald. Við heimild í stk. 2 hevur eftirlitsmyndugleikin rætt til at gera ástaðarkanningar, og ásetingin gevur tískil eftirlitsmyndugleikanum heimild at fara inn á privata ogn at fremja eftirlit. Tó at eftirlitsmyndugleikin hevur hesa heimild at fara inn á privata ogn, skal eftirlitið fremjast við varsemi, serliga, um tað vinnuliga djórahaldið verður útint á einum privatum bústaði. Um eftirlitsmyndugleikin ikki fær atgongd, kann politiið vera myndugleikanum til hjálpar. Greitt er, at slíkt eftirlit einamest er viðkomandi, tá ið talan er um vinnuligt djórahald, ið hevur eina

ávísa stødd, men eisini smá vinnulig djórahald eru fevnd av ásetingini. Víst verður eisini til viðmerkingarnar til § 23.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur ikki eftirlit við djóravælferðini, tá ið talan er um djórahald, sum ikki er vinnuligt. Slík mál eru, eins og higartil, politimál og skulu viðgerast sum slík. At talan kann vera um nógv djór, er ikki avgerandi í hesum sambandi.

Við heimild í stk. 3 kann eftirlitsmyndugleikin geva tí, ið er fevndur av ásetingini í stk. 1, boð um at seta í verk tiltøk fyri at røkka endamálinum í stk. 1. Verða slík boð ikki fylgd, er tað ógreitt, hvør skal hava boðini, ella ber tað ikki til at geva rætta viðkomandi boðini, kann eftirlitsmyndugleikin sjálvur seta neyðug tiltøk í verk ella biðja onnur seta neyðug tiltøk í verk vegna myndugleikan. Tiltøkini, sum myndugleikin sjálvur setur í verk eftir stk. 3, skulu ikki fevna um annað enn tað mest neyðuga fyri at røkka endamálinum í stk. 1. Neyðug tiltøk eftir hesi áseting fevna eisini um at avlíva djór og at taka av djórahaldið, um tað við fyriliti fyri djórunum er bráðneyðugt. Sama er galdandi, um boð, givin eftir stk. 3, ikki eru fylgd, og tað av teirri orsøk er neyðugt at avlíva djórini ella at taka av djórahaldið; hetta er eisini galdandi, um upprunaligu boðini eru minni inntrívandi enn avlíving ella avtøka.

Politiið skal vera myndugleikanum til hjálpar, um tað er neyðugt, og tiltøk, sum verða sett í verk eftir hesi áseting, verða rindað av tí, ið rekur vinnuliga djórahaldið.

Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um vinnuligt djórahald í kunngerð, undir hesum m.a. reglur um inntøkumark og djóratal, verður tað mett neyðugt. Landsstýrismanninum er eisini heimilað at áseta reglur um djóravistarhald, djórahandlar o.tíl., undir hesum eisini reglur um, at djórahandlar skulu kunna keyparar um, hvussu djórið skal havast og røktast.

**Til § 20**
Ásett verður, at tann, sum rekur vinnuligt djórahald, skal tryggja, at djórini verða ansað av starvsfólkum, ið hava neyðugu fakligu førleikarnar. Førleikar fevna bæði um kunnleika og hegni. Stk. 1, 1. pkt. er galdandi fyri tann, sum rekur vinnuliga djórahaldið, og hetta fevnir bæði um eigara og tann, sum hevur ábyrgdina, tá ið eigarin ikki hevur ábyrgdina, t.d. tann, sum flytur djórið og tann, sum hevur ábyrgd av djórinum á einum sláturvirki. Skyldan merkir, at viðkomandi skal tryggja, at tað eru nóg nógv starvsfólk við røttu førleikunum. Stk. 1, 2. pkt. er galdandi fyri tey, sum ikki hava beinleiðis ella formliga ábyrgd fyri djórum, men sum við sínum virksemi kunnu ávirka vælferðina hjá djórunum, t.d. veiðumenn og fiskimenn. Hesi skulu hava neyðugu førleikarnar at útinna virksemið á ein hátt, sum er ráðiligur í mun til djóravælferð. Ásetingin er galdandi fyri ein og hvønn, sum skal avlíva eitt djór uttan so, at talan er um eina neyðstøðu, har ásetingin ikki kann gerast galdandi.

Førleikakravið verður tó ikki at brúka í øllum støðum, har fólk fáast við djór. Tað er ikki sjálvsagt, at førleikakravið skal fevna um fólk, sum hava tilvildarligt ella veikt samband við djórið, t.d. tey, sum koma fram á eitt djór, ið situr fast í einum stiki.

Førleikakravið er galdandi í sambandi við djórahald, handfaring, rakstur, flutning, avlíving, veiðu og fiskiveiðu, og fevnir bæði um tom djór og vill djór. Metingin av førleikakrøvunum

skal gerast í mun til ásetingarnar í lógini, har meginreglan er, at djór skulu viðfarast væl og verjast fyri vandanum fyri óneyðugari strongd og ampa. Sum dømi um førleikakrav kann nevnast, at tey, ið taka við einum festi, skulu hava ávísan formligan kunnleika til landbúnað. Á sama hátt kunnu bara tey avlíva hval, sum hava luttikið á grindaskeiði og fingið viðkomandi kunning um m.a. grindalóggávu, brúk av grindareiðskapi, drápshátt og staðfesting av deyðseyðkennum.

Í stk. 2 verður ásett, at tann, ið rekur vinnuligt djórahald ella hevur ábyrgdina av djórahaldinum, ikki skal lata børn undir 16 ár hava sjálvstøðuga ábyrgd av djórum. Yvirskipaða ábyrgdin er hjá (arbeiðs)leiðaranum, til tann ungi er vorðin 16 ára gamal og sjálvur kann átaka sær formligu ábyrgdina.

Ásetingin í stk. 3, um ikki at lata djór upp í hendurnar á fólki, um orsøk er at halda, at tey ikki megna ella vilja fara væl við djórinum, er galdandi fyri øll føri, har djór verða latin øðrum innan fyri landafrøðiliga virkisøki lógarinnar. Ásetingin skal handhevjast innan fyri karmarnar á altjóða avtalum, tá ið talan er um handil við djórum tvørtur um landamørk.

Stk. 4 heimilar landsstýrismanninum í kunngerð at áseta nærri reglur um upplæring og førleikar. Slíkar reglur kunnu frammanundan verða ásettar í serlóggávu, m.a. innan fyri aling og landbúnað, og víst verður til hesa lóggávu. Kunngerðin kann eisini áseta reglur um førleikar o.tíl. hjá teimum, ið hava kelidjór ella stuttleikadjór, men í fyrstu atløgu er ikki ætlanin at áseta tílíkar reglur.

Kunngerðarheimildin fevnir eisini um at góðkenna upplæringartilfar og at góðkenna starvsfólk.

**Til § 21**
Ásetingin heimilar landsstýrismanninum at áseta krøv um stovnseting, staðseting, skipan og rakstur av virksemi, ið er fevnt av lógini, undir hesum krøv um loyvi og afturkalling av loyvum, fráboðan, skráseting og góðkenning og um afturtøku av góðkenning. Ásetingin gevur m.a. heimild at krevja, at tey, sum skulu brúka rakstrarbygningar ella serligar mannagongdir og útgerð, skulu skrásetast ella hava loyvi. Heimild er eisini at áseta, at tey, sum reka ávíst djórahald ella virksemi, m.a. djóraflutning, djóravist, djóragarð, leigu av djórum, fiskaaling og sláturvirki skulu vera skrásett ella løggild. Ásetingin heimilar eisini møguligum komandi krøvum um skráseting ella loyvi, t.d. krøv um loyvi til at týna skaðadýr og krøv um, at hetta loyvi skal skrásetast.

Ásetingin er fyrst og fremst ætlað vinnuligum djórahaldi ella djórahaldi av einum ávísum vavi. Endamálið er ikki at áseta skrásetingar- ella góðkenningarskyldu fyri kelidjór.

**Til § 22**
Stk. 1 ásetur, at tann, ið rekur vinnuligt djórahald, skal tryggja, at rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir, sum verða brúkt til djór, eru egnað at røkja fyrilitið fyri vælferðini hjá djórunum. Hetta er galdandi uttan mun til, um rakstrarhátturin, mannagongdin, útgerðin ella tøkniliga loysnin vanliga verður brúkt ella ikki.

Greinin fevnir um viðurskifti við rakstrarhættum, mannagongdum, útgerð og tøkniligum loysnum, sum kunnu haldast at ávirka vælferðina hjá djórum. Hetta fevnir m.a. um rakstrarhættir, framleiðsluhættir, innrættingar og útgerð, t.d. grímur, kvistløgur og tjóður, tøðskipanir (t.d. rimagólv, flórar við sjálvvirkandi skavarum og køstafrárenning), luftskiftisskipanir, mjólkimaskinur, tøkniligar loysnir fyri smoltifisering, gevingarskipanir, vatnviðgerð og útgerð til bæði aktivan flutning av djórum við vakuum og passivan flutning av djórum gjøgnum rør- og pumpuskipanir. Mannagongd í hesum høpi fevnir eisini um t.d. temjing og venjing og avriks- og framleiðslufremjandi hjálpitól. Reglur um venjingarhættir eru eisini viðgjørdar í ásetingini um venjing, framsýning og kappingar o.a. Mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir, sum eru knýttar at heilivágsviðgerð og skurðviðgerð, eru viðgjørdar í ásetingini, sum skipar hesi viðurskifti.

Kravt verður ikki, at tey, sum hava útgerð o.tíl., ið ikki longur verður mett at vera hóskandi í mun til djóravælferð, men sum kortini er vanlig í føroyskum djórahaldi, skulu taka hesa útgerð burtur. Kortini skal gerast ein ítøkilig meting av, um útgerðin o.tíl. er egnað at brúka í djórahaldinum. Hetta kann hava við sær, at tann, ið hevur djórahaldið, má skifta útgerð ella bøta ella broyta viðurskiftini á slíkan hátt, at krøvini í ásetingini verða lokin. Er talan um nýgerð og beinleiðis útskiftingar skal kravið um, at útgerðin o.tíl. er egnað, lúkast. Metir myndugleikin, at tørvur er á yvirhøvur at broyta rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir, sum verða brúkt, skal hetta gerast við kunngerð eftir stk. 3. Tað sama er galdandi fyri yvirskipað forboð fyri at brúka ávísar rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir.

Í stk. 2 verður ásett, at tann, sum marknaðarførir ella selur nýggjar rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir at brúka til djór ella djórahald, skal tryggja, at hesi eru roynd í verki, og at tey í mun til djóravælferð eru egnað til endamálið. Talan er um rakstrarhættir, mannagongdir o.s.fr., sum ikki eru brúkt í Føroyum frammanundan. Ásetingin fevnir tí ikki um rakstrarhættir, mannagongdir o.s.fr., sum longu verða brúkt, men slíkt, sum verður ment og marknaðarført sum nýtt. Hóast landsstýrismaðurin hevur brúkt kunngerðarheimild sína eftir stk. 3, kann eftirlitsmyndugleikin eftir ásetingini í § 24 um upplýsingar- og fráboðanarskyldu, skjalprógv o.s.fr. krevja tær upplýsingar og tey skjalprógv, sum hava týdning fyri eftirlit myndugleikans.

Í stk. 3 verður heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at áseta nærri reglur um rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir. Ásetast kann forboð fyri sølu og nýtslu av ávísum rakstrarhættum, mannagongdum, útgerð og tøkniligum loysnum, eins og krøv um skjalprógv. Ásetast kunnu eisini krøv um kunning og nýtsluleiðbeiningar.

**Til § 23**
Ásett verður, at tann, sum rekur vinnuligt djórahald, ið er fevnt av ásetingini í § 19, skal geva eftirlitsmyndugleikanum ótarnaða atgongd til støð ella rúm, har djór verða hildin, ella har annað virksemi, ið er fevnt av lógini, verður rikið.

At myndugleikin skal hava ótarnaða atgongd merkir, at myndugleikin til eina og hvørja tíð skal fáa atgongd til hesi støð ella rúm. Hesin rættur er galdandi alla staðni, har orsøk er til at halda, at djór verða hildin, ella har annað virksemi, ið er fevnt av lógini, fer fram. Rætturin er

ikki treytaður av, at djór veruliga eru á staðnum ella í rúminum, tí rætturin at gera eftirlit fevnir eisini um at kanna rúm o.tíl., har sagt verður, at djór ikki eru. Samstundis kann tørvur vera á at kanna umstøðurnar, hóast eingi djór eru á staðnum. Upplýsingar um, hvussu sjálvt staðið ella rúmið er skipað, hildið við líka o.s.fr., kann geva eftirlitsmyndugleikanum vitan um viðurskiftini hjá djórum, ið hava verið hildin á staðnum ella í rúminum. Rætturin til ótarnaða atgongd fevnir eisini um rættin at kanna lutir o.a., t.d. innihaldið í einum heilivágsskápi.

At myndugleikin ikki fær ótarnaða atgongd fevnir bæði um tey føri, har tann, ið hevur ábyrgdina, beinleiðis noktar myndugleikanum atgongd, eins og tað fevnir um tey føri, har myndugleikin ikki við rímiligum royndum fær samband við tann, ið hevur ábyrgdina, og sum tí kann geva myndugleikanum atgongd. Rætturin til atgongd er sostatt galdandi uttan mun til, um tann, sum hevur ábyrgdina, er til staðar.

Eftirlitsmyndugleikin kann kortini ikki fáa sær atgongd til læst rúm, um eigarin ella annar, ið hevur ábyrgdina, ikki er til staðar. Í slíkum førum er neyðugt at fáa politiið til hjálpar. Rætturin til ótarnaða atgongd, sum eftirlitsmyndugleikin hevur eftir stk. 1, 1. pkt., gevur heldur ikki myndugleikanum rætt til at tvinga seg inn á ognina, um eigari ella ábyrgdari er til staðar og noktar myndugleikanum atgongd. Eisini í slíkum førum er neyðugt at fáa politiið til hjálpar. Er talan um neyðrættarstøðu, skal støðan metast eftir vanligu reglunum um neyðrætt.

Tá ið rætturin til atgongd verður brúktur, skal fyrilit havast fyri heimafriðinum. Eftirlit í privatum heimum, har vinnuligt virksemi, sum sbrt. lógini er undir eftirliti, ikki verður rikið, er bert viðkomandi í teimum førum, har hildið verður, at djór eru fyri óneyðugari strongd ella líðing. Verður biðið um at fáa politiið til hjálpar, hevur politiið í slíkum førum sama rætt til atgongd sum eftirlitsmyndugleikin, ið hevur biðið um hjálp.

Eftirlitsmyndugleikin kann hava sakkøn fólk við sær á eftirlitsvitjanir. Tørvur kann vera á at hava fólk við sær, sum hava serligan kunnleika um ávísa djóraslagið ella djórahaldið sjálvt, t.d. djóralæknar, etologar (atferðarfrøðingar), byggikøn o.tíl., so málsupplýsingin gerst meira fullfíggjað.

Í stk. 3 verður ásett, at tann, ið rekur vinnuligt djórahald, uttan kostnað skal lata eftirlitsmyndugleikanum neyðug høli, innbúgv, arbeiðshjálp og amboð, ið eru neyðug fyri at fremja eftirlitið, og skal annars hjálpa eftirlitsmyndugleikanum at leggja eftirlitsvitjanina til rættis. Neyðug høli merkir hølini á staðnum, sum eru neyðug fyri at útinna arbeiðið at greina og skjalprógva veruligu viðurskiftini, t.d. at taka myndir ella royndir, at viga djór o.tíl.

**Til § 24**
Stk. 1 áleggur tí, ið rekur vinnuligt djórahald, skyldu at lata upplýsingar, fráboðanir, frágreiðingar, skjalprógv og innlit í skjøl, sum hava týdning fyri eftirlit myndugleikans. Skyldan at lata upplýsingar fevnir eisini um at fáa til vega upplýsingar, sum eftirlitsmyndugleikin krevur. Upplýsingar kunnu krevjast munnliga, uttan at kunnað er um hetta frammanundan. Eftirlitsmyndugleikin kann krevja tær upplýsingar, sum hava týdning, tá ið djóravælferðarviðurskiftini skulu greinast, undir hesum eisini innlit í viðkomandi skjøl.

Skyldan at lata upplýsingar o.a. er eisini galdandi fyri onnur, sum hava viðkomandi vitan og kunnleika, sbr. stk. 1, 2. pkt. Hetta er fyrst og fremst galdandi fyri tey, sum í sínum arbeiði hava kunnleika um djórahald og handfaring av djórum hjá øðrum. Skyldan at lata upplýsingar er avmarkað til tær upplýsingar, sum eftirlitismyndugleikin hevur tørv á í einum ítøkiligum máli. Skyldan hjá almenninginum er avmarkað til tað, sum er fevnt av § 5.

Upplýsingar eftir hesi áseting fevna eisini um upplýsingar um, hvar djór eru. Slík upplýsingarskylda hevur samband við rættin til atgongd eftir § 23 og upplýsingarskylduna eftir § 24, stk. 1, 1. pkt. Ásetingin skal tryggja, at djór ikki verða hildin frá eftirliti við at myndugleikin ikki fær neyðugar upplýsingar um, hvar djórini eru.

Stk. 2 heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um upplýsingar- og fráboðanarskyldu í kunngerð. Heimild er eisini at áseta krøv um skipað eftirlitstiltøk fyri at tryggja hetta. Skipað eftirlitstiltøk kunnu fevna um egineftirlit og innanhýsis eftirlit, men geva fleiri møguleikar at velja eftirlitshátt fyri at tryggja og skjalprógva, at virksemið verður útint í samvari við lógina, heldur enn bara at krevja innanhýsis eftirlit. Slíkar skrásetingar kunnu vera neyðugar fyri at hava eftirlit við tiltøkum, sum skulu forða fyri eldi, tryggja luftskifti, veita fóður og vatn, nøktandi røkt o.tíl.

**Til § 25**
Ásett verður, at endamálið við aling er at ala sterk djór við góðari heilsu og góðum virkismøguleikum. Aling merkir eitt og hvørt virksemi, sum er neyðugt fyri at djórið skal fáa avkom, og fevnir um bæði natúrligan og eftirgjørdan gitnað, undir hesum eisini lív- og ílegutøkni.

Sambært teimum alireglum, ið t.d. alifeløg fyri hundar hava, er loyvt at ala við sjúkum hundum og hundum, sum ikki (kunnu) hava optimalan trivnað. Ásetingarnar í § 25 fara kortini altíð at ganga fram um slíkar alireglur, og at ein hundur hevur ættartalvu og er aldur eftir reglunum hjá einum alifelag, er í sjálvum sær ikki nóg mikið til, at alingin lýkur treytirnar í § 25.

Er støðan tann, at djór ikki av sær sjálvum vilja makast, ella kunnu djórini ikki makast natúrliga, eigur at verða umhugsað, um hesi bæði djórini yvirhøvur skulu hava avkom. Ein møguleiki er tvingsilsmaking, men hetta meta dugnaligir alarar at vera óhóskandi.

Í stk. 2, nr. 1 verður ásett, at loyvt er ikki at ala, um alingin broytir arvaeginleikarnar soleiðis, at djórið kropsliga ella sinnisliga verður negativt ávirkað. Hevur djórið støðugan ella afturvendandi tørv á heilivágsviðgerð ella skurðviðgerð, kann tað benda á, at alingin ikki er í samsvari við hesa áseting.

Í nr. 2 verður ásett, at aling er ikki loyvd, um alingin avmarkar djórið í síni natúrligu atferð, meðan tað eftir nr. 3 er bannað at ala, um alingin vekir almennar etiskar reaktiónir.

Handilslig aling snýr seg m.a. um at laga djór til tað umhvørvi, sum tey fáa í einum djórahaldi. Hetta kann hava týdning fyri djóravælferðina, hóast onkur kann halda, at tað

ávirkar djórið kropsliga ella sinnilsliga á negativan hátt. Ásetingin er ikki ætlað til aling, sum hevur til endamáls at fremja positivar eginleikar, t.d. kollut neyt ella spøk djór.

Ásetingin forðar ikki fyri, at alivinnan seinni møguliga fer at ala fram lívsøran (sterilan) fisk. Við støði í teirri vitan, sum er tøk í dag, verður mett, at hetta ikki er í stríð við ásetingina.

Sum meginregla skal aling ikki hava til endamáls at viga upp ímóti tí, sum vantar í umhvørvinum ella brúkast til at laga djór til uppgávur ella umhvørvi, sum tey ikki hava natúrligar fortreytir fyri at trívast í. Møguleikarnir fyri miðvísari aling eftir bæði siðbundum og ílegutøkniligum mannagongdum eru vorðnir sera góðir. Uttanlands verða t.d. aldar kettur, ið ikki hava feld, og blindar hønur, sum ikki pikka hvørja aðra, hóast tær liva á trongum øki.

Dømi er eisini um neytaslag við dupultum vøddum, har hetta hevur við sær, at kýrnar illa fáa kálvað. Flestu kálvarnir verða tí tiknir við skurðviðgerð. Slík aling er í stríð við ásetingina, tí alingin verður mett at ávirka djórini kropsliga ella sinnisliga á negativan hátt, avmarkar djórið í natúrligu atferð síni og hevur við sær almennar etiskar reaktiónir.

Í stk. 3 verður sett forboð fyri at halda fram at ala við djórum, sum hava ella hava fingið eginleikarnar, nevndir í stk. 2. Hetta merkir eisini, at tað er bannað at føra víðari slíkar arvaeginleikar, hóast alingin, sum hevur havt eginleikarnar við sær, er framd í djórahaldi í Føroyum ella uttanlands.

Stk. 4 heimilar landsstýrismanninum í kunngerð at áseta nærri reglur um aling av djórum.

**Til § 26**
Ásetingin skipar reglurnar um at venja djór og at brúka djór til framsýningar, undirhald og kappingar. Venjing fevnir bæði um kropsliga venjing (treysti, styrki og skjótleika) og lýdnis- og dugnaskaparvenjing (dressur). Ásetingin er galdandi fyri tann, sum venur djór, hvat so endamálið við venjingini enn er, og fyri tann, sum brúkar djór til framsýningar, undirhald ella kappingar, ella sum skipar fyri slíkum tiltøkum. Ásetingin hevur til endamáls at tryggja, at fyrilit verður havt fyri djórinum, sum verður vant, sýnt fram, brúkt til undirhald ella kappingar, og øðrum djórum, sum verða brúkt í sambandi við hetta virksemið.

Stk. 1, nr. 1 skal tryggja, at djórið er ført fyri at útinna virksemið uttan at verða lúgvað ella skatt. Ein og hvør útlúgving er ikki fevnd av hesi áseting; ásetingin er ætlað til tey føri, har djór luttaka í virksemi, sum ikki er hóskandi í mun til kropsligu støðu teirra, og har roknast kann við, at djórini fáa skaða av útlúgvingini. Ávirkanin á djórið skal, alt tað ber til, metast objektivt við støði í kunnleikanum til tørv og mørk djórsins, bæði áðrenn djórið verður brúkt til slíkt virksemi, og meðan djórið verður vant.

Stk. 1, nr. 2 skipar nýtsluna av heilivági og øðrum evnum, sum verða givin djórinum, og nýtsluna av hjálpitólum ella skurðviðgerðum, sum kunnu ávirka orku og mátt djórsins. Hjálpitól kunnu t.d. verða evni, sum ræða ella tvinga djórið, ella sum elva djórinum pínu. Hjálpitól kunnu annaðhvørt í sjálvum sær ella við ókunnugari nýtslu vera í stríð við ásetingina. Boksl, rossatýggj og pískur á rossi eru dømi um slík hjálpitól. Viðgerð eftir hesi áseting fevnir bæði um viðgerðarhættir og heilivág. Falkatemjing (falkonering) er dømi um

virksemi, ið er bannað eftir hesi áseting. Í kunngerð, givin eftir stk. 2, kann verða nágreinað, hvat forboðið fevnir um.

Stk. 1, nr. 3 er galdandi fyri virksemi, tól, amboð, mannagongdir o.a., sum verður brúkt fyri at elva djórum ótta ella skaða ella óneyðuga nervan, strongd og líðingar. Ymisk sløg av djóravenjing og at brúka djór til framsýningar, undirhald og kappingar kunnu elva djórum meira ella minni ótta, skaða ella aðra líðing. Ásetingin fevnir um at brúka streym og onnur tól, amboð og mannagongdir, sum í sjálvum sær elva djórum munandi ampa og pínu, ella sum kunnu hava við sær sinnisligar broytingar ella skaðar. Dømi um hetta er elektriskt helsi, píkahelsi og onnur amboð, útgerð ella tól, sum við negativum sansaárinum (pínu og ampa) ávirka djórini.

Í ávísan mun umskarast ásetingarnar í stk. 1, nr. 2 og 3 við ásetingina um rakstrarhættir, mannagongdir, útgerð og tøkniligar loysnir.

Stk. 1, nr. 4 staðfestir, at tað er bannað at venja ella brúka djór til bardaga móti øðrum djórum ella móti fólki. Endamálið við slíkum bardaga er, at annað djórið loypur á hitt, ella at djórini leypa á hvørt annað. Talan kann eisini vera um bardaga millum djór og fólk. Hetta er bannað uttan mun til, um gjald verður kravt, og um áskoðarar eru til bardagan. Eisini venjing til slíkan bardaga er bannað. Ásetingin fevnir í útgangsstøði ikki um at venja og brúka tænastuhundar, men tað virksemið kann verða skipað nærri í kunngerð eftir stk. 2 og 3.

Í stk. 2 verður heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at áseta nærri reglur um venjing, framsýning, undirhald og kappingar. Tað kann vera viðkomandi at áseta nærri reglur um, hvørji djórasløg kunnu brúkast til almennar framsýningar, reglur um at brúka venjingarútgerð og -tól til lýdnis- og dugnaskaparvenjingar, reglur, ið forða fyri doping, reglur um, hvør kann fáast við at venja djór við stiknisvenjing (aversionsdressur) o.tíl.

Stk. 3 heimilar landsstýrismanninum at áseta undantøk frá stk. 1. Slík undantøk kunnu gerast í kunngerð, men kunnu eisini gerast við ítøkiligum boðum í einstøkum førum. Til dømis kann vera viðkomandi at nágreina í kunngerð, at bannið í stk. 1, nr. 4 ikki í øllum førum fevnir um at venja og brúka tænastuhundar.

**Kapittul 3: Fyrisitingarligar ásetingar, ásetingar um kæru og revsiásetingar**

**Til § 27**
Ásett verður, at avgerðir, tiknar við heimild í hesi lóg, kunnu kærast til Vinnukærunevndina. Avgerðir hjá Vinnukærunevndini kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika, og tað ber tískil ikki til at kæra beinleiðis til landsstýrismannin.

Vinnukærunevndin er tó, sum aðrir fyrisitingarligir myndugleikar, fevnd av heimildunum hjá Løgtingsins Umboðsmanni, eins og avgerðir nevndarinnar kunnu leggjast fyri rættin.

**Til § 28**
Ásett verður, at landsstýrismaðurin í kunngerð kann áleggja gjald fyri at rinda kostnaðin av eftirliti og serligum tænastum eftir hesi lóg ella kunngerðum, givnar við heimild í hesi lóg.

Talan er um eina yvirskipaða, ikki nágreinaða, heimildaráseting, og ítøkiligu gjøldini verða tí ásett í einstøku kunngerðini.

Eftirlit eftir stk. 1 fevnir um at hava eftirlit við, at tey, sum hava skyldur ella skulu lúka krøv eftir hesi lóg ella reglum, givnar við heimild í lógini, halda skyldunar og lúka krøvini. Ein týðandi partur av eftirlitinum er at gera fráboðaðar ella ófráboðaðar eftirlitsvitjanir ella á annan hátt fáa til vega kunnleika um viðurskifti, sum eru fevnd av lógini ella reglum, givnar við heimild í lógini, fyri at staðfesta, um viðurskiftini eru í lagi. Vegleiðingar, boð ella onnur tiltøk og revsitiltøk, sum hava til endamáls at tryggja, at krøvini eru lokin, eru eisini partur av eftirlitshugtakinum í stk. 1.

Gjald eftir stk. 1 kann krevjast fyri at rinda kostnaðin av tænastum/uppgávum, har greitt og eintýtt samband er millum tænastuna/uppgávuna øðrumegin og tann, sum fær ella brúkar tænastuna/uppgávuna hinumegin. Hetta er m.a. galdandi, tá ið brúkarin rindar fyri váttanir ella góðkenningar. Hetta eru uppgávur, sum eftirlitsmyndugleikin fær, tí einstakir brúkarar hava tørv á tí, og uppgávan verður tí at meta sum ein tænasta.

Tey, sum eru fevnd av eftirlitinum, kunnu eisini krevjast eftir gjaldi fyri at rinda kostnaðin, sum eftirlitsmyndugleikin hevur av at seta í verk serlig tiltøk, ið eru grundað á, at tann, sum er undir eftirliti, ferð eftir ferð ikki ger eftir boðum frá eftirlitsmyndugleikanum.

Í førum, har greitt og eintýtt samband ikki er millum tænastuna/uppgávuna øðrumegin og ein ítøkiligan brúkara hinumegin, tó at uppgávan á sama hátt hevur samband við brúkarar, kann gjaldið eisini krevjast við heimild í stk. 1.

Stk. 2 heimilar landsstýrismanninum í kunngerð at áseta nærri reglur um, hvussu gjøldini verða roknað, innkravd og inngoldin. Gjøldini skulu svara til veruliga kostnaðin, sum tað almenna hevur av at gera uppgávuna ella veita tænastuna.

**Til § 29**
Eftirlitsmyndugleikin fær við hesi áseting heimild at stovna dátuskráir ella at knýta seg at verandi dátuskráum. Dátuskráir skulu bara stovnast, um tað er neyðugt fyri at lúka ásetingar í lógini, reglur, givnar við heimild í lógini, ella um tað er neyðugt fyri at lúka treytir, ásettar í millumtjóðasáttmálum. Heilsufrøðiliga starvsstovan og landsdjóralækin brúka í dag ymsar útlendskar dátuskráir, m.a. fyri at lúka treytirnar, sum eru galdandi eftir veterineravtaluni millum Føroyar og ES. Tær dátuskráirnar eru heimilaðar í aðrari lóggávu.

Einans viðkomandi upplýsingar kunnu skrásetast í slíkar dátuskráir. Viðkvæmar persónsupplýsingar, sbr. løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, kunnu bara skrásetast við samtykki frá tí, sum upplýsingarnar viðvíkja. Viðkvæmar persónsupplýsingar eru upplýsingar um lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimsspekiliga ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagsligt tilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti. Víst verður til neyvaru ásetingarnar í løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum.

Stk. 2. heimilar landsstýrismanninum í kunngerð at áseta nærri reglur um skyldu at lata upplýsingar til skráir, nevndar í stk. 1.

**Til § 30**
Ásetingin er í stóran mun tann sama sum í djóraverndarlógini. Sum nakað nýtt verður ásett, at tað er revsivert ikki at gera eftir boðum frá eftirlitsmyndugleikanum, sbr. § 19, stk. 3. Fyri at boð, givin eftir § 19, stk. 3, sum ikki verða fylgd, skulu hava revsing við sær, er neyðugt, at boðini hava avgerandi týdning fyri vælferð djóranna. Verða boð ikki fylgd, og hevur tað við sær, at djórini mugu avlívast ella djórahaldið avtakast, er talan er um brot, sum greitt er fevnt av revsiásetingini; hetta er eisini galdandi, um upprunaligu boðini eru minni inntrívandi enn avlíving ella avtøka.

Stk. 1, 1. pkt. ásetur, at tilvitað brot og brot, framd av grovum ósketni, verða revsað. Medvirkni verður revsað á sama hátt. Revisramman er sekt ella fongsul í upp í 1 ár. Sambært stk. 2 kann revsingin herðast til fongsul í upp í 2 ár. Tvær treytir eru fyri, at revsingin kann herðast. Onnur treytin er, at gerðin ella undanlátið er tilætlað ella gjørt av grovum ósketni. Hin treytin er, at tað við gerðini ella undanlátinum er voldur skaði á heilsu hjá djórum ella at vandi hevur verið fyri tí, og at tað er fingin ein fíggjarligur vinningur, ella ætlanin hevur verið at fingið ein fíggjarligan vinning til annaðhvørt tann, sum hevur framt gerðina ella undanlátið, ella til onkran annan.

Hóast eitt brot sambært lógini er revsivert, kann revsingin, við støði í ítøkiligu umstøðunum í málinum og eftir eina ítøkiliga meting, fyri sambærilig brot vera ymisk.

Brot kunnu verða revsað við sekt ella við bæði sekt og fongsulsrevsing. Í flestu førum er revsing við sekt ein hóskandi revsing. Revsing fyri brot á lógina verður ásett sambært reglunum í 10. kapitli í revsilógini, har tað er tilskilað, at tá ið revsingin skal ásetast, skal havast fyrilit fyri, hvussu álvarsligt brotið er.

Eisini skal havast fyrilit fyri upplýsingum um lógbrótaran, eitt nú um persónlig og sosial viðurskifti, um viðurskifti hansara fyri og eftir gerðina og um orsøkina til, at brotið er framt. Harafturat skal, tá ið revsing verður ásett, havast fyrilit fyri, um brotið er framt við fíggjarligum vinningi ella sparing fyri eyga, uttan mun til um fíggjarligi vinningurin er fingin ella bert var tilætlaður, sbr. revsilógarinnar § 51, stk. 3, og § 80.

Revsiásetingin er býtt sundur í tveir partar; orsøkin til hetta sundurbýtið er m.a., at politiið fyri smærri lógarbrot skal hava møguleika at avgreiða málið við sektaruppskoti. Tá ið metast skal um, hvørt talan er um grovar ella serliga herðandi umstøður, skal dentur leggjast á tær avleiðingar, sum lógarbrotið hevur havt við sær, t.d. vavið á kropsligum ella sinnisligum skaða og pínu, og um lógarbrotið hevur staðið við í longri tíð ella er endurtikið. Dentur eigur eisini at leggjast á, um lógarbrotið er framt á serliga pínufullan hátt, og um lógarbrotið er framt tilvitað.

Ásetingarnar í stk. 1-3 eru nýggjar. Hesar ásetingar eru settar inn fyri at gera tað púra greitt, at tað er ikki loyvt at fara illa við djórum ella á annan hátt at gera seg inn á djór. Mett verður,

at tað við hesum verður gjørt púra greitt, at tey, sum hava og eru um djór, hava skyldu til at ansa eftir, at farið verður væl við djórunum, og at tey hava sømilig kor.

Ásetingarnar í stk. 1-3 er býttar sundur soleiðis, at stk. 1 revsar brot, ið eru framd av ósketni, stk. 2 revsar brot, ið eru framd av grovum ósketni, og stk. 3 revsar brot, har djórið er skammfarið.

Í fyrstu atløgu skal sostatt metast um, hvørt talan er um ósketni ella grovt ósketni.

Brot, framd av ósketni, verða revsað við sekt ella fongsulsrevsing í upp í 1 ár. Er talan um grovt ósketni, verður brotið revsað við sekt ella fongsulsrevsins í upp í 2 ár. Grovt ósketni er, tá ið djórið er viðfarið soleiðis, at tað hevur fingið álvarsligan skaða, t.d. við nógvari pínu, líðing og ótta, ella um djórið hevur fingið varandi mein.

Er talan um brot, har djórið er skammfarið, er útgangsstøði fongsulsrevsing í upp í 2 ár. Talan er um somu viðurskifti, sum eru nevnd um grovt ósketni, men brotið skal harafturat vera at meta sum skammfaring, t.e. beinleiðis djóravanrøkt. Talan kann vera um eitt einstakt føri, men slík vanrøkt kann eisini vera farin fram í longri tíð, eins og talan kann vera um afturvendandi vanrøkt. Eitt djór verður mett at vera skammfarið, tá ið tað t.d. í longri tíð ikki hevur fingið nøktandi fóður og vatn, ella tá ið djórið verður hildið í umstøðum, ið ikki eru egnaðar til djórið, t.d. á ov avmarkaðum øki. Dømi um skammfaring eru eisini, um tá ið djórið verður bart ella blakað á sjógv, t.d. fyri at avlíva tað, ella tá ið djórið verður svavt uttan hóskandi doyving.

Ásetingin í stk. 4 er í stóran mun tann sama sum í djóraverndarlógini. Stk. 4, 1. pkt. ásetur, at brot, framd av ósketni, verða revsað. Revsikarmurin er sekt ella fongsul í upp í 4 mánaðir. Medvirkni verður revsað á sama hátt.

Revsiásetingarnar kunnu býtast sundur í tveir høvuðsbólkar: Brot á almennar ásetingar og brot á serligar ásetingar um djórahald.

Almennu ásetingarnar eru reglurnar í § 6 um heilivágsviðgerð og skurðviðgerð, í § 7 um merking av djórum, í § 8 um flutning av djórum, í § 9 um avlíving av djórum, í § 10 um djór, ið verða brúkt til royndir, undirvísing og medisinskt virksemi, í § 11 um forboð fyri at vera harðligur móti djórum o.a., í § 12 um innrætting av bygningum, girðingum o.tíl., og í § 15 um at sleppa djórum út í náttúruna.

Serligu ásetingarnar um djórahald eru reglurnar í § 16 um loyvi at halda djór, í § 17 um umhvørvi, í § 18 um eftirlit og røkt, í § 20 um starvsfólk, í § 22 um rakstrarháttir, mannagongir o.tíl., í § 23 um rætt eftirlitsmyndugleikans at gera kanningar, í § 24 um at vera eftirlitsmyndugleikanum til hjálpar, í § 25 um at ala djór og í § 26 og um venja djór.

Sum nakað nýtt verður ásett, at tað er revsivert ikki at gera eftir boðum frá eftirlitsmyndugleikanum, sbr. § 19, stk. 3. Fyri at boð, givin eftir § 19, stk. 3, sum ikki verða fylgd, skulu hava revsing við sær, er neyðugt, at boðini hava avgerandi týdning fyri vælferð djóranna. Verða boð ikki fylgd, og hevur tað við sær, at djórini mugu avlívast ella djórahaldið

avtakast, er talan er um brot, sum greitt er fevnt av revsiásetingini; hetta er eisini galdandi, um upprunaligu boðini eru minni inntrívandi enn avlíving ella avtøka.

Sambært stk. 5 kann revsingin herðast til fongsul í upp í 2 ár. Tvær treytir eru fyri, at revsingin kann herðast. Onnur treytin er, at gerðin ella undanlátið er tilætlað ella gjørt av grovum ósketni. Hin treytin er, at tað við gerðini ella undanlátinum er voldur skaði á heilsu hjá djórum ella at vandi hevur verið fyri tí, og at tað er fingin ein fíggjarligur vinningur, ella ætlanin hevur verið at fingið ein fíggjarligan vinning til annaðhvørt tann, sum hevur framt gerðina ella undanlátið, ella til onkran annan.

Vandin, nevndur í stk. 5, nr. 1, nýtist ikki at hava verið til staðar í tí ítøkiliga málinum. Tað er nóg mikið, at ábyrgdarhavandi við síni gerð ella undanláti hevur verið orsøk til ein møguligan vanda fyri djóraheilsuni. Talan er um eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri.

Við heimild í stk. 6 kann verða ásett, at brot á reglurnar ella treytir, givnar eftir reglunum, kann verða revsað við sekt ella fongsli í upp í 4 mánaðir. Eisini kann verða ásett, at revsingin kann herðast til fongsul í upp í 2 ár, treytirnar, nevndar í stk. 5, eru loknar. Hetta merkir, at revsingin kann herðast fyri brot, sum eru framd tilætlað ella av grovum ósketni, um djór hava fingið skaða ella vandi hevur verið fyri tí, ella um tað við brotinum er ætlaður ella fingin fíggjarligur vinningur. Hetta fevnir eisini um undanlát.

Eftir stk. 7 kunnu feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar verða revsaðir eftir reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

Í stk. 8 verður ásett, at tá ið sekt verður ásett sbrt. stk. 4-6, og talan er um vinnuligt djórahald, skal fyrilit havast fyri, um brotið er framt við fíggjarligum vinningi ella sparing fyri eyga, uttan mun til um fíggjarligi vinningurin er fingin ella bert var tilætlaður, sbr. revsilógarinnar § 51, stk. 3, og § 80. Endamálið er at tryggja, at fyribyrgjandi virknaðurin verður meira sambæriligur uttan mun til støddina á vinnuliga djórahaldinum, t.e. uttan mun til, um talan er um nógv ella fá djór.

**Til § 31**

Ásett verður, at tann, sum er dømdur fyri skammfaring av djórum, við dóminum kann missa rættin at eiga, brúka, halda ella slakta djór ella sum heild at fáast við djór. Tað sama er galdandi fyri tann, sum áður hevur brotið ásetingarnar í hesi lóg. Forboðið kann vera tíðaravmarkað ella tíðaróavmarkað. Forboðið kann vera avmarkað til ávís sløg av djórum.

Hóskandi lutfall skal vera millum brotið, sum framt er, og rættin, sum verður frádømdur. Frádømingin skal hvørki í tíð ella vavi vera meira umfatandi enn neyðugt. Broytast viðurskiftini, kann málið verða tikið upp aftur. Talan er um eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri. Dømi um brot, sum kann hava við sær, at rætturin verður frádømdur, er, at djórini ikki fáa føði og vatn, ella at djórini eru fyri harðskapi og vanrøkt, sum hava við sær ógvusligar líðingar. Tað er eisini viðkomandi at hyggja eftir hvussu leingi, djórini hava verið fyri skammfaring ella vanrøkt, eins og tað er viðkomandi at hyggja eftir umstøðunum, sum djórini hava verið havd undir. Endurtøka kann hava við sær frádøming, men eisini í slíkum

førum skal metast um ítøkiliga brotið og avleiðingarnar av brotinum saman við upprunaliga brotinum og avleiðingarnar av tí.

Tann, sum hevur mist rættin at eiga djór o.tíl., og kortini hevur ella fær sær djór, verður revsaður við sekt eftir stk. 2. Djórini verða tikin frá viðkomandi og annaðhvørt seld ella avlívað.

Hevur onkur ikki hildið forboðið í stk. 1 við at hava ella fáa sær djór, kann politiið eftir stk. 3 flyta djórið og annaðhvørt selja ella avlíva tað, um ikki eigarin ella tann, sum hevur djórið, sjálvur hevur syrgt fyri, at djórið verður sett aðrastaðni. Er talan um fleiri djór, t.d. eitt seyðafylgi, har tað ikki er hóskandi at flyta djórini, kann talan heldur gerast um at lata øðrum ábyrgdina. Hóast ábyrgdin fyri djórinum verður flutt, verður ognarrætturin ikki av sær sjálvum fluttur, og tað er framvegis tann, ið eigur djórið, ið hevur fíggjarligu ábyrgdina og skal rinda fyri t.d. fóður og røkt og fólk at ansa djórunum. Útreiðslur, sum tað almenna hevur av hesum, kunnu krevjast aftur frá tí, ið djórið eigur.

Tey, sum vita um slíkt forboð, og kortini lata viðkomandi hava ábyrgd o.tíl. av djórum, kunnu eisini verða revsað við sekt.

**Til § 32**
Ásett verður, at mál um brot á lógina og brot á reglur, givnar við heimild í lógini, verða viðgjørd sum politimál. Hetta merkir, at politiið kann avgreiða mál við sektaruppskoti og á tann hátt sleppa undan at fara í rættin við hvørjum einstøkum broti. Fortreytin er tó, at tann skuldsetti – uttanrættarliga – játtar seg sekan í brotinum og góðtekur ásettu sektina.

Ásett er eisini, at tey í rættargangslógini nevndu tiltøk í kap. 72 um at leggja hald á og kap. 73 um rannsakan kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.

At enda er ásett, at útreiðslurnar eftir lógini – er ikki annað ásett – verða bornar sum útreiðslur hjá politinum. Sama er ásett í djóraverndarlógini.

**Til § 33**
Gildiskomuáseting. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 9 frá 14. mars 1985 um vernd av dýrum. Kunngerðir, givnar við heimild í løgtingslóg um vernd av dýrum, vera verandi í gildi, til tær verða settar úr gildi.